**Barnaverkætlanin 2023-26**

# Vitanarráðstevna um børn og ung

**13. november 2023 í Norðurlandahúsinum**




**Tilgongd, samanumtøka og høvuðsniðurstøður**

**30. november 2023**

*Ritsjtórn: Magnus Tausen, Tóra Petersen og Steffen Löfvall (Ábyrgd)*

# Vitanarráðstevna um børn og ung 13. november 2023

Tilgongd, samanumtøka og høvuðsniðurstøður

## 1. Tilgongdin

28. mars í 2023 skrivaðu Kommunufelagið, Løgmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almenna- og Mentamálaráðið og Barna- og Útbúgvingarmálaráðið undir semjuskjal um felags tilgongd til gagn fyri børn og ung.[1]

Talan er um slóðbrótandi verkætlan, sum allir partar eru felags um við endamálinum at seta barnið í fremstu røð, tá ið tænastur verða veittar frá ymsu pørtunum og at virka í felag fyri, at tænasturnar verða sameindar og samskipaðar.

Verkætlanin er skipað við verkætlanareigarum umboðandi teir 5 eigararnar, stýrisbólki við avvarðandi aðalstjórum og stjóra í Kommunufelagnum, verkætlanartoymi og fakligum ráðgevarabólki umboðandi allar eigararnar.

Tilgongdin fram til vitanarráðstevnuna 13. november hevur m.a. fevnt um, at:

- Finna fram og greina tey álit, ið skrivað eru viðvíkjandi økinum. Omanfyri 30 í tali
- Út frá greiningararbeiðinum at skipa tríggjar arbeiðsbólkar at hava nærri fokus á trý punkt:
    - Børn og ung
    - Veitingar, tænastur, stovnar og lógarverk
    - Veitingar og tað fyrimyndarliga (ideal)
- Savna hetta arbeiði saman á felags tiltøkum í oktober 2023, og leggja fram fyri størri forum
- Skipa fyri Vitanarráðstevnu 13. november, sum tekur støði í tí, ið teir tríggir bólkarnir hava víst á, og sum er sett inn í ein skipanarfrymil við til samans 6 samansettum vitanarøkjum, sum øll snara um miðdepilin *Gott barna- og ungdómslív.*




[1] fø-semjuskjal-undirskrivað.pdf (cdn.fo)

## 2. Vitanarráðstevna um børn og ung 13. november 2023

Omanfyri 250 fólk vóru savnað í Norðurlandahúsinum henda dagin umboðandi at kalla allar viðkomandi geirar, stovnar, felagsskapir osfr. Ein kolosal vitan og ein kolosalur vilji savnaður á einum stað.




Dagurin var skipaður við viðkomandi framløgum og skrivispurtum í til samans 27 bólkum. Skrivitilgongdin var stýrd og snúraði kring skipanarfrymilin, sum verður lýstur seinni. Til samans 6 spurningar skuldu viðgerast í heima- og útiumfari. Spurningarnir tóku støði í teimum 6 útvaldu vitanarøkjunum, men vóru annars skipaðir eins, tó eisini serstakir fyri at finna fram tær avbjóðingar, ið eru tvørtur um tey 6 vitanarøkini og inn í kjarnuna *Gott barna og ungdómslív*.

## 3. Samanskriving

Í tilgongdini at samanskriva eru svarini frá teimum 6 vitanarøkjunum (A-F) og spurningunum (1-6) skipað øki fyri øki og spurning fyri spurning. Úr tí eru drignar nakrar høvuðsniðurstøður. Úr hesum eru so aftur drignar nakrar høvuðsniðurstøður tvørtur um øll vitanarøkini (A-F) grundað á spurningarnar (1-6). Leisturin sæst niðanfyri.

**Leistur**

| | **Faklig vitanarøki sambært skipanarfrymlinum** | | | | | | | **Eygleiðingar tvørtur um faklig vitanarøki** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Arbeiðs-spurningar** | **A (1-5)** | **B (6-10)** | **C (11-13)** | **D (14-17)** | **E (18-23)** | **F (24-27)** | | |
| **1** | | | | | | | ⇒ | |
| **2** | | | | | | | ⇒ | |
| **3** | | | | | | | ⇒ | |
| **4** | | | | | | | ⇒ | |
| **5** | | | | | | | ⇒ | |
| **6** | | | | | | | ⇒ | |
| | ⇓ | ⇓ | ⇓ | ⇓ | ⇓ | ⇓ | | |
| **Eygleiðingar tvørtur um spurningar** | | | | | | | | |

Hesin leisturin er valdur fyri at fáa eina fatan av og eitt greitt yvirlit av tí, ið kom fram á degnum. Fyri hvørt vitanarøki sær og tvørtur um tey 6 vitanarøkini. Afturat hesum verða svarini í Mentimeter brúkt, so at til ber at fáa eina breiða, men fokuseraða vitan og sterkt grundarlag fyri víðari strategi arbeiðinum.

Henda samanskrivingin lýsir stutt í høvuðspunktum tað, sum fakfólk umboðandi breiðan skara úr ymiskum geirum tvørtur um land og kommunur og áhugabólkar komu fram til á degnum.

## 4. Verandi avbjóðingar

Í arbeiðinum at fremja heilsu- og trivnaðarfremjandi karmar fyri børn og ung í Føroyum, verða tað eyðmerktar fleiri avbjóðingar, sum krevja serligt fokus og broytingar. Millum hesar avbjóðingar er tørvurin á munandi styrktum tvørgangandi samstarvi, samskipan og samskapan millum land og kommunur, millum geirar og millum stovnar. Umframt at leikluturin og ávirkanin hjá foreldrum má styrkjast. Alt meðan fíggjarligi karmurin er trongur og fakliga arbeiðsmegin avmarkað.

Fokus er vent ímóti inklusjón, sálarligari heilsu og trivnaði, umframt týdninginum av at seta í verk og tryggja barnanna rættindi og tørv.

Fyri at megna at lyfta hesum avbjóðingum verður komið inn á ymisk tiltøk, so sum at betra samstarv tvørtur um verandi geirar, at styrkja førleika og leiklut hjá foreldrum, týdningin av at seta tiltøk í verk tíðliga og fyrbyrging, umframt tryggar og sunnar felagsskapir fyri børn og ung. Tað er eisini ein sterk áheitan um at økja fíggingina til økið og menna eina tilgongd grundaða á gransking, dátur og eftirmeting fyri at tryggja, at politikkurin verður grundaður á fakta.

Øll hesi átøk savna seg um aðalmálið at fremja trivnað og góða menning og tryggja góða barna- og ungdómslívið í Føroyum.

## 5. Gott barna og ungdómslív í Føroyum - Uppskot frá 27 arbeiðsbólkum

Teir 27 arbeiðsbólkarnir hava orðað uppskot til broytingar og batar, sum skulu fremjast her og nú og tey komandi árini. Hesar broytingar eru innan eitt nú:

- Samstarv millum skúlar, stovnar, familjuna og samfelagið
- Lógarbroytingar og barna- og ungdómspolitikk
- Gransking
- Sosialur stuðul
- Broytingar í, hvussu skúlar og stovnar eru skipaðir

Hetta fevnir millum annað um at styrkja samstarvið millum skúla, stovnar, familjuna og samfelagið gjøgnum samskapandi relatiónir og felags ábyrgd.

Her og nú er í uppskoti at:

- savna lógarverkið, sum fevnir um børn og ung
- Veita betri stuðul til foreldur
- Spora tørv rættstundis og soleiðis skipa tilboð og átøk alt fyri eitt tvørtur um verandi geirar

Í uppskoti komandi árini er at:

- Samskipa ráðgeving til foreldur, børn og ung
- At styrkja politisku raðfestingina í tí góða barna og ungdómslívinum og at raðfesta ráðgeving til familjur
- At savna verandi gransking og dátur innan barna- og ungdómsøkið, at gera vitanarpallar, har øll, bæði foreldur og børn teirra, starvsfólk, granskarar og tey, ið taka avgerðir hava atgongd
- Skipa royndarverkætlanir og eftirmeta tey átøk og tiltøk, sum sett verða í verk
- Styrkja granskingina og granskingarútbúgvingar
- Savna tænastur til børn og ung og teirra familjur
- Seta samskiparar, sum hjálpa familjunum, sum tørva viðgerð ella stuðul til serligan tørv
- Styrkja og góðskutryggja stovnar, har børn og ung eru, og gera tvørfakligar eindir
- Styrkja politiska samstarvið kring trivnað hjá børnum og ungum

Tættari og betri samstarv millum myndugleikar, stovnar, politikarar og samfelagið sum heild, gongur aftur í flestu uppskotunum, og víst verður á, at hetta er ein grundleggjandi fortreyt, skulu vit skapa eina meira heildar grundaða tilgongd at tryggja trivnað millum børn og ung í Føroyum. Tað krevur eitt lógvatak tvørtur um samfelagið alt.

Mest gjøgnumgangandi uppskotini og viðmerkingarnar eru sett upp øki fyri øki. Nøkur ganga aftur, sum víst er á fyrr.

Hetta, ið her er savnað, verður saman við samlaða tilfarinum í tilgongdini higartil lagt fyri eigararnar at halda seg til og brúka í víðari strategiarbeiðinum.

## 6. Ítøkilig uppskot frá teim 27 arbeiðsbólkunum - bólkað í tey sjey økini í skipanarfrymlinum




Ymist er, hvussu arbeiðsbólkarnir hava orðað seg og sett uppskotini fram. Tað er eisini ymist, hvussu bólkarnir hava svarað, og hvussu nógv er gjørt burturúr – m.a. hetta við, *hvør* skal standa við ábyrgdini hava ikki allir bólkar ávíst. Tí framgongur tað ikki fyri allar bólkar.

## A: Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir (1-5)

Yvirskipað fevna svarini frá hesum arbeiðsbólkunum um uppskot til broytingar til tess at styrkja karmarnar fyri einum góðum barna- og ungdómslívi. Nøkur av uppskotunum mæla arbeiðsbólkarnir til verða framd her og nú, meðan onnur eiga at verða framd komandi árini. Eisini hava arbeiðsbólkarnir uppskot um, hvørjir samfelagspartar hava ábyrgd av broytingunum.

| Hvat skal gerast? | Hvør |
|---|---|
| **Styrkt samstarv**<br>Átak: Skipa samskapandi samband millum skúla, familju og samfelagið | Ábyrgd: Skúlaleiðari, lærarar, Heim og skúli og politikkarar. |
| **Endurskoða læraraleiklutin**<br>Átak: Definera av nýggjum læraraleiklutin sum samskapara og ráðgeva | Ábyrgd: Undirvísingarstýrið, skúlaleiðarar og lærarar |
| **Felags ábyrgd millum foreldur**<br>Átak: Skipa felags ábyrgd millum foreldur fyri næmingabólkum og flokkum | Ábyrgd: Skúlaleiðarar, foreldur, Heim og skúli og skúlastýri |
| **Betra lógarverkið og granskingina**<br>Átak: Styrkja lógarverkið og granskingina viðv. viðurskiftum hjá børnum og ungum | Ábyrgd: Politikkarar, Setrið og aðrir granskingarstovnar og Undirvísingarstýrið |
| **Seta í verk barna- og ungdómspolitikk**<br>Átak: Menna og seta í verk ein samlaðan politikk á økinum | Ábyrgd: Undirvísingarstýrið, politikkarar og serfrøðingar á økinum |
| **Betra tilfeingið og løn**<br>Átak: Økja um tilfeingið og lønina hjá starvsfólkum | Ábyrgd: Undirvísingarstýrið og Fíggjarmálaráðið |
| **Stuðul til familjur og fokus á trivnað**<br>Átak: Øktur stuðul til familjur og økt fokus á trivnað hjá børnum og ungum | Ábyrgd: Sosialir myndugleikar, (skúla)sálarfrøðingar og serkøn á økinum |
| **Lógarsmíð**<br>Átak: Gera eina lógar rammu við endamálinum at seta í verk broytingar | Ábyrgd: Lóggevar, løgfrøðingar og politikkarar |
| **Útbúgving og førleikamenning**<br>Átak: Menna skipanir viðv. útbúgving og førleikamenning av lærarum og starvsfólkum | Ábyrgd: Undirvísingarstýrið og útbúgvingarstovnar – Setrið |
| **Fáa áhugabólkar við**<br>Átak: Virkið taka við áhugabólkar og røddina hjá felagsskapinum | Ábyrgd: Skúlaleiðarar, politikkarar, og áhugabólkar |

## B: Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi (6-10)

Yvirskipað fevna svarini frá hesum arbeiðsbólkunum um uppskot til broytingar til tess at styrkja karmarnar fyri einum góðum barna- og ungdómslívi. Nøkur av uppskotunum mæla arbeiðsbólkarnir til verða framdar her og nú, meðan aðrar eiga at verða framdar komandi árini. Eisini hava arbeiðsbólkarnir uppskot um, hvørjir samfelagspartar hava ábyrgd av broytingunum.

| **Her og nú** | |
|---|---|
| **Hvat skal gerast?** | **Hvør** |
| **Savnað lógarverk og samskipan** | Barna- og útbúgvingrmálaráðið (BUMR) skal savna lógarverkið um børn og ung fyri at tryggja greidleika.<br>BUMR saman við avvarðandi myndugleikum skal seta samskiparar fyri at tryggja felags átak og arbeiði. |
| **Hjálp til foreldur**<br>Foreldur skulu fáa hjálp til sína foreldraábyrgd og fyri at lætta um samstarvið millum tey og við tey. Kann verða gjørt í eitt nú stuðulsbólkum í skúla og stovnsumhvørvinum. | Skúlar og myndugleikar |
| **Spora rættstundis og stuðla**<br>Gera skipan/leggja uppgávu til stovn skjótt at eyðmerkja foreldraførleika, so stuðul og vegleiðing kann verða veitt børnum grundað á teirra tørv. | Myndugleikar og heilsustarvsfólk |
| **Fáa alt samfelagið við**<br>Fáa verandi tilfeingi og einstaklingar um børn og ung at styrkja stuðlandi netverk. | Lokalsamfelag og felagsskapir |
| **Stuðul hóast ongar diagnosur**<br>Víðka tænastur so sum "mammuhjálp" og stuðul til gerandis uppgávur uttan at tað skal krevja diagnosu hjá barninum ella tí unga. Harumframt fáa (skúla)sálarfrøðingar við | Útbúgvingarstovnar og heilsuverkið |

| Um 3-5 ár | |
|---|---|
| **Hvat skal gerast?** | **Hvør** |
| **Stovna ráð fyri børn, ung og familjur**<br>Leggja saman ymiskar geirar undir eitt aðalráð, sum savnar seg um trivnaðin hjá børnum, ungum og familjum teirra. | Myndugleikar og áhugabólkar |
| **Skipanarligar broytingar í skúlum**<br>Broyta skipan, bygnað og undirvísingarhættir í skúlum fyri at møta tørvinum hjá øllum børnum. | Skúlar og skúlamyndugleikar |
| **Styrkja samstarvið**<br>Gera eitt samskipað átak millum myndugleikar, samfelag og serfrøðingar fyri at stuðla børnum, ungum og familjum teirra | Myndugleikar, áhugafelagsskapir og samfelagið |
| **Økt tilfeingi**<br>Hægri játtan og tilfeingi til lærarar, mentorar fyri at stuðla arbeiði teirra við børnum, ungum og trivnaðinum hjá teimum | Skúlar og myndugleikar |
| **Politiskur eldhugi og broytingar**<br>Skapa politiskar bindingar og broytingar fyri at tryggja samstarv, minka um skrivstovuveldið og styrkja stuðulin til børn og ung. | Politikkarar og myndugleikar |

## C: Gransking, dátur og talgilding (11-13)

Yvirskipað fevna svarini frá hesum arbeiðsbólkunum um uppskot til broytingar til tess at styrkja karmarnar fyri einum góðum barna- og ungdómslívi. Uppskotini frá hesum arbeiðsbólkunum eru ikki raðfest eftir, nær tey eiga at verða framd. Eisini hava arbeiðsbólkarnir nøkur uppskot um, hvørjir samfelagspartar hava ábyrgd av broytingunum.

| Hvat skal gerast | Hvør skal gera tað? |
|---|---|
| **Savna verandi dátur og gransking** | Hetta varð ikki viðgjørt |
| **Gera ein vitanarpall at deila vitan** | Hetta varð ikki viðgjørt |
| **Fáa stovnar sum Landsbókasavnið og Hagstovuna við** | Avvarðandi aðalráð |
| **Kanna og eyðmerkja tørvin á gransking** | Hetta varð ikki viðgjørt |
| **Eftirmeta bygnað, stovnar o.a., og seta í verk broytingar** | (BÚMR, AMMR, HMR, FMR) |
| **Skipa stýri av ymiskum slagi at leiða serstakar undirverkætlanir til Barnaverkætlanina** | Eigararnir av Barnaverkætlanini |
| **Áhaldandi og afturvendandi eftirmeting av fyri gransking** | Hetta varð ikki viðgjørt |
| **Politisk raðfesting og stuðul til gransking** | Politiska skipanin |
| **Økt fígging til gransking** | Politiska skipanin, stovnar, privata vinnan o.o. |
| **Styrkja granskingar útbúgvingar** Menna og fremja gransking | Granskarar og granskingarumhvørvi, útbúgvingarstovnar |
| Leggja ætlanir fyri, hvussu gransking verður fingin meira við, og hvussu granskingarúrslit kunnu verða brúkt | Hetta varð ikki viðgjørt |
| Virka fyri regluligari eftirmeting og afturmelding | Allir partar |

## D: Skipað netverk og felags almenn leiðsla (14-17)

Yvirskipað fevna svarini frá hesum arbeiðsbólkunum um uppskot til broytingar til tess at styrkja karmarnar fyri einum góðum barna- og ungdómslívi. Nøkur av uppskotunum mæla arbeiðsbólkarnir til verða framd her og nú, meðan onnur eiga at verða framd komandi árini.

| **Her og nú** | |
|---|---|
| **Hvat** | |
| **Útnevna samstarvsfelagar** | Finna eitt sentralt fólk at leiða familjur ígjøgnum skipanirnar |
| **Betra um diagnostikk og viðgerðartilboð** | Tryggja rættstundis atgongd til tænastur eftir at diagnosa er sett |
| **Skipa royndarverkætlanir** | Seta í verk royndarverkætlanir, sum onnur øki kunnu læra av. |
| **Styrkja samskiftið við foreldur** | Betra samskiftið við foreldur í øllum liðum í skipanini |
| **Seta í verk aftur tað, ið riggaði** | Eyðmerkja mannagongdir og skipanir, ið fyrr hava virkað væl, so at tær kunnu verða tillagaðar og settar í verk aftur. |

| **3-5 ár** | |
|---|---|
| **Hvat** | |
| **Endurskoða leiðslubygnaðir** | Skipa leiðslubólkar at taka avgerðir tvørtur um geirar |
| **Fremja tvørgeiraligt samstarv** | Skapa ein bygnað, sum lættir um samstarvið og vitanardeilingina millum geirar og stovnar. |
| **Varðveita og seta í verk aftur væl eydnað átøk** | Tryggja og varðveita átøk, ið hava roynst væl fyrr |
| **Verja fyri politiskum broytingum** | Tryggja fígging og tilfeingi fyri at varðveita framhald í átøkum |
| **Gera neyðugar íløgur í tlifeingi og starvsfólk** | Tryggja, at nóg mikið er av miðlum og starvsfólkum til at seta í verk broytingar |

## E:  Rættstundis tøvrgeiralig og burðardygg tilboð og átøk (18-23)

Yvirskipað fevna svarini frá hesum arbeiðsbólkunum um uppskot til broytingar til tess at styrkja karmarnar fyri einum góðum barna- og ungdómslívi. Nøkur av uppskotunum mæla arbeiðsbólkarnir til verða framd her og nú, meðan onnur eiga at verða framd komandi árini. Eisini hava arbeiðsbólkarnir uppskot um, hvørjir samfelagspartar hava ábyrgd av broytingunum.

| **Her og nú** | |
|---|---|
| **Hvat** | **Hvør** |
| **Savna tænastur**<br>Skipa eina savnaða klinikk ella eind fyri at savna ymiskar tænastur undir einum taki. Endamálið er at veita betri stuðul og hjálp til familjur. | Fremjast av myndugleikum innan heilsu og sosiala vælferð |
| **Samskiparar**<br>Innføra skipan við samskiparum at leiða og seta í verk broytingar. | Hetta kann skipast sum nýggj og samskipandi eind ella eitt serstakt toymi skipað millum viðkomandi myndugleikar. |
| **Politiskur vilji**<br>Skapa og tryggja politiskan eldhuga og stuðul til broytingarnar | Tað krevst eitt felags átak frá politikkarum og teimum, ið taka avgerðir bæði lokalt og nationalt. |
| **Broytingar í mentanini í samfelagnum**<br>Skapa eina broyting í mentanini í samfelagnum til at raðfesta familjuna og vælferð yvirhøvur. | Hetta krevur felags átak frá øllum liðum og økjum í samfelagnum og embætisverkinum. |

| **3-5 ár** | |
|---|---|
| **Hvat** | **Hvør** |
| **Styrkja stovnar**<br>Styrkja verandi stovnar og lógarkarmar fyri at møta tí tørvi, sum er hjá børnum, ungum og familjum. | Viðkomandi stovnar og lógarfremjandi ráð og skipanir. |
| **Tvørgangandi eindir**<br>Skipa tvørgangandi eindir ella stovnar at veita rættstundis og munadyggar heildarveitingar. | Hetta kunnu heilsu- og sosialverk fremja í samstarvi við skúlaverkið. |
| **Politiskt samstarv**<br>Fremja breitt politiskt samstarv fyri at tryggja samanhangandi og munagóð átøk og áhaldni. | Hetta krevur eldhuga frá politiskum flokkum og viðkomandi fólkum við avgerðarrætti. |
| **Styrkt lógargrundarlag**<br>Gjøgnumganga og dagføra lógarverkið viðvíkjandi børnum, ungum og familjum. | Hetta er ein uppgáva hjá lóggevandi eindum og serkønum løgfrøðingum. |
| **Tilfeingi og normeringar**<br>Tryggja nóg nóg gott tilfeingi og bestu normeringar á stovnum og í skúla. | Hetta kann samskipast í útbúgvingarverkinum, heilsuverkinum og Fíggjarmálaráðnum. |
| **Faklig styrk og førleikamenning**<br>Seta í verk skipanir við fakligari førleikamenning fyri starvsfólk, ið hava við vælferðina hjá børnum og ungum at gera. | Undirvísingarverkið saman við viðkomandi stovnum og skipanum skal fremja hetta. |

## F: Fakligheit, barnafatan og barnarættindi (24-27)

Yvirskipað fevna svarini frá hesum arbeiðsbólkunum um uppskot til broytingar til tess at styrkja karmarnar fyri einum góðum barna- og ungdómslívi. Nøkur av uppskotunum mæla arbeiðsbólkarnir til verða framd her og nú, meðan onnur eiga at verða framd komandi árini. Eisini hava arbeiðsbólkarnir uppskot um, hvørjir samfelagspartar hava ábyrgd av broytingunum.
Aðrir geirar stuðla Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

| **Her og nú loysnir** |
|---|
| **Hvat** |
| Foreldraútbúgving og stuðul til foreldur eftir tørvi. |
| Tryggja atgongd til frítíðarítriv og musikkskúla fyri øll børn. |
| Gera eina barnalóg grundað á fakliga vitan. |
| Hert uppmerksemi um barnanna rættindi og trivnað. |
| Hert fokus á sjónarhornið hjá børnum í ymiskum samanhangum |

| **3-5 ár** |
|---|
| **Hvat** |
| Seta í verk skipan við samskiparum ella líknandi at hjálpa børnum, ungum, familjum og fakfólkum. |
| Stuðul til familjur uttan krav um skráseting og við møguleika fyri at vera dulnevnd. |
| Broytingar í skúlaskipanini við fokus á trivnaðin hjá børnum, og lata upp fyri breiðari fakligari samanseting enn nú. |
| Barnaumboðsfólk – ein virkin rødd fyri barnarættindum og rættindum í samfelagnum.<br>Økt fokus á barnarættindi og rættindi í samfelagnum sum heild, og styrkja barnanna rødd í barnagarði og skúla. |

Yvirskipað sæst, at uppskotini, teir 27 arbeiðsbólkarnir hava orðað, krevja eitt sameint og samskipað lógvatak. Eitt lógvatak tvørtur um land og kommunur, geirar, stovnar, politikkarar og samfelagið alt. Ein tilgongd grundað á djúpd, vídd og heild at tryggja trivnað og ávøkst fyri børn og ung í Føroyum.

Uppskotini vísa á tørvin á, at vit sum samfelag leggja størri dent á virði og rættindi hjá børnum og ungum, at vit fara at arbeiða meira grundað á vitan og burðardygd. Fyri at røkka hesum, mugu vit samskapa og góðskutryggja góðar karmar fyri børn og ung.

## Allir bólkar (1-27): Alt ber til - *Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum*

Síðsti spurningurin, sum allir bólkarnir skuldu arbeiða við, var breitt orðaður fyri at lata upp fyri óheftum svarum. Afturfyri peika svarini eisini ymiskar vegir. Her savnaði saman í 7 punkt. Frá tí yvirskipaða til tað undirskipaða.

Svarini fevna um alt frá politiskum ynskjum og krøvum til gerandis ynski og krøv. Men tey peika øll sama veg, sum er at tryggja góða barna- og ungdómslívið í Føroyum. Tey peika á tørvin at taka atlit til heildina í lívinum hjá børnum, ungum og familjunum. Stuðla starvsfólkum á dagstovn-, fólkaskúla- og umsorganarøkinum, umframt at tryggja samskipaðar, burðardyggar og dygdargóðar tænastur til øll børn og ung.

Nógv av tí, ið nevnt verður frá bólkunum gongur aftur fleiri ferðir. Tað prógvar, at tað er eitt felags fokus á ávísar avbjóðingar og loysnir fyri børn, ung og familjur. Her eru nøkur av hesum evnum:

1. Tiltøk við familjuni í miðdeplinum: Tað gongur aftur, at tørvur er á stuðli til familjur. Her verða nevnd uppskot sum familjuhús, lággáttartilboð, og yvirhøvur tænastur við familjuni í fokus. Hetta undirstrikar týdningin av skapa stuðlandi umhvørvi, har foreldur kunnu fáa hjálp og vegleiðing.
2. Útbúgvingarreform og dygd í skúlum: Fleiri uppskot peika á tørvin á at lækka næmingatalið, menna tvílæraraskipan og endurskoða skúlabygnaðin fyri at menna og betra læruumhvørvið og dygdina.
3. Tvørfakliga samskipan og samskapan: Fleiri uppskot peika tørvin á at samstarva tvørtur um geirar. Her verða nevnd heilsa, útbúgving, sosialar tænastur osfr. fyri at tryggja eina heildar grundaða tilgongd fyri børn og ung.
4. Atkomuligar og dygdargóðar tænastur: Her verður víst á tørvin á hjálp til børn og ung, sum kemur skjótt, hevur høga dygd og sum er javnsett um alt landið.
5. Stuðla og menna fakfólk: Nógv av uppskotunum snúgva seg um at betra um umstøðurnar og tignina hjá starvsfólkum. Tað fatar m.a. um námsfrøðingar og starvsfólk á tænastuøkjum hesum viðvíkjandi. Hetta er avgerandi fyri at tryggja høgt tænastustøði.
6. Fokus á trivnaðin hjá børnum: Eitt sterkt tema í tekstinum er at tryggja vælferðina hjá børnunum í lógum og í politikkum/politiska arbeiðinum. Hetta fevnir um viðurskifti so sum talgildan trivnað og góða sálarliga heilsu.
7. Fyribyrging og rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk: Fleiri brot frá bólkunum peika á týdningin av at fyribyrgja, at avbjóðingar koma ella vaksa seg stórar, og at tað verður gjørt tíðliga. Hetta krevur, at tað verða gjørdar fyribyrgjandi skipanir, sum rættstundis og tvørgeiraligt lofta so hvørt.

Hesi afturvendandi evni prógva eina breiða sannføring og undirstrika týdningin av, at átøk eru stuðlandi og samskipað fyri at fremja trivnaðin hjá børnum og ungum í Føroyum. Tey vísa greitt eitt sterkt ynski um, at neyðugar broytingar ganga upp á tvørs av siðbundnu geirunum og arbeiða fram ímóti einum meiri integreraðum og barnavinaligum samfelag.

# 7. Samanumtikið

Greiningin er ein roynd at finna fram til nøkur høvuðspunkt, sum ganga aftur í svarunum frá teim 250-300 fólkunum, umboðandi felagsskapir, samkomur og kirkjur, frítíðarlív, áhugabólkar, foreldur, fakfólk, vinnu, politikkarar og embætisfólk, sum luttóku á Vitanarráðstevnuni.

Tey høvuðsmál, ið eru tikin fram úr bólkaarbeiðinum, undirstrika eina sannføring og týdningin av, at vit mugu endurhugsa okkara skipanir tvørtur um land og kommunur, geirar og stovnar. Tað er eitt sterkt ynski um hetta. Og vit mugu gera tað grundað á dátur og gransking, og soleiðis styrkja vælveruna hjá børnum og ungum við atliti at heildini í lívinum hjá teimum og familjunum.

Sum tað síðsta á ráðstevnuni vórðu fólk biðin um at skriva 1-2 heilt avgerandi punkt at taka við heim frá samanskrivingini. Her er ein greið ábending – *Samstarv, samskapan, samskipan, samskipari, gransking, fyribyrging, barnarættindi, familjan osfr.*:




Skulu vit skapa sunnar, tryggar, trivnaðar- og heilsuskapandi karmar fyri børn og ung í Føroyum, er tað avgerandi skjótt at eyðmerkja, lofta og loysa tær avbjóðingar, ið eru. Hesar avbjóðingar kenna vit.

Loysnirnar eru bara møguligar við málrættaðum átøkum. Hesi málrættaðu átøk krevja djarva og nýskapandi tilgongd tvørtur um land og kommunur, tvørtur um verandi geirar og stovnar. Grundað á styrktan foreldraleiklut, barnanna rødd, inklusjón og neyðugar fíggjarligar raðfestingar á økinum og karmar til fakfólk at virka undir.

Vit kenna avbjóðingarnar, og vit hava uppskot til fakliga væl grundaðar loysnir. Hetta er tað, ið skal til, fyri at skapa eina betri framtíð hjá okkara børnum og ungu.

Tað er avgerandi, at vit fara til verka alt fyri eitt!

# Arbeiðsborð 1 - 26

**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi



# A - Arbeiðsborð 1 - Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, løggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Tað er okkara mál, at skapa trivnað, resiliens og góðar felagsskapir fyri øll børn í Føroyum. Resilienshugtakið miðsavnar seg um at menna sterk og stuðlandi umhvørvi og felagsskapir, sum fremja heilsu og trivnað í breiðastu merking hjá børnum og ungum. Dentur verður lagdur á týdningin av at skapa rættstundis tilboð og átøk og karmar fyri positivum menningarleiðum út frá samstørvum, sum skilagott og rættstundis møta tí tørvi, sum er hjá tí einstaka, familjuni og felagsskapinum.

**Avbjóðing**:
Samfelagið hevur ov nógva ferð og hevur ov nógv fokus á avrik hjá tí einstaka á øllum pallum hjá børnum og ungum. Alt fleiri børn við ymiskum avbjóðingum royna at siga okkum okkurt. Men vit hava lyndi at hyggja at einstaklinginum heldur enn at hyggja at skipanum, kørmum, praksis og felagsskapinum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- ST-sáttmálin um barnarættindi verður virdur, soleiðis at børn føla, at tey verða hoyrd og sædd
- Tilboðini til frítíðar- og ítróttaítriv skulu vera fleiri, har væl útbúgvin fólk taka ímóti
- Seta ferðina niður og skapa størri rúmd fyri djúphugsni, grundan og reflektjón í skúlaverkinum og samfelagnum sum heild
- “Ynskja vit ikki øll frá børnum til politikarar í grundini bara okkum felags loysnir bygdar á felags grundarlag við felags virðum og málum”

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tað sýnist ikki at vera ein felags hugsjón til, ið hvønn mun tað almenna skal uppsøkja og bjóða fyribyrgjandi tænastur. Vandi er fyri, at familjan ikki fær hjálp fyrr enn tørvurin er vorðin ov stórur
- Styrkja uppsøkjandi og fyribyrgjandi tilboð út frá einari heildarmynd, so øll vera møtt og hjálpt heldur enn bert tey, ið eru í einari ávísari skipan
- Stuðla og skapa yvirlit yvir sunnar felagsskapir

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:**<br>Navn: |
|---|---|
| | **ODDAFÓLK:**<br>Navn: |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Grundarlag undir, hvussu vit mennast og trívast<br>Ein góður felagsskapur skapar góðan trivnað<br>Styrktur flokslærari hevur týdning fyri trivnað, útbúgva flokslæraran til uppgávuna<br>Flokslærarin skal vera tímar inni í flokkinum hvønn dag, so verða nógvir trupulleikar loystir<br>Betri vinir er eitt átak í skúlunum, sum verður brúkt í fólkaskúlanum<br>Floksins tími<br>Styrkja felagsskapir, sum børn eru til í frítíðini, foreldur seta størri krøv til slíkar felagsskapir og tiltøk<br>Mótstøðuførið hjá børnum er týdningarmikið, hvussu styrkja vit mótstøðuførið, foreldrini hava stóran leiklut í hesum sambandi<br>Mótstøðuførið verður styrkt í einum góðum felagsskapi, har tú verður sæddur, hoyrdur og virdur<br>Útbúgvið fólk til frítíðarítriv og felagsskapir<br>Ikki taka loysnina frá børnum, men geva teimum tíð og taka sær tíð at hjálpa teimum, vit vaksnu mugu ikki leypa framav<br>Krøvini, sum nógv ung kenna á sær, mugu fáa 12, mugu ikki forsøma, hvat leggja vit denta á í skúlanum<br>Foreldur javnstilla ofta tað tvungna(skúlan, stovnin) og frítíðarítriv í dag, fyrr var skúlin var tikin framum<br>Týdningarmikið at starvsfólk fáa neyðuga vitan, í dag er ymiskt frá kommunu til kommunu<br>Tættari samstarv millum stovnar, geirar, t.d. millum barnagarð og skúla<br>Stytta bíðitíðina til at fáa hjálp, t.d. útgreining<br>Sosialar kontraktir, gera kontraktir við foreldrini um t.d. fartelefonir ella tá ið føðingardagur er í flokkinum, fara øll |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og økið *Tað góða barna- og ungdómslívið,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Internetið/sosialir miðlar, tað, sum er hent á netinum, sum so verður tikið við í skúlan, og lærarin má loysa<br>Vit hugsa í siðbundnum felagsskapum, men í dag eru nógvir felagsskapir á netinum<br>Gongur long tíð at fáa hjálp, tá børn mistrívast<br>Børn fáa ikki hjálp frá almennaverkinum, fyrr enn tey fáa diagnosu<br>Eru vit ov skjót at hugsa í diagosu? Lívið er trupult viðhvørt, týdningarmikið við mótstøðuføri<br>Kanska broyta forteljingina, so vit/tey ungu ikki halda seg vera "sjúk"<br>Týdningarmikið at føla, at tú hoyrir heima onkustaðni<br><br>Fáa tilboð til øll børn, eisini tey, sum ikki eru so sosial, borðspøl?<br>Tagnarskyldan millum stovnar kann vera ein forðing<br>Mugu tora at tosa við foreldrini um barnið, um tað er okkurt við barninum, sum má takast upp, t.d. í barnagørðum og skúlum<br>Týdningarmikið at hava regluligt samskifti við foreldrini, ikki bara tá ið onkur trupulleiki er<br>Tað er neyðugt at definera "dannilsihugtakið" í fólkaskúlanum av nýggjum |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri | <br>Uppraðfesta frítíðarfelagsskapir, gera tilboðini betri fyri at rúma øllum |

| | |
|---|---|
| at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Broyta innihaldið í fólkaskúlanum, gera tað minni bókligt og meira kreativt og handaligt<br>Nýggj tilmæli um fólkaskúlan mæla til tað omanfyri<br>Avtaka landsroynd í náttúru og tøkni<br>Kostar ov nógv at vera við í frítíðarítrivum, summar kommunur hava fríkort<br>Brúka foreldrabólkarnar, sum eru knýttir at t.d. ítróttarfelagsskapum<br>Betri samstarv millum barnagarð/frítíðarskúla og skúla<br>Stytta arbeiðsvikuna? Nógv trýst á barnafamiljum<br>Broyta aldursmarkið, nær børn kunnu fara á stovn<br>Tora at seta orð á hjúnaskilnað og hvussu tað ávirkar børnini<br>Samkomur skipa fyri t.d. familjulegum, sum er gott fyri familjuna, slík átøk hjálpa<br>Gigni kundi verið styrkt munandi, stovnurin er longu har og hevur førleikar, sum kann hjálpa familjum<br>Í Finlandi brúka tey “Icehearts”, fyrrverandi íshockey spælarar, fyrimyndir pápar eru knýttir at børnum upp til 18 ár<br>Skattafrádrátt til frítíðarítriv eins og ítrótturin<br><br>Fólkaskúlin má endurhugsast, næmsætlanirnar leggja upp til, at næmingarnir menna ymiskar førleikar, fólkaskúlalógin leggur upp til at vit skulu røkka hvørjum einstøkum næmingi, men í 4. og 6.fl verða øll “kanna” fyri tað sama(landsroyndin)<br>Fáa nógvar tilflytarar til landið, mugu ikki hugsa “tit” og “vit” |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og *Tað góða barna- og ungdómslívið*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Í nýggja álitinum um broytingar í fólkaskúlalógini eru nógv góð átkøk, sum kunnu setast í verk<br>Skipað SSP- tiltøk við serligum dent á felagsskapin<br>Skattafrádrátturin, sum ítróttarvenjarar fáa, kundi eisini verið galdandi fyri onnur frítíðarítriv, t.d. skótar<br>Lóg/mannagongd um fartelefonir/teldur í skúlanum<br>Politiska skipanin |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Foreldrini skulu hava umstøður at vera meira heima hjá barninum<br>Hava barnið í fokus, tá ið lógir verða gjørdar<br>Gera tey fyrstu árini hjá barninum so trygg sum gjørligt, geva teimum gott mótstøðuføri |

## A - Arbeiðsborð 2 - Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Tað er okkara mál, at skapa trivnað, resiliens og góðar felagsskapir fyri øll børn í Føroyum. Resilienshugtakið miðsavnar seg um at menna sterk og stuðlandi umhvørvi og felagsskapir, sum fremja heilsu og trivnað í breiðastu merking hjá børnum og ungum. Dentur verður lagdur á týdningin av at skapa rættstundis tilboð og átøk og karmar fyri positivum menningarleiðum út frá samstørvum, sum skilagott og rættstundis møta tí tørvi, sum er hjá tí einstaka, familjuni og felagsskapinum.

**Avbjóðing**:
Samfelagið hevur ov nógva ferð og hevur ov nógv fokus á avrik hjá tí einstaka á øllum pallum hjá børnum og ungum. Alt fleiri børn við ymiskum avbjóðingum royna at siga okkum okkurt. Men vit hava lyndi at hyggja at einstaklinginum heldur enn at hyggja at skipanum, kørmum, praksis og felagsskapinum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- ST-sáttmálin um barnarættindi verður virdur, soleiðis at børn føla, at tey verða hoyrd og sædd
- Tilboðini til frítíðar- og ítróttaítriv skulu vera fleiri, har væl útbúgvin fólk taka ímóti
- Seta ferðina niður og skapa størri rúmd fyri djúphugsni, grundan og reflektjón í skúlaverkinum og samfelagnum sum heild
- “Ynskja vit ikki øll frá børnum til politikarar í grundini bara okkum felags loysnir bygdar á felags grundarlag við felags virðum og málum”

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tað sýnist ikki at vera ein felags hugsjón til, ið hvønn mun tað almenna skal uppsøkja og bjóða fyribyrgjandi tænastur. Vandi er fyri, at familjan ikki fær hjálp fyrr enn tørvurin er vorðin ov stórur
- Styrkja uppsøkjandi og fyribyrgjandi tilboð út frá einari heildarmynd, so øll vera møtt og hjálpt heldur enn bert tey, ið eru í einari ávísari skipan
- Stuðla og skapa yvirlit yvir sunnar felagsskapir

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Tom Jacobsen<br>Gunnvá Debes Joensen<br>Daisy Iversen<br>Eyðna Magnussen<br>Minna við Gil<br>Vár Honnudóttir<br>Monika Mohr | Navn: Eyðdis Eidesgaard<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Jenny Lydersen |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3. | |

| |
|---|
| Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Ein yvirskipaður trupulleiki er, at ov nógv børn ikki megna lívð. Fleiri og fleiri megna ikki at koma í skúla. Fyri at hvør einstakur næmingur fær meira tíð frá lærararanum, er týdningarmikið at minka næmingatalið í flokkunum. Trivnaðarkanningin, sum nýliga er gjørd, vísir, at næmingarnir ikki eru so glaðir fyri lærugreinarnar í skúlanum, teir síggja ikki endamálið við teimum og halda tær ikki verða spennandi. Kanska er mátin vit skipa lærugreinarnar uppá, ikki er nóg áhugaverdur. Tað er tó trupult at arbeiða øðrvísi og fjølbroytt, tí námsætlanirnar stýra so nógv. First lego leage er eitt dømi um, at tað ber til at fáa næmingar, sum annars ikki trívast, at brilliera fakliga og at trívast.<br><br>Tann góði felagsskapurin hevur sera stóran týdning fyri trivnaðin hjá børnum og ungum. Tað, at trivnaður er í øllum liðum, hevur sína ávirkan, bæði næminganna millum, millum næming og lærara, foreldranna millum og millum foreldur og stovnar.<br>Tann góða relatiónin er grundleggjandi fyri trivnaðin í felagsskapinum. Lærararaskúlin og pedagogskúlin áttu í síni undirvísing at lagt størri dent á relatiónir.<br><br>Skulu vit lofta øllum børnum og ungum, mugu vit hava fjølbroytni, har tey eru, bæði á stovnum og frítíðartilboðum. Ongin hevur allar førleikarnar, sum skulu til, tí er neyðugt við tvørfakligum samstarvi. Samanumtikið skal samstarvið millum ymsu stovnarnar og frítíðartilboðini virka munandi betri enn tað ger í dag.<br><br>Ov nógvur dentur verður lagdur á børn og ung at avrika. Krøv, sum verða løgd á tey fakliga, tað at duga at traðka/leggja fram, ítróttarliga og so framvegis, eru ov høg.  Øll krøvini koma omaní frá, og frá ungum árum hava tey altíð ein roynd fyri framman, har tey skulu vísa, hvat tey duga.<br>Hóast øll læra ymist, verða tey testaði í tí sama. Kanska er tíðin komin at endurskoða hesar royndir.<br><br>**Útiumfarið**<br>Hvussu fáa vit øll foreldur við? Í skúlum er tað ofta tengt at, hvør lærarin er, um skipað verður fyri trivnaðarátøkum. Spælibólkar og First Lego Leage eru dømi um hetta. Átti kanska verið krav við spælibólkum í øllum bólkum fyri at bøtt umt trivnaðin. Tað hevur týdning at skipa so fyri, at øll kunnu verða við, eisini tey, sum av onkrari orsøk ikki eru før fyri tað. Í onkrum skúla tekur skúlin um endan, tá foreldrini ikki eru før fyri at bjóða heim. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við? | Samskiftið millum ymsu stovnarnir er ikki nóg gott. Ymsu stovnarnir mugu samskipa síni tiltøk, soleiðis at tað verður so høgligt sum gjørligt fyri foreldrini.<br><br>Nógv hava ikki vitan um, hvat ymsu geirar og stovnar gera. Ein lýsing av hvat hvør ger átti at verðið gjørd.<br>Avbjóðingar eru í, hvussu vit samskifta, flestu stovnar hava eina talgilda skipan, sum ger, at tey resursuveiku ikki eru før fyri at fylgja við. Nógv er |

| | |
|---|---|
| *(brúka uml. 15 min.)* | effektivt men ikki brúkaravinaligt. Vit fáa ikki øll við, gáttin til samskiftið er ov høg. Hvussu lofta vit teimum?<br><br>Flestu frítíðaritriv krevja ov nógv av foreldrum, bæði fíggjaliga og menniskjansliga. Tey skulu møta til dystir, kappingar og foreldraviðtalur. Kanska skuldi primera staðið (skúlin) verðið staðið, har samstarv og onnur krøv verða raðfest høgt og ikki allir felagsskapir og frítíðarítriv. Elitumentanin átti at byrja seinni enn hon ger, kanska frá 15 ára aldri. Børnini og tey ungu, sum eru úrvalsíðkarir, eru so upptikin, at tey mugu siga nei til onnur tiltøk s.t.d føðingardagar hjá floksfeløgum. Hetta gongur út yvir tann góða felagsskapin.<br><br>Hvussu kann man hjálpa teimum, sum ikki eru við í nøkrum frítíðaritrivum og ikki trívast í skúlanum. Tilflytarar eru ein bólkur, sum er í vanda fyri at verða uttanfyri. Foreldrini arbeiða so nógv, at børnini ofta ansa systkjunum. Góðar upplivingar í skúlanum tengt at, hvør er í foreldraráðum. Kanska skuldu skúlar havt ein veitslubólk, mannaður við foreldrum, sum halda tað verða stuttligt, og sum hava til uppgávu at skipa soleiðis fyri, at allir nemingar fáa góðar upplivingar.<br>Týdningarmikið, at foreldur skilja, at tey hava ábyrgd fyri felagsskapinum og ikki bert sínum egna barni.<br>Hugburðurin til tey, sum ikki megna samstarv, er nakað, arbeiðast kann við. Øll vilja sínum børnum tað besta, men øll megna ikki uppgávuna. Týdning, at skúlin og onnur bjóða seg fram at hjálpa í slíkum førum.<br><br>**Útiumfarið**<br>Tað, at námsfrøðingar og lærarar ikki eru undir somu skipan, ger samstarvið trupult.<br>Tá foreldur skulu ættleiða, verða tey send á foreldraskeið. Øll, sum verða foreldur fyri fyrstu ferð, átti at fingið eitt foreldraskeið.<br>Foreldur eru bangin fyri systeminum. Vit mugu hava øll foreldrini við.<br>Neyðugt er við upplýsing um, hvat er gott fyri barnið og felagsskapin.<br>Ein viðbrekin bólkur eru tilflytarar. Skipað átti at verðið fyri skeiðum fyri føroyingar at taka ímóti tilflytarum. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Vit hava ymsar lógir fyri ymsu økjunum. Vit skuldu havt eina lóg innan barna- og ungdómsøkið.<br>Skúlin er ikki í líka stóran mun vertur, sum hann hevur verið. Hetta krevur meira av foreldrum, har nøkur eru, sum ikki klára at fylgja við.<br>Vit mugu taka barrierur burtur, sum eru ov krevjandi fyrri summi foreldur.<br>Flokslærarar áttu at verið samskiparar og mugu skúlast til uppgávuna. SSP- og Akt-lærarar eiga at hava virknan leiklut í einum samstarvi við samskiparanar<br>Relatiónsarbeiðið á stovnum og millum stovnar skal styrkjast.<br>Tað má gerast øllum greitt, at trivnaður er ein felagsábyrgd.<br>Felags barnasýn fyri alt landið. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum** | Foreldur skulu upplýsast og loftast. |

| | |
|---|---|
| Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Tað skal skipast soleiðis fyri í skúlum og øðrum stovnum, at øll børn og ung fáa upplivingar, sum eru góðar fyri felagsskapin. |

| | |
|---|---|
| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi*** | |
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1 Flokslærarin verður samskipari<br>Endurskoða flokslærarauppgávuna<br>2 Foreldur taka felagsábyrgd av næmingabólkum og flokkum<br>Barnalóg<br>3 Skúlin má sannføra foreldrini um týdningin av tí góða felagsskapinum.<br>BUMR má smíða og dagføra lógavverkið. |
| | |
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Næmingatal í skúlaflokkum<br>Fáa til vega gransking og data<br>Fjølbroyttari læring |
| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |

# A - Arbeiðsborð 3 - Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**
Tað er okkara mál, at skapa trivnað, resiliens og góðar felagsskapir fyri øll børn í Føroyum. Resilienshugtakið miðsavnar seg um at menna sterk og stuðlandi umhvørvi og felagsskapir, sum fremja heilsu og trivnað í breiðastu merking hjá børnum og ungum. Dentur verður lagdur á týdningin av at skapa rættstundis tilboð og átøk og karmar fyri positivum menningarleiðum út frá samstørvum, sum skilagott og rættstundis møta tí tørvi, sum er hjá tí einstaka, familjuni og felagsskapinum.

**Avbjóðing**:
Samfelagið hevur ov nógva ferð og hevur ov nógv fokus á avrik hjá tí einstaka á øllum pallum hjá børnum og ungum. Alt fleiri børn við ymiskum avbjóðingum royna at siga okkum okkurt. Men vit hava lyndi at hyggja at einstaklinginum heldur enn at hyggja at skipanum, kørmum, praksis og felagsskapinum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- ST-sáttmálin um barnarættindi verður virdur, soleiðis at børn føla, at tey verða hoyrd og sædd
- Tilboðini til frítíðar- og ítróttaítriv skulu vera fleiri, har væl útbúgvin fólk taka ímóti
- Seta ferðina niður og skapa størri rúmd fyri djúphugsni, grundan og reflektjón í skúlaverkinum og samfelagnum sum heild
- "Ynskja vit ikki øll frá børnum til politikarar í grundini bara okkum felags loysnir bygdar á felags grundarlag við felags virðum og málum"

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Tað sýnist ikki at vera ein felags hugsjón til, ið hvønn mun tað almenna skal uppsøkja og bjóða fyribyrgjandi tænastur. Vandi er fyri, at familjan ikki fær hjálp fyrr enn tørvurin er vorðin ov stórur
- Styrkja uppsøkjandi og fyribyrgjandi tilboð út frá einari heildarmynd, so øll vera møtt og hjálpt heldur enn bert tey, ið eru í einari ávísari skipan
- Stuðla og skapa yvirlit yvir sunnar felagsskapir

| BÓLKALUTTAKARAR: | SKRIVARI: |
|---|---|
| Carla Mikkelsen<br>Marin Egholm Jacobsen<br>Mari Eyð Joensen<br>Malena Viðberg<br>Signa Østerø<br>Barbara Vestergaard<br>Morið Meilberg<br>Katrin á Neystabø | Navn: Edith Kruse Andreasen<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Jógvan Philbrow |

| | |
|---|---|
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |
| **Skrivispurtur #1: ØKI: Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir** | |
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | At tað er pláss fyri tí einstaka, sunnir og góðir felagskapir. Heilt frá føðing, vøggustovu, barnagarð osv.<br><br>Nógv tilboð eru til tey ungu: Fyribyrgjandi fyri trivnað. Vit skulu hava annað enn ítrott, pláss skal vera fyri øllum, spæl heldur enn kappingar.<br>Opin tilboð, frælsur ítróttur...<br>Mentan: Smærri pláss eru bara fótbóltur/hondbóltur.<br>Venjaarar: Síggja breitt, handlar ikki bara um at vinna.<br><br>Tey børnini sum mangla motivatión, føla seg ikki trygg, hetta hevði hjálpt við einum mentori.<br><br>Ungdómshús, kreativ tilboð, frítíðararbeiði o.a.<br><br>Nógv útlendsk børn, duga ikki málið.. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og økið *Gransking, dátur og talgilding,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Geva teimun góða uppliving frá heilt frá byrjan mammubólkum, Gigni..<br>Nervalag hjá barninum set inn í vøggustovualdri við trivnaði, læra hvussu viktugt rørðsla er og tann trygga relatiónin er. Um tann trygga relatiónin er góð heima millum foreldur og barna er góð. Seta inn (foreldraráðgeving) ikki barnavernd.<br><br>Tannáringar: Nervalagið broytist, hvussu kunnu tey ungu finna seg til rættis? Kappingin er hørð, lofta øllum, líkamikið. Ungdómshús t.d ein felagskapur, nógvar klikur, hvussu fær man øll við? T.d. ein mentorskipanir/stuðul. BVT bjóðar hetta m.a. til Tórshavnar kommunu, skal út til allar kommunir. Til tey børn sum ikki megna at koma í felagskapin við teirra javnaldrar.<br>Realtiónir kunnu ikki uppbyggjast, tá børn sita aftan fyri skermar. Talgilding minkar um resilens.<br>Bjóða barninum ein mentor.<br><br>Foreldraráðgeving.<br><br>Nærvernadi foreldur, ókeypis frítíðarkort, ráðgeving til foreldur meðan børn standa á bíðilista til B&U psyk (2ár) Foreldrahús fyri at hjálpa øllum stovum at hjálpa familjunum við ráðum. |

| | |
|---|---|
| | |

| Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Greiðrari mannagongdir.<br><br>Betur samstarv t.d. millum geirar. T.d. Gigni hevur yvirlevering til byrjan í vøggustovu, barnagarð og skúla.<br><br>Skermar eru ein stór avbjóðing, skermráð skulu setast í verk í skúlum. Heimini skulu við (børn sita einsamøll í kamarinum) einsamøll og mangla svøvn.<br><br>Barna- og ungdóms mentorar skulu setast í verk. Fyri at hjálpa barninum/ungum í ein góðar felagskapir.<br>Meir fleksibilitet í forleikastovuni.. (allair skúlar skulu bjóða tað sama td. Ergo...mm. |

| Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Forleikamenna hjálparfólk á stovnum.<br>Samtykki – mannagongd fyri hvussu man kann yvirlevera informatión víðari tvørtur um stovnar/geirar.. |

| Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og *Gransking, dátur og talgilding* | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1.Samskipara sum kann ráðgeva familjum. Tvørfagligt samstarv. Felags reglar í skúlum viðvíkjandi skermum.<br><br>Arbeiða við data: Fylgja upp uppá gransking. Spurnarkanningar regluliga, fyri at fáa eina mynd av hvat trupulleikin er fyri trivnaði og atferð. (Íslandska modellið)<br><br>2. Fáa eitt familjuhús. Ráðgeving - okkurt ímillum Gigna/barnavernd.<br><br>3. Ovasti mynduleiki skal gera lógina - lógarkrav |

| Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum. | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Størri álit á fagfólk -<br>Betri karmar fyri námsfrøðingar/hjálparfólk<br>Ein hurð til eitt lággottatilboð (Famlujuhús) øll skulu kunnu fáa hjálpina. |

# A - Arbeiðsborð 4 - Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Tað er okkara mál, at skapa trivnað, resiliens og góðar felagsskapir fyri øll børn í Føroyum. Resilienshugtakið miðsavnar seg um at menna sterk og stuðlandi umhvørvi og felagsskapir, sum fremja heilsu og trivnað í breiðastu merking hjá børnum og ungum. Dentur verður lagdur á týdningin av at skapa rættstundis tilboð og átøk og karmar fyri positivum menningarleiðum út frá samstørvum, sum skilagott og rættstundis møta tí tørvi, sum er hjá tí einstaka, familjuni og felagsskapinum.

**Avbjóðing**:
Samfelagið hevur ov nógva ferð og hevur ov nógv fokus á avrik hjá tí einstaka á øllum pallum hjá børnum og ungum. Alt fleiri børn við ymiskum avbjóðingum royna at siga okkum okkurt. Men vit hava lyndi at hyggja at einstaklinginum heldur enn at hyggja at skipanum, kørmum, praksis og felagsskapinum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- ST-sáttmálin um barnarættindi verður virdur, soleiðis at børn føla, at tey verða hoyrd og sædd
- Tilboðini til frítíðar- og ítróttaítriv skulu vera fleiri, har væl útbúgvin fólk taka ímóti
- Seta ferðina niður og skapa størri rúmd fyri djúphugsni, grundan og reflektjón í skúlaverkinum og samfelagnum sum heild
- “Ynskja vit ikki øll frá børnum til politikarar í grundini bara okkum felags loysnir bygdar á felags grundarlag við felags virðum og málum”

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tað sýnist ikki at vera ein felags hugsjón til, ið hvønn mun tað almenna skal uppsøkja og bjóða fyribyrgjandi tænastur. Vandi er fyri, at familjan ikki fær hjálp fyrr enn tørvurin er vorðin ov stórur
- Styrkja uppsøkjandi og fyribyrgjandi tilboð út frá einari heildarmynd, so øll vera møtt og hjálpt heldur enn bert tey, ið eru í einari ávísari skipan
- Stuðla og skapa yvirlit yvir sunnar felagsskapir

<table>
<tr><td rowspan="2">BÓLKALUTTAKARAR:</td><td>SKRIVARI:<br>Navn: Maria Michelsen</td></tr>
<tr><td>ODDAFÓLK:<br>Navn:</td></tr>
<tr><td colspan="2">Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6</td></tr>
</table>

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | **Svar uppá spurning 1 og 2:**<br>Uttan trivna í barnalívinum, hevur barnið tað ikki gott. Trivnaður er pláss fyri øllum, og ikki bara eliti-niveau, har ið ov nógv detta niður ímillum. Øll passa t.d. ikki inn í KÌ-miljøði. Skal vera pláss fyri øllum. Meira inkluderandi.<br><br>Ov nógvar hurðar hjá foreldrum at venda sær til við tærra avbjóðingum.<br><br>Torført at taka stig til eina torføra samrøðu, vit tora ov illa at siga frá. Hvat má man og hvat má man ikki. Men hetta er ofta ikki so torført sum vænta.<br><br>Nógv geva ábyrgdina frá sær.<br><br>Hjúnaskilnaður kan ávirka barnið, men barnið tilpassar seg, tó ikki um højkonflikt er eftir skilsmissuna. Seta inn her fyri at hjálpa foreldrum, sum eru í højkonflikt.<br><br>Foreldur og familja eiga at koma meira á banan og taka ábyrgd av uppæling av barninum.<br><br>Hjálpa hvørjum øðrum at koma gott ígjøgnum uppæling av børnum okkara. Hvat kunnu vit gera felags í hesum sambandi.<br><br>Geva børnunum smáðar uppgávur, ið tey megna, hetta gevur barninum følilsi av virðismetan og at tað er brúk fyri barninum.<br><br>Styrkja samskifti millum foreldur. Keldan hevur gjørt eina pjece um hvussu vit sum foreldur gera ein samskiftisbólk í ymiskum høpi.<br><br>Foreldrabólkar verða stovnaðir í fólkaskúlanum.<br><br>Gera rammirnar greiðari í ymisku felagsskapinum og/ella ymiskum bólkum/høpi hjá børnunum. Hvat má man og hvat má mann ikki. T.d. til føðingardagar, hvussu nógv geva vit í gávu.<br><br>**Fólk frá øðrum bólkum:**<br>Gera tingini konkret fyri foreldrum, gera tað simpilt, gera tað einfalt.<br><br>T.d. gera lýsingar/stuttfilmar til foreldur, hvussu og hvat skulu tey gera saman vit børninum. T.d. gera filmar, pjecer ella líknandi.<br><br>Viðhvørt torført at kommunikera við foreldrini, men ógvuliga neyðugt. Á føðideildini fáa foreldur pjece heim við um hvussu og hvat tað er at vera foreldur. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og økið *Skipað netverk og felags* | **Svar uppá spurning 1 og 2:**<br>Ov nógvar forðingar at koma ígjøgnum skipanina hjá foreldrum.<br><br>Betur samstarv ímillum geirrar og stovnar.<br><br>Hvussu fáa vit foreldrini við. Foreldur skulu vera íroknaði hesa líkningina. |

| | |
|---|---|
| *almenn leiðsla,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Tosa út í samfelagið ella marknaðaføra hvat tað er, sum foreldur skulu gera, hvussu eru vit meira saman við og um børnini. Hvussu kunnu vit gera hetta í felag. Fáa tað út til foreldrini. Gera t.d. stuttfilm.<br><br>Gera eitt átak sum líkist ABC- sálarheilsu átakinum, bara innan barnaøkið. T.d. sum 'Virkin oktober' -> ger eitthvørt saman við barninum.<br><br>**Fólk frá øðrum bólkum:**<br>Tvørgangandi avbjóingar millum stovnar, t.d. frá barnagarð í skúla. Sum nú er geva vit bara ábyrgdina víðari til næsta stovn.<br><br>Tagnarskylda: tørvur á at gera greitt, hvat er galdandi á hesum øki, reglar mangla um tað at kunna geva upplýsingar víðari.<br><br>Vigtigt at lurta eftir foreldrinum, hvat er tað tey uppliva, tey kenna barnið best og hvønn tørv barnið hevur. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Stytta arbeiðsvikuna 😉<br><br>Hvat brúka foreldur sína tíð til. Foreldur skulu fáa at vita konkret, hvussu man brúkar meira tíð saman við børnunum.<br><br>Ov nógvir samstarvspartar, ov bóvar hurðar hjá foreldrum.<br><br>Skapa felags skipanir og samstarva betur.<br><br>Góða tilgongdin sum dømi, har ein socialráðgevi er tovhaldari.<br><br>Seta tíðiga inn, skjótt og munadygt eisini.<br><br>Ov nógvir stopparir. Ov nógvar forðingar. Ábyrgd má fastleggjast.<br><br>At stovnar kunnu deila vitan um ávísar skipanir við hvønn annan, soleiðis at nýggji djúpi tallerkurin ikki skal uppfinnast hvørja fer.<br><br>**Fólk frá øðrum bólkum:**<br>Gott at ein felags barnaverkætlan verður gjørd.<br><br>Títt - samrøður við foreldur, samtykki til at geva upplýsingar víðari<br><br>Fleiri vaksin skulu vera úti í garðinum saman við børninum í skúlanum, t.d. Heilsusystur, lærari osv. Aðrar instansir inn á skúlan at eygleiða børnini, sum læranin ikki megnar. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | **Til spurning nr. 1 og 2**<br>Gera tingini konkret fyri foreldrum, gera tað simpilt, gera tað einfalt.<br><br>T.d. gera lýsingar/stuttfilmar til foreldur, hvussu og hvat skulu tey gera saman vit børninum. T.d. gera filmar, pjecer ella líknandi.<br><br>Viðhvørt torfført at kommunikera við foreldrini, men ógvuliga neyðugt. Á føðideildini fáa foreldur pjece heim við um hvussu og hvat tað er at vera foreldur.<br><br>Tvørgangandi avbjóingar millum stovnar, t.d. frá barnagarð í skúla. Sum nú er geva vit bara ábyrgdina víðari til næsta stovn.<br><br>Tagnarskylda: tørvur á at gera greitt, hvat er galdandi á hesum øki, reglar mangla um tað at kunna geva upplýsingar víðari.<br><br>Vigtigt at lurta eftir foreldrinum, hvat er tað tey uppliva, tey kenna barnið best og hvønn tørv barnið hevur.<br><br>Gott at ein felags barnaverkætlan verður gjørd.<br><br>Títt - samrøður við foreldur, samtykki til at geva upplýsingar víðari<br><br>Fleiri vaksin skulu vera úti í garðinum saman við børninum í skúlanum, t.d. Heilsusystur, lærari osv. Aðrar instansir inn á skúlan at eygleiða børnini, sum læranin ikki megnar. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og *Skipað netverk og felags almenn leiðsla*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | **Til spurning nr. 1, 2 og 3**<br>Kunning, filmar, pjecer til foreldur.<br><br>Mangla føroysk tøl. FO líkjist ikki DK ella íslandi. T.d hvs nógv børn hava serligan tørv. Gransking manglar eisini. Kanningar verða gjørdar, men eingin samskipan, manglar at samla tølini og gransking eitt stað, t.d. hjá hagstovuni ella setrinium.<br><br>Endurskoðan av teimum skipanum, ið verða settar í verk. Riggar hetta sum vit hava sett í verk. Skulu broytingar gerast.<br><br>Fokus á tey góðu tingini, tora at deila og tora at spyrja. Fortelja tey góðu tingini eisini.<br><br>Hava samstarvsbólkar í t.d. einum flokki í fólkaskúlanum.<br><br>Eisini tora at hoyra um tað sum ikki gongur væl.<br><br>Hvat riggar og hvussu styrkja vit tað. |

| | |
|---|---|
| | Kunning til foreldur. Hvussu fáa vit tað besta úr foreldrarolluni.<br><br>Hava samrøður við foreldur. Vegleiðing til komandi foreldur um hvussu man er foreldur.<br><br>Lóggáva skal til.<br><br>Setrið kundi útbúgvi fleiri fólk.<br><br>Starvsfólk skulu hava betur løn. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Hægri játtan til øll barnaøkir.<br><br>Víðka telefonlinja til børn og foreldur<br><br>Ein socialráðgevi til hvørt barnið, sum hevur eitt mál á onkrum stovni.<br><br>Betur samstarv ímillum geirrar og stovnar.<br><br>Veita foreldrum hjálp í foreldrarolluni<br><br>Átøk sum styrkja samskifti millum foreldur.<br><br>Gera lýsingar/stuttfilmar til foreldur, hvussu og hvat skulu tey gera saman vit børninum. T.d. gera filmar, pjecer ella líknandi.<br><br>Gera eitt átak sum líkist ABC- sálarheilsu átakinum, bara innan barnaøkið. T.d. sum ‘Virkin oktober’ -> ger eitthvørt saman við barninum. |

# A - Arbeiðsborð 5a - Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Tað er okkara mál, at skapa trivnað, resiliens og góðar felagsskapir fyri øll børn í Føroyum. Resilienshugtakið miðsavnar seg um at menna sterk og stuðlandi umhvørvi og felagsskapir, sum fremja heilsu og trivnað í breiðastu merking hjá børnum og ungum. Dentur verður lagdur á týdningin av at skapa rættstundis tilboð og átøk og karmar fyri positivum menningarleiðum út frá samstørvum, sum skilagott og rættstundis møta tí tørvi, sum er hjá tí einstaka, familjuni og felagsskapinum.

**Avbjóðing**:
Samfelagið hevur ov nógva ferð og hevur ov nógv fokus á avrik hjá tí einstaka á øllum pallum hjá børnum og ungum. Alt fleiri børn við ymiskum avbjóðingum royna at siga okkum okkurt. Men vit hava lyndi at hyggja at einstaklinginum heldur enn at hyggja at skipanum, kørmum, praksis og felagsskapinum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- ST-sáttmálin um barnarættindi verður virdur, soleiðis at børn føla, at tey verða hoyrd og sædd
- Tilboðini til frítíðar- og ítróttaítriv skulu vera fleiri, har væl útbúgvin fólk taka ímóti
- Seta ferðina niður og skapa størri rúmd fyri djúphugsni, grundan og reflektjón í skúlaverkinum og samfelagnum sum heild
- “Ynskja vit ikki øll frá børnum til politikarar í grundini bara okkum felags loysnir bygdar á felags grundarlag við felags virðum og málum”

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tað sýnist ikki at vera ein felags hugsjón til, ið hvønn mun tað almenna skal uppsøkja og bjóða fyribyrgjandi tænastur. Vandi er fyri, at familjan ikki fær hjálp fyrr enn tørvurin er vorðin ov stórur
- Styrkja uppsøkjandi og fyribyrgjandi tilboð út frá einari heildarmynd, so øll vera møtt og hjálpt heldur enn bert tey, ið eru í einari ávísari skipan
- Stuðla og skapa yvirlit yvir sunnar felagsskapir

<table>
<tr><td rowspan="2">BÓLKALUTTAKARAR:<br>Drós Sveinsdóttir SSP Løgmannabreyt<br>Natasha Johansen, Smílikullan<br>Vága Kommuna<br>Margareth Kjelnæs, Virkishúsið við Ánna, Vága kommuna<br>Tordis Dam Joensen, Alvalon, Sørvágskommuna,<br>David Im, Útlendingastovna<br>Beinta Gregersen, Húsið, Klaksvíkar kommuna<br>Karin Kirke Petersen, FÍF</td><td>SKRIVARI:<br>Navn: Tonja Sonhardsdóttir</td></tr>
<tr><td>ODDAFÓLK:<br>Navn: Ingi Hansen</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| **Maud F. Joensen, BVT í Suðuroy**<br>**Eyðvør Thomsen, BVT í Suðuroy**<br><br>**Vitjandi:**<br>**Leila í Løvu, Dygdartoymi dagstovnaøkið í Vága kommunu**<br>**Fríða í Giljum, Dygdartoymi dagstovnaøkið í Vág kommunu**<br>**John Sigurd Lesandi**<br>**Sólva Manai, Margarinfabrikkin, Tórshavnar kommuna**<br>**Petrina Nolsøe, barnaverndarstovnar AV**<br>**Malena S. Viðbjørg, Húsið, Klaksvíkar kommuna**<br>**Signa Østerø Húsið, Klaksvíkar kommuna**<br>**Lilja Petersen, sálarfr. Sernám** | |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Ynski um at vit bróta niður siloir. Hugsa meira heildarfokusera yvirskipað<br>Trupult at fáa alt í ein pott<br>Balansera millum at behalda trúvirði fyri børnum/ungum og at tosa um børn/ung, tá tey ikki eru til staðar. sjálvandi skulu stovnar fráboða.<br>Virkishús sær ikki at tey skulu samsskifta við yvirskipað ráð o.a,, men meira samstarv við onnur ungdómshús. Hvat rørir seg í økunum. Samstarv við respekt fyri lívinum hjá tí unga.<br>SSP samstarv tosar um rák, man tosar ikki um ávís børn/ung. Man hevur eitt høvi at tosa saman.<br>Konstruktivur kritikkur er góður og neyðugt millum samstarvspartar<br>Vigtigt at ymiskir partar møtast og tosa saman, eisini tvørtur um starvsmørk.<br>Hvussu fáa vit børn at trívast. Hvussu skapa vit góðar felagsskapir. Hvat skal til fyri at trívast. Hetta eru vit felags um og kunnu tosa um.<br>Tosar meira við børn/ung enn um tey.<br>Vitanardeila við umsorgan fyri barninum/tí unga.<br>Tosa meira saman um vitanargrundarlagið.<br>Føroyingar eru oftani forsiktig at byrja við. Seta orða á, hvat skal til fyri at børn og ung trívast. Geva teimum góðar upplivingar, hoyra tey, tryggja góðar og sunnar felagsskapir og ymiskar felagsskapir.<br>Læra børnini at vera inkluderandi, longu frá vøggustovu av.<br>Skapa góðar kenslur hjá børnunum. Brúk fyri øllum og øllum typum. Ymiskt hvat er styrkin hjá tí einstaka og, hvat tey ymisku kunnu bjóða inn við, men felagsskapurin hevur tørv á øllum. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** | Nógvar og góðar lógir, men vit fáa ikki samantvinna tær og arbeiðið |

<table>
<tr>
<td>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir og økið Skipað netverk og felags almen leiðsla, ið vit eiga at arbeiða víðari við.<br>(brúka uml. 15 min.)</td>
<td>Hugsa um trivnað og inklusión og, hvussu hjálpa vit børnum, sum t.d. ikki tosa/skilja føroyskt. Skilja og inkludera at vit eru øðrvísi.<br>At vit eru øðrvís er ein ressourca.<br>Inklusión og at góðtaka at vit eru øðrvísi, krevur ressoursur frá arbeiðsfólkunum. Vit mugu tosa um, hvussu vit kunnu loysa trupulleikarnar og at fáa ressourcirnar, sum skulu til, soleiðis at vit fáa gjørt okkara arbeiði betur/gott.<br>Netverka við aðrar stovnar/samstarvspartar.<br>Ofta vit vita, hvat skal til, ella hvat er tað rætta at gera, men trupult at finna tíðina til at gera neyðuga arbeiðið.<br>Manglandi ressourcir. Manglandi fakligheit.<br>hví eru tað so nógv sum ikki trívast. er tað nakað við, hvussu samfelagið er skrúva saman. Børn/ung eru stressaði. Meira fokus á trivnað og at hava tíð.<br>Eisini trupult at vera foreldur og uppala børnini til nútíðarsamfelagið.<br>Hvussu kunnu vit lætta um atgongdina til hjálp. Ov nógvar hurðar. Hvussu kunnu vit vera meira fleksibul.<br>Stovnar skifta ov ofta navn. Trupult at halda stýr á, hvat er hvat, eisini fyri fakfólkini.<br>Ein avbjóðing er eisini at handla uppá, tað sum arbeiðsbólkar o.a. koma fram til. Vit fáa eina vita, men vit broyta ikki nógv. Tosaðu um, hvussu Ísland gjørdi.<br>Tosað var um, at tað er trupult fyri summi foreldur at seta mørk fytri sínum børnum.<br>Hava lyklafólk, sum eru týdningarmikil á arbeiðsplássunum, men tá tey skifta størv, eru vit ikki røsk, at koyra uppgávurnar víðari, og hetta kann hava við sær, at arbeiði niður fyri.<br>Relatiónsarbeiði tekur tíð.<br>Ráðgeving og vegleiðing er eitt tilboð, men oftani eru tað “fleiri hendur” ið arbeiðsplássini hava brúk fyri.<br>Børnini hava rættindir og tað eru vit felags um at royna at halda, og hetta kann vera eitt gott felagn útgangsstøðið.<br>Afturlatingartíðir í virkishúsinum vóru diskuteraðar. Hvør hevur ábyrgdina - Foreldur at fáa børnini heim- Stovnur at áseta afturlatingartíð.<br>Neyðugt at hjálpa foreldrum, ið ikki megna at seta mørk fyri sínum børnum.<br>uppskot var nevnt at allar kommunur burdu havt ein barna-og ungdómspolitikk. Eisini integratiónspolitikk.<br>Vigtigt at fáa meira fokus á ungdómshúsini í Føroyum. Margarinfabrikkin gott samstarv við eitt nú BVT.<br>Ymiskt hvar í Føroyum man er, hvørji tilboð/tiltøk eru. Vigtigt við góðum tilboðum til børn og ung.<br>Samstarv og samskifti millum stovnar er vigtigt.</td>
</tr>
</table>

<table>
<tr><th colspan="2">Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum</th></tr>
<tr>
<td>3) - Orðingar<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>(brúkið uml. 20 min.)</td>
<td>Tað er brúk fyri betri normeringum og fleiri hendrum<br>Vigtigt at fáa foreldrini meira uppá banan<br>Gerast tilvitað um, hvat tað er fyri tilboð, ið vit vilja bjóða<br>Fáa foreldur meira út út skúlanum. Foreldur eru komin í og so langt inn í skúlan/undirvísing. Góðar reglur um, hvør eigur hvat økið. Hvat er uppgávna hjá læraranum og hjá foreldrunum.<br>Neyðugt at partanir eru týðiligir, so vit eru meira klar yvir, tað sum vit møta í samfelagnum.</td>
</tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | Finna eina balansu millum at foreldur og starvsfólk gera síni ting. Vit mangla balansu/reglur fyri sosialar miðlar.<br>Tilknýti til gransking, vitan, politikkir vísa til, hví vit gera sum vit gera. Áldursmørk fyri sosialum miðlum. Áldursmark fyri filmum. Áldursmark at koyra skutara.<br>Ungdómur, sum altíð hevur búð í Føroyum, duga ikki nóg væl føroyskt.<br>Upplýsing, hví eru neyðugt t.d. at halda áldursmark. Hvat ger tað við børn, at síggja okkurt, ið tey ikki eru búgvin til. Kunning og upplýsing, men tað er ikki nokk. Hetta hava vit gjørt leingi, men tað virkar ikki sum um tað er nokk ella nóg gott. Tað broytir ov lítið.<br>Hvat kann man gera, soleiðis at vit fáa eina broyting, sum vit ynskja.<br>Summi trúgva uppá forboð, onnur trúgva ikki uppá forboð.<br>Neyðugt at tosa við børnini/tey ungu um tað sum tey gera og hvar tey ferðast.<br>Foreldur eru eisini nógv á sosialum miðlum.<br>Hvat skal til fyri at broyting kann fara fram: tosa meira nágreiniliga um, hvat er tað at trívast. Tosa við børnini/tey ungu. Semjast um ymiskar politikkir, sum eru væl tosaðir ígjøgnum. Hvussu røkka vit foreldrunum, sum t.d. ikki møta á foreldarfundum o.a. Nevnt var hvussu Ísland gjørdi. Diskussión rundan um borðið, um hetta er ein gongd leið. Fólk vóru fyri og ímóti.<br>Royna at fáa fleiri foreldur í "miðmassasn". Fáa normin sterkari, so fleiri og meira orka verður at hjálpa foreldrum, ið hava tað trupult.<br>Neyðugt við pengum fyri at fáa tingini broytt og neyðugt at vera. uppmerksom uppá, hvussu vit skipa okkum.<br>Betri samstarv millum land og kommunu.<br>Børn/ung við í arbeiðinum viðv. teimum sjálvum.<br>Styrkja foreldraleiklutin. Diskussión um, hvussu og hvør skal gera tað.<br>Starvsfólk á dagstovnum og skúlum ? Gigni ?<br>Starvsfólkini á dagstovnum og skúlunum hava sambandi við øll børn.<br>Fyribyrging fram um viðgerð. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Ymiskt hvussu verður arbeitt frá øki til øki. Stórur munur á og stórur munur á tilboðunum. Neyðugt at hava meira eins tilboð og arbeiðsháttir.<br>BVT eru ymiskar og ymiskt hvussu tær arbeiða og meta, nær talan er um BVmál.<br>Munur á støddunum á økunum.<br>Neyðugt at seta tíðiliga inn. Lofta barninum/familjuni beinanvegin. Ofta vita fakfólk tíðiliga í lívinum hjá einum barni, um tað verður neyðugt við tiltøkum/hjálp.<br>Finna loysnir. Hvat er barnafatan. Ymiskar barnafatanir.  Okkurt prat í øðrum bólkum var eitt sindur forvirrandi. Ymiskt hvar man var í processini.<br>Hvussu kunnu vit brúka hvønn annan og, hvussu kunnu vit stóla uppá hvønn annan.<br>Felags mál og mið.<br>Faklig virðing<br>Ymiskar fatanir av nær ein kann venda sær til BVT.<br>Hví sleppir Gigni familjunum, tá barnið er 18 mðr. ?<br>Tilboð frá almennum stovnum má var nøkurlunda eins um alt landið.<br>Neyðugt at man eisini tillagar seg økinum ein starvast í. |

| | |
|---|---|
| | |

| Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir* og *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>2. Komandi 3-5 árini<br>3. Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Her og nú:<br>Geva/krevja at foreldur taka ábyrgdina aftur. Geva børnum/ungum ábyrgdina fyri t.d. egnari menning, s.s. skúlating o.a. Rætta hondina út til samstarvspartar. Biðja um hjálp uppá tvørs av fakbólkum, soleiðis at barnið/familjan fær neyðugu hjálpina. Tungt system at koma framát at tosa við røttu fólkini. For langur vegur. Neyðuga ressourcinar til at gera arbeiði, sum skal gerast, mangla. Viðførir at trupulleikarnir vaksa seg ov stórar.<br>Neyðugt at førleikamenna starvsfólkini, sum eru um børnini í dagligdegnum. Tað eru tey, ið fáa eyga á trupulleikar/mistrivnað fyrst.<br>Hugsa um at kanna foreldranetverk og aðrar skipanir. Hvussu kunnu vit styrkja um hetta, soleiðis at vit kunnu skapa uppmerksemi uppá hetta.<br>Avbjóðingin er at fáa t.d. barna-og ungdómspolitikkin at vera livandi og í brúk dagligt.<br>Barnafatanin í sentrum og tryggja at leiðarar í økunum hittast.<br>Neyðugt at myndugleikarnir koma á banan fyrst við broytingum.<br>Komandi 3-5 árini:<br>Land og kommunur skulu hava ein Barna-og ungdómspolitikk.<br>Mininum minst grundkrøv til eins tilboð runt landið til børn og ung.<br>Talið á nemingum í flokkunum setast niður. Granskingarbaseraðar ásetingar.<br>Neyðugt at hava fokus á barninum. í tí lítla samfelagnum, kann vera torført at hjálpa familjum og tosa um trupulleikar, men vigtigt at hava fokus á hjálp til barnið.<br>Hvør skal fremja hesar broytingar:<br>Politikkara, leiðslur, starvsfólk. Neyðugt at hava starvsfólkini "á gólvinum" við. |

| Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum. | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Dupultlæraraskipan upp til 4. flokk og færri næmingar í flokkunum.<br>Spennandi og øðrvísi frítíðarítriv til børn og ung.<br>At man torir at blanda seg, um man sær eitt barn, ið ikki trívist. At man tekur ábyrgd fyri børnunum í nærumhvørvinum, og ikki bara sínum egnu.<br>Ongar bíðilistar á psyk B&U. |

# B - Arbeiðsborð 6 - Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Tað er tí avgerandi, at tað er eitt samstarv um hesa ábyrgd tvørtur um familjur, skúlar, almennar stovnar, frítíðarvirksemi - alt samfelagið. Tað krevur felags átøk, felags lógarverk og sosialar kontraktir

**Avbjóðing**:
Hóast bæði nógv er tosað og skrivað í álitum um vantandi samskipan, arbeiða geirar og stovnar enn nógv í sjálvdrátti og oftast bara á sínum øki. Forðingin er onkuntíð trong lóggáva og trong fígging. Í hesum skipanum verður heimurin ikki sæddur úr sjónarhorninum hjá barninum, tí unga ella foreldrunum. Tí kann tað enda við mótstøðu og misskiljingum heldur enn samanhaldi fram ímóti felags málum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Seta felags karmar og skapa konsensus, so at foreldur ikki standa einsamøll við ábyrgdini fyri at skapa góðar karmar fyri síni børn
- Tað er ofta ov long frástøða millum borgara og myndugleika. Talan eigur at vera um eina samanrenning millum allar partar fram ímóti einum felags máli
- Skulu gera eina yvirskipaða lóg tvørtur um allar verandi lógir á ymisku økjunum, sum hava við børn og ung at gera tvørtur um geirar, land og kommunur

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Taka børn og foreldur meira við og geva teimum virknan lut í samstarvinum
- Børn, ung og familjur teirra, ið hava samansettar og torgreiddar avbjóðingar, eiga at fáa samskipað hjálp, so at talan verður um samstarv heldur enn tey mugu brúka orkuna upp á skipanir
- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Gunvá Staksberg, Autismufelagnum<br>Bárður Atlason Ísheim, Megd<br>Rósa Samuelsen<br>John Sigurd Hammer, Sinnisbata | Navn:<br>Elsbet E. Magnussen<br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn:<br>Jákup Eli Olsen |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi | |
|---|---|
| 1 )<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Lógarverk tvørtur um geirar og mørk sum tryggjar vitanardeiling og samstarv. Tað má verða ein toghaldari – ein hurð, tó ansa eftir at tað ikki er persónstengt.<br><br>Skipanin má tryggja bæði foreldur og børn.<br><br><br>Prát:<br>Lítið lógarverk, tó ikki nokk við formalitetum, men umráðandi við orku til feløgini so tey hava orku at luttaka - sosiala kontraktini. Umráðandi at røkka borgarum.  Meira játtan men eisini skipan fyri hvussu man inndregur feløg.<br>Autismufl: Fl ikki send til hoyring, tað er umráðandi. Virka eftir eini kunngerð (grein 7 kunngerð um serflokkar og serundirvísing) greinin er strikað. Tá broytingar eru, so er umráðandi at eftirhyggja avleiðingar. Eisini børn sum ikki hava sertørv sum ikki trívast.<br><br><br>Diagnosustýrd. Mugu hava diagnosu fyri at fáa hjálp. Fáa børn diagnosu fyri at hjálp? Børn verða hildin niðri tí tað ikki er um fyri teimum<br><br>Børn koma út sum ikki hava staðið royndirnar, við prógvum sum eru sera lítið verd.<br><br>Tosa um fyribyrging á serøkinum, ikki bíða til skaðin er hendur.<br><br><br>Góða tilgongdin riggar ikki. Royndartilgongdin riggaði, men nú riggar tilgongdin ikki. Størsta avbjóðingin er at hon var ikki lógarfest. Óformell semja. Stutt skygdar loysnir rigga ikki.<br><br>Samstarv haltar og tað er tað sum skal til. Vit duga at finna feilir hjá øðrum, men noyðast at hyggja inn.<br><br>Samstarv: noyðast at vita hvat vit samstarva um og hvat endamálið er. Diagnosur í folkaskúlanum opna hurðina fyri fígging og fyri hjálp.<br><br>Umhvørvi definerar um vit hava eitt brek, um karmarnir eru breiðir so fækkast brekini.<br><br>Ræturin hjá foreldrunum er eisini viðkomandi og um foreldrini loyva tí, so ber til at lata upplýsingar ímillum (GDPR).<br><br>Fráboðanarskylda. Kunnu vit tiga? Og eisini tvørtur um mørk?<br><br>Foreldur hava tørv á heimaráðgeving (lággáttartilboð) - ymiskt frá soylu til soylu.<br><br>Lógarverk kunnu verða ein forðing og gera gáttirnar høgar. Systemini kunnu gera forðingar fyri effektivitet og rakstur.<br><br>Kenna øll gáttirnar? |

| | |
|---|---|
| | Inkludera øll í høllini, men ofta eru tey ikki yvirhøvur í høllini.<br><br>Ber til at gera breiðari ítróttartilboð? Uttanlanda eru ítróttartilboð fyri ymiskar bólkar við ymsum brekum.<br><br>Børnini skifta frá barngarð til skúla og man kennir ikki børnini. Kunning fylgir ikki við.<br><br>Krøv til innrætting (dagstovnar og skúlar) kundi verið ein máti at hugsa inklutión í mun til sálarlig og fysisk brek, o.a.. Inniluft, wc viðurskifti, rúm til at trekkja seg osv.<br><br>Diagnosan má ikki definera tín samleika. Rættindi eigur at innkludera rættin til at strika tína diagnosu, so at diagnosan ikki fylgir tær alt lívið. Tù kanst gerast frískur og tá skal diagnosan kunna strikast.<br><br>Samstundis skal viðurkennast at brek ikki blíva burtur. Serliga í mun til at søkja um stuðul. Tá skal tað verða og mikið at søkja um stuðul einaferð.<br><br>Umráðandi at ein diagnosa ikki definerar eitt menniskja. Tann sum sá næmingin og evt setti diagnosuna kann hava sæð eina løtumynd sum ikki er aktuell nøkur ár seinni. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og økið *Tað góða barna- og ungdómslívið,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Eru øll tilvitaðu um tað sosialu kontraktina? Hava vit eina felags fatan av avbjóðingunum og loysnum.<br><br>Fólkaskúlalógin sum ásetur hjálp til tann við serligum tørvi, verður ikki fylgd. Umráðandi at lógin verður fylgd og umstøðurnar verða fylgdar.<br>Í summum førum gerast myndugleikarnir blindir fyri trupulleikanum. Fyri ein lærara eru eisini ov nógvar hurðar og lærarin verður kastibløka millum stovnar.<br><br>Ressurssur mangla. Ov fáar lógir sum tryggja rættin hjá barninum.<br><br>Hvør hevur skyldurnar? Mangla at definera skyldir og lógir eisini í mun til bygging.<br><br>Løgtingið eigur at eftirmeta lógir og er myndugleikin sum kann tillaga lógina.<br><br>**Útiumfar:** |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri | Strika diagnosur, men hyggja at tørvi. Tó verða tilvitaður um at ávísar diagnosur krevja ávísa hjálp. |

| | |
|---|---|
| at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Hava eitt rættindaskjal. Definera hvat vit skulu arbeiða fyri. Definera tað felags málið og skapa samstarv ímillum geirarnar.<br><br>Definera rættindi og skyldur við ítøkiligum orðingum, so tað ikki verða tómir flosklar. Altavgerandi at hava brúkarabólkarnar við, so at øll verða hoyrd.<br><br>Vitanardeiling um barnið. Handa stafettina víðari. Kervi+<br><br>Umráðandi at hava barnið/tann unga fyri eyga.<br><br>Semjurnar mugu lógarfestast. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Samansjóva lógarverk. Frá einum barnasjónarmiðið, hvørjar lógir eru galdandi fyri barnið? Tað eru nógvar lógir, men hvørjar eru viðkomandi.<br><br>Lat okkum samlað sum land gera eina góða skipan sum røkkur langt.<br><br>Gransking? Ongin sosialgransking í FO. Seta inn í granksing. Trupult at samla data tí skipanir tosa ikki saman. Sera lítið granskað sosialsøgu og pyskologisøgu í FO. Kanska er tað partvíst grundað á at tað er eymt og forholdsvís fekst.<br><br>Tað verður granskað í læruúrtøku og undirvísingarhátti heldur enn at granska í einstaklinginum. Tað eru mangan ov fáar ressursur til endamálið. Bæði starvsfólk og fígging.<br><br>Flokslærarin kundi verið ein koordiantor (ísl modelli). EIn máti er at útbúgva lærarar til endamálið og síðani at normera flokslæraran partvíst til koordinator. Evt kann flokslærarin peika á ein annan (co-teaching?). Skúlaleiðslan eigur at fylgja upp uppá um lærarar fylgja við næmingunum og um næmingarnar verða loftaðir. Evt. Kundi ein frá frítíðaraktivitetum verið ein koordinator. Kundi sami koordinator fylgt barninum øll árini. Evt. kann heilsufrøðingurin verða koordinator. Hesi fakfólkini mugu tó ikki drukna í uppgávuni, men normeringin má broytast tilsvarandi. Heimild at tosa um barnið millum fakfólk má fáast í lag, tvørtur um skottirnar sum eru ímillum geirarnar.<br>Diagnosan letur ikki altíð upp fyri møguleikum.<br>Hví skal man verða so bundin at eini lóggávu sum kanska ikki riggar? Og um barnið ikki megnar felagsskapin, skal felagsskapurin so kortini tvingast yvir barnið?<br>Umráðandi at síggja avbjóðingarnar, meðan vit viðurkenna at 90% av børnunum trívast í verandi skipan og tí eru neyðugt at hjálpa børnum sum ikki megna skipanina, men møguliga ikki neyðugt at tillaga alla skipanina, tó heldur tillaga til einstaka barnið.<br><br>Umráðandi at møta stutttíðar tørvinum fyri at fyribyrgja langtíðar tørvinum. |

| | |
|---|---|
| | Hvussu skipar man ringin av fólki sum loftar barninum? Ad hoc skipan runt um barnið har ein eigur uppgávuna at skipa virksemi og at halda í endanum. Tað má verða rúm fyri at tað ikki altíð er sami persónur, tí tað kann verða ymiskir tørvur frá familju til familju. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og *Tað góða barna- og ungdómslívið*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Hyggja at núverandi støðuni fyri at fáa eina heildarmynd. BUMR má samansjóva lógarverkið so at tað gerst greitt hvørjar lógir umhandla barnið. Heimildir mugu fylgja barninum so at geirarnir kunnu vitanardeila tvørtur um mørk. Koordinatorar skulu setast. Barnið og familjan skulu inndragast so nógv sum gjørligt. Styrkja feløgini og fakfeløgini sum umboða økið, so ella so fyri at tey kunnu inndragast.<br>2. Fólk sum longu eru rundan um barnið, skulu skúlast fyri at átaka sær koordinator uppgávuna og normeringin skal broytast tilsvarandi. Raðfesta gransking á økinum við øllum bólkum, so at allar avbjóðingar verða sæddar og møttar. Skúlin skal gerast rúmligari ,so hann rúmar øllum børnum, og telur støði í barninum. Lógarverkið skal tillagast tilsvarandi (t.d. landsroyndir, námsætlanir og tíma og lærugreinabýtið).<br>3. Lands- og kommunalir myndugleikar. Umráðandi at børnini og familjur teirra verða tikin við uppá ráð. Altavgerandi at hava langtíðarætlanir so at broytingarnar verða framdar og íverksettar. |
| | |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | |

# B - Arbeiðsborð 7 - Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

C. Gransking, dátur og talgilding

D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla

E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**

Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Tað er tí avgerandi, at tað er eitt samstarv um hesa ábyrgd tvørtur um familjur, skúlar, almennar stovnar, frítíðarvirksemi - alt samfelagið. Tað krevur felags átøk, felags lógarverk og sosialar kontraktir

**Avbjóðing**:

Hóast bæði nógv er tosað og skrivað í álitum um vantandi samskipan, arbeiða geirar og stovnar enn nógv í sjálvdrátti og oftast bara á sínum øki. Forðingin er onkuntíð trong lóggáva og trong fígging. Í hesum skipanum verður heimurin ikki sæddur úr sjónarhorninum hjá barninum, tí unga ella foreldrunum. Tí kann tað enda við mótstøðu og misskiljingum heldur enn samanhaldi fram ímóti felags málum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Seta felags karmar og skapa konsensus, so at foreldur ikki standa einsamøll við ábyrgdini fyri at skapa góðar karmar fyri síni børn
- Tað er ofta ov long frástøða millum borgara og myndugleika. Talan eigur at vera um eina samanrenning millum allar partar fram ímóti einum felags máli
- Skulu gera eina yvirskipaða lóg tvørtur um allar verandi lógir á ymisku økjunum, sum hava við børn og ung at gera tvørtur um geirar, land og kommunur

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Taka børn og foreldur meira við og geva teimum virknan lut í samstarvinum
- Børn, ung og familjur teirra, ið hava samansettar og torgreiddar avbjóðingar, eiga at fáa samskipað hjálp, so at talan verður um samstarv heldur enn tey mugu brúka orkuna upp á skipanir
- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur

| **BÓLKALUTTAKARAR:**<br>Nella Festurstein, Eva Klein, Julianna, Løgfrøðiligur ráðgevi frá Megd. | **SKRIVARI:**<br>Navn:<br>Jónhild Abrahamsen<br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn:<br>Egil á Bø |
|---|---|

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi | |
|---|---|
| 1 )<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | • Menniskjur eru heil menniskjur – paraplyin skal eisini vera ein heild.<br>• Fokusi skal vera á barni/tann ungi /familjan og ikki á hvørja silo tey hoyra til.<br>• Vit eru bundin at altjóða sáttmálum - vit mugu ikki lóggeva so vit eru í stríð við tað. Barnsins tørvur skal vera yvirskipaða málið<br>• Børn við umsorganarsvikið eru tey mest útsettu, Í løtuni hava vit 29 børn sum eru sett heiman, og sum búgva á stovnum hjá AV.<br>• Fyribyrgirgingin skal hava størri fokus. Avbjóðingarnar skulu fangast áðrenn tær vaksa seg so stórar og blíva so truplar at avhjálpa.<br>• Tað skal vera lættari at hjálpa einum barni! Vit skulu ikki bíða eftir at barnið fær eina diagnosu.<br>• Eru vit nóg dugnalig til at finna tey børnini sum hava avbjóðingar? Ella finnað vit tey, og eru ov sein at seta inn?<br>• Kanska eru vit ov dugnalig til at kompensera fyri avbjóðingunum á dagstovnum og skúlum? Tað kan vera tað sum ger, at vit á pappírinum ikki hava spora tey nóg tíðliga.<br>• Eitt konkret ynski um at gera eina lóggávu fyri frískúla og ungdómsarbeiðið. Í løtuni er tað dagstovnalógin sum er galdandi fyri hetta økið.<br>• Geiraábyrgd skapar mismun – ikki nóg stórur fleksibilitetur í lóggávuni.<br>• Lóggávan er prega av kann og skal. Nógv av lóggávuni hjá kommununum er skal og nógv av lóggávuni hjá AV er kann – hettar merkir, at nógv skal á bíðilista, tí tað ikki er peningur til at seta í verk.<br>• Tað er munur á, hvar ert tú í landinum - hvørja service tú fært.<br>• Tann sosiala kontraktin hevur eisini stóran týdning - hvussu tryggjar man, at samstarvsavtalurnar eru greiðar? |
| 2)<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og økið *Skipað netverk og felags almenn leiðsla,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | • Um man skal gera eina munandi broyting, skal fokus vera meira á barnarættindi. Í lóggávuhøði skulu barnarættindi vigast sum fyrsta raðfesting,, og skulu trumfa yvir allar aðrar lóggávur.<br>• Kanska mangla tað ikki pengar í skipanini, men raðfestingin er skeiv.<br>•<br>• Høvdu vit skulu gjørt tað í dag, hvussu høvdu vit so gjørt tað?<br>• Hvat riggar aðrastaðni? - hvat gera tey?<br>• Man søkir fyri barnið - familjan er bara eftir. Tað hendir í dag.<br>• Alt økið skal liggja undir einum yvirskipaðum ráðið |

| Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða | Comitment - má eisini merkja, at man heldir fast.<br>Kann man tosa um eina hurð<br>Fyribyrgingin skal vera nógv sterkari. |

| | |
|---|---|
| loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | • Fleiri fyriskipanir eru lagdar út til kommunurnar at umsita – hettar skapar storar munir í tænastuveitingunum.<br>• Man eigur at fara burtur frá at tosa um inkludering í tí stóra felagsskapinum. Tað er lov at deila børn upp í minni felagsskapir fyri at hjálpa teimum.<br>• Tað skal vera onkur omanfyri sum samskipar tað samlaða barna og ungdómsmálaráðið.<br>• SSP – hevur eina kontrakt – kann mann útbyggja tað kontraktina?<br>• Kanskal skal man styrkja tað sum er í gongd, og útbyggja tað í staðin fyri at byggja nakað nýtt. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og *Skipað netverk og felags almenn leiðsla*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Her og nú : Tvørgangandi samstarv meðan arbeitt verður við at skapa eina nýskipan av øllum økinum!<br><br>Samanleggja allar funktiónir á barna og ungdómsøkinum undir eitt Barna og familjuráð:<br>Barnavernd, Gigni, SSP, sernám, Børn og ung (0-18 ár) á AV, Barnaverndarstovnar, Barnaverndarstovan, barna og ungdómspsykiatriina osv. Osv. Osv.<br><br>Játtanin skal vera undir einari politiskari paraply – ein politiskur ráðharri Hettar fyri at sleppa undan silohugsan - soleiðis verður talan um eina hurð inn í skipanina.<br><br>Primer sektorurin verður verandi sum nú - tvs. Skúlar og dagstovnar<br><br>Hettar krevur eina politiska avgerð og viðgerð sum skal leggjast fram av øllum teimum sum hava undirskriva semjuskjalið um inniverandi verkætlan. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Sí nr. 5 |

# B - Arbeiðsborð 8 - Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**
Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Tað er tí avgerandi, at tað er eitt samstarv um hesa ábyrgd tvørtur um familjur, skúlar, almennar stovnar, frítíðarvirksemi - alt samfelagið. Tað krevur felags átøk, felags lógarverk og sosialar kontraktir

**Avbjóðing**:
Hóast bæði nógv er tosað og skrivað í álitum um vantandi samskipan, arbeiða geirar og stovnar enn nógv í sjálvdrátti og oftast bara á sínum øki. Forðingin er onkuntíð trong lóggáva og trong fígging. Í hesum skipanum verður heimurin ikki sæddur úr sjónarhorninum hjá barninum, tí unga ella foreldrunum. Tí kann tað enda við mótstøðu og misskiljingum heldur enn samanhaldi fram ímóti felags málum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Seta felags karmar og skapa konsensus, so at foreldur ikki standa einsamøll við ábyrgdini fyri at skapa góðar karmar fyri síni børn
- Tað er ofta ov long frástøða millum borgara og myndugleika. Talan eigur at vera um eina samanrenning millum allar partar fram ímóti einum felags máli
- Skulu gera eina yvirskipaða lóg tvørtur um allar verandi lógir á ymisku økjunum, sum hava við børn og ung at gera tvørtur um geirar, land og kommunur

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Taka børn og foreldur meira við og geva teimum virknan lut í samstarvinum
- Børn, ung og familjur teirra, ið hava samansettar og torgreiddar avbjóðingar, eiga at fáa samskipað hjálp, so at talan verður um samstarv heldur enn tey mugu brúka orkuna upp á skipanir
- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:**<br>Navn: Barbara Á. Thomsen |
|---|---|
| Jannet Poulsen<br>Elin Stakksund<br>Irdi Nónklett<br>Paula Eikholm | **ODDAFÓLK:**<br>Navn: Eyðun M. Hansen |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Yvirlevering av børnunum frá heilsufrøðinginum til vøggustovu, til barnagarð, til skúla, soleiðis at tey, sum hava tað trupult ikki detta niður í millum. Orðið stafet verður nýtt.<br>Tagnaðarskyldan - deila upplýsingar í millum stovnar.<br><br>Útiumfar:<br>Yvirlevering sum nevnt omanfyri.<br>Styrkja familjuna -<br>Gigni hava kontakt við familjuna og børnini frá graviditeti til 18 ár?! |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og økið *Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk*, ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Ov nógvir geirar?<br>Tú kanst hava rætt til eina tænastu ella eitt tilboð, men tað er ikki nóg nógv fígging sett av ella tað er mangul upp á starvsfólk, soleiðis at tænastan ella tilboðið ikki kann veitast.<br>Samskifti og samstarv<br><br>Útiumfar:<br>Seta skjótari inn - bíligari í longdini<br>Stuttflutt tilboð - tilboðini eru nær at barninum<br>Skipanir sum eru fyribyrgjandi – so alarmarnir ikki fara frá alla tíðina<br><br>NGO'ir - manglar kanska nakað til formalisering av arbeiðinum? Faklig krøv<br>Professionalisering av arbeiðinum - ST hevur tosað um hetta? |

| Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Barnavernd - landsumfevnandi?<br>- Líka tilboð um alt landið?<br>Lóggáva um tagnaðarskyldu? Arbeiða við at gera greiða lóggávu/mannagongdir fyri nær upplýsingar kunnu deilast.<br><br>Hyggja nærri eftir tilmælinum í heildarætlanini um rúsevnismisnýtslu - um familjuhús/lággáttartilboð<br><br>Útiumfar:<br>Sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum?<br>- t.d. nógvar ymiskar fakbólkar á skúlunum<br>Álit oman á álit eru skrivað, men einki hendir<br>Tilboð meðan man bíðar eftir diagnosu - tilboð, sum ikki krevur eina diagnosu |
| | |

| Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Nakað tað sama sum omanfyri. Eisini hvar er familjan í øllum? Skulu vit fokusera nógv upp á einstaklingin ella læra børnini at fungera í bólkum |

<table>
<tr><td colspan="2">Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi og Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk</td></tr>
<tr><td>5) - Loysnir<br>1. Her og nú<br>2. Komandi 3-5 árini<br>3. Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>(brúkið uml. 20 min.)</td><td>1. Og 2. Lággáttartilboð (“mammuhjálp” stuðul í heiminum, at skipa dagligdagin. - ikki hava barnavernd sum tað fyrsta), styrkja Gigni, spenna yvir eitt longri tíðarskeið, at man kann fáa hjálp uttan at hava eina diagnosu, sálarfrøðing á skúlunum, fyribyrging (seta inn so tíðliga sum møguligt). Heilsurøktarfrøðingaútbúgving í Føroyum?<br><br>3.Avvarðandi stjórnarráð ?</td></tr>
</table>

<table>
<tr><td colspan="2">Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.</td></tr>
<tr><td>6) – Hvat hevði eg broytt?<br>1.<br>2.<br>3.<br>(brúkið uml. 10 min.)</td><td>Lógarverk til Sernám<br>Eins tænastu til øll, líkamikið hvar í Føroyum ein býr<br>Hjálp uttan krav um diagnosu</td></tr>
</table>

# B - Arbeiðsborð 9 - Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Tað er tí avgerandi, at tað er eitt samstarv um hesa ábyrgd tvørtur um familjur, skúlar, almennar stovnar, frítíðarvirksemi - alt samfelagið. Tað krevur felags átøk, felags lógarverk og sosialar kontraktir

**Avbjóðing**:
Hóast bæði nógv er tosað og skrivað í álitum um vantandi samskipan, arbeiða geirar og stovnar enn nógv í sjálvdrátti og oftast bara á sínum øki. Forðingin er onkuntíð trong lóggáva og trong fígging. Í hesum skipanum verður heimurin ikki sæddur úr sjónarhorninum hjá barninum, tí unga ella foreldrunum. Tí kann tað enda við mótstøðu og misskiljingum heldur enn samanhaldi fram ímóti felags málum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Seta felags karmar og skapa konsensus, so at foreldur ikki standa einsamøll við ábyrgdini fyri at skapa góðar karmar fyri síni børn
- Tað er ofta ov long frástøða millum borgara og myndugleika. Talan eigur at vera um eina samanrenning millum allar partar fram ímóti einum felags máli
- Skulu gera eina yvirskipaða lóg tvørtur um allar verandi lógir á ymisku økjunum, sum hava við børn og ung at gera tvørtur um geirar, land og kommunur

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Taka børn og foreldur meira við og geva teimum virknan lut í samstarvinum
- Børn, ung og familjur teirra, ið hava samansettar og torgreiddar avbjóðingar, eiga at fáa samskipað hjálp, so at talan verður um samstarv heldur enn tey mugu brúka orkuna upp á skipanir
- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Anna Christiansen (Skála Skúli - SSP), Lisbeth Sandheim (Sernám), Miriam Zachariasen (Skúlin við Streymin), Marjun Danielsen (Skúlin við Streymin(, Jeanette E. Blaasvær (Almanna- og mentamálaráðið), Ann Kristina S. Simonsen (Almanna- og mentamálaráðið) | Navn: Ann Kristina S. Simonsen (Almanna- og mentamálaráðið)<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Miriam Zachariasen (Skúlin við Streymin) |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | - Lóggáva kann vera við til at tryggja felags rættindi og tænastur kring alt landið. Hetta er tó bert ein "ramma", ið ikki ger nakran mun uttan at tað verður implementera í øllum liðum. Tað er implemteringin sum er størsta avbjóðingin, og sum krevur størsta fokus. Og hetta má fylgjast upp javnan.<br>- Tað er neyðugt at bróta niður mørkini millum geirarnar<br>- Fleiri sosialar kontraktir eru vegurin fram t.d. millum foreldur í einum bólki (td einum skúlaflokki), har øll eru samd um ein felags leist um hvussu vit gera fyri hendan barnabólk. Hetta kundu fireldur fingið hjálp til at gjørt (facilitera).<br>- Um vit skulu tryggja tað góða barnalívið skulu vit tryggja góða normering. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og økið *Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | - Tað tykist sum at vit hava alt ov nógvar líknandi fyriskipanir. *Tann góða tilgongdin* er fyri børn við autismu í øllum landinum, og er ein fyriskipan sum landsstýrið ynskir at víðka til fleiri málbólkar, *Saman um Barnið* er fyri børn í Vágunum, *TÍTT* er eitt tilboð hjá SSP o.s.fr. Hetta eru fleiri ymiskar fyriskipanir, ið virka til at hava sama aðalmál, og allar krevja ofta at somu partar skulu møtast til fundir fyri at samskipað tænasturnar, ið aftur ger at minni tíð er til at vera um barnið. Neyðugt er at hyggja eftir øllum hesum samla og at umhugsa at velja EINA skipan/leist, ið tekur hædd fyri tørvinum hjá barninum (Øll hava ikki sama tørv).<br>- Meira fokus á fyribyrging og "eitt róligt barnalív"<br>- Ivamál um tagnarskyldu ger at starvsfólk ikki vita hvørjar upplýsingar tey kunnu geva víðari, tá ið barnið fer í aðra fyriskipan. Greiðari reglur, mannagongdir og ábygdarbýti er neyðugt, og ikki minni ein frálæra í hesum.<br>- Yvirlevering millum tilboð virkar ymisk og er tað eisini ymiskt hvussu væleydnað hon er. Greiðar mannagongdir tvørturum landið er neyðugt, so at tað er EIN leistur.<br>- Tað virkar ofta sum at tað er neyðugt at børn renna seg í trupulleikar áðrenn tey vera møtt. Vit mugu handla fyrr.<br>- Fleiri tilboð/stovnar halda seg for nógv til sín "fýrakant" og ofta eru glopp ímillum, sum eingin tekur sær av. Hetta má nýhugsast.<br>- Fleiri avbjóðingar standast av at normeringin er ov vánalig. |

| Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | - Lóggáva ið m.a. ásetur rættindi, men hetta er lítið vert uttan íverksetan (implementering)<br>- Tað mangla sertilboð í dagstovnum og skúlum. Og hesi skulu styrkjast.<br>- Krøvini skulu niður<br>- Normeringin skal upp<br>- Kravd skipað førleikamenning<br>- Tilgongdin til hjálp er for lang (for nógv løg, fundir, pappírarbeið o.s.fr.)<br>- Styrkja førleikastovurnar, mentor og AKT-lærarar, so at hesi kunnu hava ein størri leiklut tá ið børn í skúlaflokkum hava avbjóðingar |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 2. Umfar: "Úti"<br>Tey sum vitjaðu hetta borðið:<br>- Umframt at tað eru fleiri stovnar og tilboð so er ein avbjóðing at tilboðini hoyra til land, kommunu ella tann privata geiran, og er tagnarskylda ofta millum hesar. Ein stór avbjóðing er at hesi ikki kunnu tosað saman og at upplýsingar ikki vera leveraðir ímillum, ið ger tað trupult at lofta/hjálpa rættstundis/rætt. Her má okkurt gerast, so at tey sum arbeiða við barninum kunnu tosað saman. Kunning manglar. Tá ið samtykki til at deila upplýsingar er í lagi so er ein avbjóðing<br>- Játtan má vera til at hjálpa (t.d. trivnaðartænasturnar í AV, útgreining, Sernám).<br>- Í løtuni er ein stór avbjóing at nógv børn fáa ikki hjálp meðan tey bíða eftir útgreining. Her má setast inn, so at tey fáa hjálp beinanvegin, og møguliga ikki tørva útgreining. Hjálpin skal ikki vera tengd at diagnosu.<br>- Sertilboðini sum eru skulu styrkjast og fleiri fakbólkar skulu inn (ergoterapeutar, fysioterapeutar, audiologoped vm)<br>- Til lóggávu: Rørsla skal lóggevast inn í skúlan (30 min um dagin), tímatalvan skal endurskoðast, og rørsla og skapandi lærugreinar skulu inn. Vit skulu hava greiðar reglur um tøkni (ongar fartelefonir)<br>Tey frá hesum borðinum sum høvdu vitja onnur borð:<br>- Vit burdu haft undirvísingartilfar í barnarættindum. Børn kenna for lítið til barnarættindasáttmálan.<br>- Hjálpin er for nógv nógv tengd at diagnosu. Kanska hon heldur skal vera tengd at t.d. atburðinum og avbjóðingunum hjá barninum<br>- Vit mangla eina hot-line har øll kunnu fáa at vita hvør hjálp er at fáa<br>- Vit mangla eitt familjuhús/lágáttartilboð, ið hjálpir og styrkir familjuni. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Foreldur burdu fingið hjálp til foreldraleiklutin og til at facilitera betur foreldrasamstarv millum foreldur (t.d. hjá øllum foreldrum í einum skúlaflokki)<br>Fleiri serstovur og serflokkar skulu setast á stovn og tær eru skulu styrkjast, harundir Skúlin á Trøðni<br>Flokslæraraleikluturin skal styrkjast og førleikastovurnar skulu hava meira ressursir til at stuðla flokkslæraranum (mentor og AKT-lærarar eisini styrkjast)<br>Normeringin skal upp<br>Krøvini skulu niður (td minni skúlting)<br>2. Lóggáva ið m.a. ásetur rættindi + íverksetan (implementering)<br>Somu skipanir, mannagondir og skjøl fyri alt landið (evt eftir pyramidu hugskjónini við at tað er eftir tørvi hvat fyri tilboð/tænasta verður sett inn)<br>Frálæra í tagnarskyldureglunum, og gera tað sum man kann fyri at stovnar kunnu deila vitan millum sín |

| | |
|---|---|
| | Kravd skipað førleikamenning<br>Minka um løgini so at tilgongdin til hjálp er styttri (for nógv løg, fundir, pappírarbeið o.s.fr.)<br>3. Land og kommunur í felag. Hetta skal vera samskipað. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Forboð at eiga eina snildfon inntil tú ert 16 ár (ella sosial kontrakt)<br>2. Børn skulu hava frí sunnudag og sjálvi velja nær og um tey ganga til frítíðarvirksemi (minka um krøv og tað at tey skulu so nógv)<br>3. Maks 5 børn pr. vaksiní skúla og dagstovni |

# B - Arbeiðsborð 10 - Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

C. Gransking, dátur og talgilding

D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla

E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**

Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Tað er tí avgerandi, at tað er eitt samstarv um hesa ábyrgd tvørtur um familjur, skúlar, almennar stovnar, frítíðarvirksemi - alt samfelagið. Tað krevur felags átøk, felags lógarverk og sosialar kontraktir

**Avbjóðing**:

Hóast bæði nógv er tosað og skrivað í álitum um vantandi samskipan, arbeiða geirar og stovnar enn nógv í sjálvdrátti og oftast bara á sínum øki. Forðingin er onkuntíð trong lóggáva og trong fígging. Í hesum skipanum verður heimurin ikki sæddur úr sjónarhorninum hjá barninum, tí unga ella foreldrunum. Tí kann tað enda við mótstøðu og misskiljingum heldur enn samanhaldi fram ímóti felags málum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Seta felags karmar og skapa konsensus, so at foreldur ikki standa einsamøll við ábyrgdini fyri at skapa góðar karmar fyri síni børn
- Tað er ofta ov long frástøða millum borgara og myndugleika. Talan eigur at vera um eina samanrenning millum allar partar fram ímóti einum felags máli
- Skulu gera eina yvirskipaða lóg tvørtur um allar verandi lógir á ymisku økjunum, sum hava við børn og ung at gera tvørtur um geirar, land og kommunur

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Taka børn og foreldur meira við og geva teimum virknan lut í samstarvinum
- Børn, ung og familjur teirra, ið hava samansettar og torgreiddar avbjóðingar, eiga at fáa samskipað hjálp, so at talan verður um samstarv heldur enn tey mugu brúka orkuna upp á skipanir
- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur

| **BÓLKALUTTAKARAR:**<br>Durita Kastalag, Hanna Krista Poulsen, Mariann Ellendersen, Anna Dam | **SKRIVARI:**<br>Navn: Ragnar Árnason Joensen<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Hjørdis Mortensen |
|---|---|

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Vit hava eina rúgvu av sáttmálum og lógarásetingum, sum ikki heilt púra í sync: Heimsmálini, og barnarættindasáttmálin, Barnaverndarlóg, persóndatavernd, breksáttmála, sjúklingatrygd, revsilóg.<br>Rættindir og sáttmálar eru spjadd í ymisk lógarverk og sáttmálar.<br><br>Vit ivast í um "fyribyrging" er nóg greitt lýst og plaserað. (pyramidan)<br><br>Trupulleikar koma ofta til sjóndar í skiftinum millum stovnar t.d. kommunalt/alment ella barnagarð/skúla.<br><br>Ein felags yvirksipað lóg (ella lógvatak) kundi skapað eina felags fatan og soleiðis lýst eitt ynskiligt støðið fyri hvat eitt gott barnalív er. Hetta skal sostatt eisini lýsast fyri at vita hvønn veg vit vilja fara.<br><br>(Ungdómstilboð til tilflytarar) |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Ein stór avbjóðing er at vit hava eina diagnosuhugsan. Hetta inniber at tú ikki fær atgongd til hjálp ella stuðul uttan so at tú hevur eina skjalfesta diagnosu.<br>Ein diagnosuhugsan sum hendan ger, at tað kann ganga rúm tíð frá at trupulleiki uppstendur, til at eitt átak verður sett inn.<br><br>Eitt størri tilvit um sosialar kontraktir... |

| Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Felags barnasýn<br>burtur frá diagnosuhugsan<br>At tað er OK at taka eina trivnaðarsamrøðu við ein fakligan leiðslupersón á einum t.d. barnagarði<br><br>Hægri normeringar á lægstu aldurstrinini.<br><br><br>SALógarkrav - At tað verður granska og fylgt upp uppá tær kanningar sum eru. At tað verður møguliga krav um lóg í samband við átøk og eftirmetingar.<br>Vit duga væl at seta gongd á verkætlanir, gera tilmæli og seta arbeiðsbólkar. Vit duga sera illa at seta mál, vit duga als ikki at prosjektstýra. Vit dumpa til eftirmeting. |

| Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Styrkja tann tíðliga innsatsin í t.d. Gigni og vøkkustovum o.l.<br>Møguliga manglar eisini ein fakligheit ella stuðulsmøguleiki til foreldur, uttan mun til um talan er um fíggjarligan stuðul ella menningartilboð. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi* og *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Seta gongd á tidlig opsporing og indsast. Stovna Førleikastova til til foreldraførleika. Her verður ikki hugsa um umsorganaryvirtøku. Men heldur stuðul og vegleiðing treytað av tørvin hjá barninum. Lógin er rímuliga greið í mun til proportionalitet av átøkum, men kanska ófullfíggjað í mun til hvørja hjálp foreldur kunnu fáa.<br>2. Kanna um íslendska prosperity act er snilt, ella um vit skulu hyggja at øðrum londum/skipanum. Síðan skulu vit finna eina skipan sum kann byggja brýr millum geirar, soleiðis at tað er greitt hvør samstarvar og hvussu, umframt hvar ábyrdin liggur.<br>3. Her má politiski myndugleikin taka lógvatak. Hetta skal gerast soleiðis, at gjørd verður ein yvirlýsing/sáttmálið, sum forpliktar politisku myndugleikarnar at samstarva tvørtur um geirar. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Les omanfyri |

# C - Arbeiðsborð 11 - Gransking, dátur og talgilding

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Granskingar- og dátugrundað tilgongd fyri at tryggja, at tey átøk og ætlanir, ið verða ment og sett í verk, eru evidensgrundað og upplýst av løtubærari og viðkomandi vitan frá tí margfeldi av pørtum, sum gera seg galdandi í einum góðum barna- og ungdómslívi, og har talgilding spælir ein týðandi leiklut.

**Avbjóðing**:
Í Føroyum hava vit ikki drúgva siðvenju at savna dátur. Sama kann verða sagt um gransking, sum nú er í stórari menning, men enn er ung. Tískil eru nógv øki at kalla ógranskað, og ofta noyðast vit at grunda okkara avgerðir á útlendska gransking, sum møguliga ikki sigur alt um føroysk viðurskifti og føroyska samfelagið. Sama við føroyskum dátum. Yvirlit yvir gransking vantar. Verandi gransking er ikki væl savnað, og tí torfør at fáa fatur á og kemur tískil ikki til fult gagn hvørki hjá teimum, ið skulu taka avgerð, øðrum granskarum ella starvsfólki á viðkomandi økjum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Vit mangla dátur og okkara mannagongdir verða ikki eftirmettar
- Skal vera dátadrivið – men tað krevur eina hugburðsbroyting
- "Vit skulu vita heldur enn gita"
- Størri tilknýti skal vera millum Setrið og praksis, bæði í mun til gransking og útbúgving

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Gransking eigur at verða styrkt og samskipað, so at hægri útbúgvingar og stovnar kunnu skapa eitt granskingarumhvørvi tvørtur um virkisøki, deildir, útbúgvingar o.a. og soleiðis møta verandi og framtíðar tørvi á vitan og viðkomandi altjóða rákum og eftirspurningi.
- Betri yvirlit yvir framda altjóða og føroyska gransking fáast til vega.
- Savna gransking í deplar ella granskingarhús, har fakfólk og foreldur hava skjóta og lætta atgongd.

| | |
|---|---|
| **Sigrid Vesturgarð**<br>**Annika Davidsen**<br>**Leivur á Lakjuni**<br>**Anna Maria Troest**<br>**Katrin av Kák**<br>**Søren Arntoft**<br>**Anita Andresen** | **SKRIVARI:**<br>Navn: Katrin Gaard<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Thurid Kristoffersen |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

| Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 |
|---|

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Gransking, dátur og talgilding** Tørvur á at gera bæði kanningar, sum lýsa økið sum heild umframt smærri verkætlanir í einstøkjum økjum. | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Mangla ofta hagtøl, data og grunddata til gransking. Henda verkætlanin kann verða við til at fremja hetta.<br>Barnaverkætlanin er við til at varpa ljós á, at tørvur er á, at gransking verður skipa, samskipa og meira miðvís innan barna- og ungdómsøkið. Somuleiðis vísir Barnaverkætlanin, at tørvur er á eini granskingarætlan fyri gransking innan barna- og ungdómsøkið.<br>Hava ofta einstakar kanningar innan einstøk økir. Men mangla gransking/kanningar sum samla hetta. Somuleiðis tørvur á at kanningar verða endurtiknar regluliga, so tað ber til at fylgja gongdini innan ymsu økini.<br>Tørvur er bæði á at fáa vitan um, hvussu støðan hjá børnum og ungum er sum heild í Føroyum. Men harumframt er somuleiðis tørvur á at fáa vitan um, hvussu støðan er hjá teimum í ymsu pørtunum av landinum. Hóast landið er lítið í vavi, kunnu viðurskiftini hjá børnum og ungum verða ógvuliga ymisk kring landið. Mangla at fáa vitan um, hvussu støðan/trivnaður hjá børnum og ungum er kring landið.<br>Tað er ein avbjóðing, at útlendskar (ofta danskar) allýsingar verða gjørdar, tá talan er um viðurskifti hjá børnum og ungum í Føroyum. Tað er tørvur á at allýsa, hvat hugtøkini “trivnaður” og “mistrivnaður” merkja á føroyskum og í einum føroyskum samteksti (konteksti). Somuleiðis er tørvur á at fáa lýst, hvussu støðan er/um hon er broytt/ymisk kring landið.<br>Mangla at kvalifisera svar/tøl í kanningum.<br>Gera onkrar verkætlanir har børn/ung eru medgranskarar. Fáa børn/ung sum eru við til at samla inn data.<br>Íslendska modellið: fáa íblástur til at gera kanningar í skúlum í Føroyum/feltstudier.<br>Gera kanningar í øllum skúlum, so fæst bæði eitt landsúrslit umframt at tað ber til at finna fram til, hvussu støðan/trivnaður eru í teimum ymsu økjunum í landinum. Við støði í hesum ber til at gera málrætta tiltøk í teimum ymsu økjunum í landinum/skúlum.<br>Tað verður oftað tosað um børnini, men ikki við børnini.<br>Hvat er trivnaður í einum føroyskum høpi. Tað er ikki nøktandi at brúka útlendskar royndir.<br>Mangla vitan um tilboð til tey, sum hava (serligar) avbjóðingar. Fáa tey, sum hava tað truplast tey tilboðini, sum tey hava tørv á/rætt til? Ella eru tað meira børn/ung í ressoursusterkum umstøðum, sum fáa tilboðini.<br>Týdningarmikið at hava í huga: Allir formar fyri inklusion skapa eksklusión. Hetta má handfarast, tá tilboð verða sett í verk. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit í mun til hetta økið, ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Bólkurin umrøddi spurningin um top-down vs. buttom-up við atliti til at seta tiltøk/verkætlanir/gransking í verk.<br>Hvør skal taka stig/seta í verk? Skal bíðast við lokalum átøkum, til landið skipar fyri átøkum?<br>Eldsálir seta typiskt átøk í gongd (buttom-up). Men manglar eisini top-down. |

| | |
|---|---|
| | Ein trupulleiki er, at eingin eigur verkætlanirnar. Tað verður ikki fylgt upp uppá granskingarverkætlanir. Av tí, at tað ikki er ein yvirskipað forankring eru tiltøkini í stórum vanda fyri at detta niðurfyri, tí ongin uppfylging er.<br>Tørvur á langtíðarætlanum, sum verða eftirmettar.<br>Tørvur á at skapa og formidla vitan. Umframt at kunna um hetta til tey, sum taka avgerðir.<br>Manglandi politiskur áhugi fyri gransking/granskingarúrslitum.<br>Hóast íslendska modellið er málrættað rúsforbrúki, kann tað brúkast sum íblástur í Føroyum bæði innan tað økið umframt onnur økir.<br>Skipa meira sum verkætlanir, eftirmeta og síðani taka støðu til um verkætlanin skal halda fram/broytast/steðga/hvat kann lærast av verkætlanini.<br>Oftað verður funnist at, at tað ikki verða gjørdar kanningar/mangla hagtøl v.m. í Føroyum. Fleiri kanningar/granskingarverkætlanir eru gjørdar um fleiri viðurskifti, men avbjóðingin er, at tað er trupult, ella ógjørligt, at finna fram til tær. Tørvur er á einum granskingargrunni (einum vitanarbanka), har tað ber til hjá áhugaðum at fáa fatur á tilfarinum.<br>Oftað tá tilboð verða sett í verk, eru tey ikki granskingargrunda, og tí ber ikki til at fáa at vita úrslit av hesum.<br>Tá tilboð/verkætlanir verða sett í verk, eiga tey at verða granskingargrunda og granskarar knýttir at hesum.<br>Tilboð: eiga eisini at spyrja, "hvussu betra vit hetta"?<br>Tann góða tilgongdin. Í hesum verður barnið ikki hoyrt. Hendir ikki nógv.<br>Verður eftirmett nú, men átti at verið eftirmett nógv fyrr. Foreldur kenna tað sum eitt eftirlit av teimum. Ítalusett sum nakað positivt, men eftirsum tað ikki er eftirmett, so vita vit ikki hvussu tað riggar.<br>Hava tíðum nøkur narrativ, men eftirsum tey ikki blíva eftirmett ella granska, vita vit ikki, um tey eru røtt.<br>Manglar, at børn/ung eru objekt, og gera niðurstøður við støði í tí, men tey verða ikki tikin við. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum í mun til gransking, dátur og talgilding** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Gott við at fleiri frá fleiri geirum møtast, tí tað kann lata upp fyri, at tað er ein fatan av samstarvi og øll kunnu luttaka í samstarvinum. Vónandi verður hetta ein byrjan til samstarv millum geirar/fakbólkar.<br>Hoyra børnini (fáa teirra sjónarmið)<br>Samla data fyri allar Føroyar<br>Ábyrgd sum granskarar at formidla vísindaliga, so tað kann nýtast til leiðslur/gransking/víðari gransking/eftirmetingar/politiskt<br>Granskingargrunda tilboð/verkætlanir<br>Tørvur á einum staði har granskingarúrslit verða samlað, so tey eru atkomilig hjá øðrum.<br>Tá kanningar verða gjørdar (t.d. kanningar hjá Fólkaheilsustýrinum og SSP) er neyðugt at hugsa, hvussu ber til at fáa fatur á teimum, sum eru trupul at røkka, tá kanningar verða gjørdar. Hetta má hugsast inn, áðrenn kanningar verða gjørdar, tí annars verða fleiri sum ikki svara, og kanningarútslitini ikki røtt/misvísandi.<br>Hvat er trivnaður/mistrivnaður? Hetta hugtakið má definerast.<br>Leikluturin hjá granskaranum er týdningarmikil við atliti til gransking/granskingarúrslit. |

| | |
|---|---|
| | Áhugavert at kanna, hvat er tað at verða hoyrd, tá talan er um børn, sum hava tað serliga trupult.<br>______________<br>Tað er fíggjarliga krevjandi at granska. Játtanin á fíggjarlógini til gransking er sera lág. Tørvur er á hægri játtan til granskingarverkætlanir.<br>Tørvur á at stuðla undir, at enn fleiri fara undir at granska/skipa skúla fyri ungum granskarum og granskingaráhugaðum/lætta um umstøður hjá granskarum.<br>Trupult at fáa útlendska fígging til gransking í føroysk viðurskifti. Játtanin hjá Granskingarráðnum er sera avmarka (uml. 7 mió. kr. árliga).<br>Nógv granskingarøki mangla í Føroyum, og tí verður oftað útlendsk gransking brúkt í Føroyum.<br>Tørvur á at ynski er frá myndugleikum o.ø, at tiltøk eru granskingargrunda. Evt. áseta í lóg, at tað, sum arbeitt verður við er granskingargrunda.<br>Hvussu skilja vit hugtøkini "trivnaðar/mistrivnaður" o.s.fr. skilja vit tað út frá føroyskum viðurskiftum ella útlendskum (donskum) viðurskiftum?<br>Tað má verða lættari at fáa at vita, hvussu man kann gera granskingarverkætlanir og umsóknir um granskingarverkætlanir/-stuðul.<br>Lena okkum eftir útlendskari gransking, tørvur er á gransking í føroyskum viðurskiftum og við einum føroyskum máli.<br>Avbjóðingar tá gransking skal gerast: Dømi Skúlaleikir: Avmarkandi orka (fíggjarligt og starvsfólk), tørvur á betri eftirmeting. Verður málið rokkið?<br>Tørvur á regluligar eftirmetingum. |

| **Skrivispurtur #2: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum í mun til gransking, dátur og talgilding** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Manglandi eftirmetingar í sambandi við gransking/tá tiltøk/fyriskipanir verða sett í verk.<br>Tørvur á, at tiltøk/gransking o.s.fr. verður skipa, samskipa og gjørt miðvíst.<br>Semja millum bólkarnar um spurningar viðvíkjandi gransking. Herundir, at tørvur er á at styrkja gransking, granskingarførleikar, økja játtan og orða eina granskingarætlan. |

| **Skrivispurtur #2: Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. gransking, dátur og talgilding** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1 :<br>Hvat gera skúlarnir í mun til broytingarnar í fólkaskúlalógini?<br>Samla tað sum liggur av gransking/kunning, sum longu nú finst, við tí fyri eyga at fáa sett tiltøk í verk.<br>Fáa eitt yvirlit yvir tilmælir í ymsu álitunum, og gera eina ætlan fyri at seta tey í verk. |

| | |
|---|---|
| | Fáa Fróðskaparsetrið at gera eina kunning um, hvussu tað ber til at koma í gongd við granskingarverkætlanir.<br>Hvat er tørvur á at fáa gransking um?<br>Gera eina granskingarætlan fyri økið<br>Seta eftirmetingar/effektkanningar í gongd av teimum tilboðum/fyriskipanum/átøkum, sum longu er sett í verk.<br>Mugu skriva, hvussu úrslitið verður fylgt upp/eftirmett/effektmett, í sambandi við, at umsókn um granskingarverkætlan verður gjørd.<br>Projektleiðsla manglar í sambandi verkætlanir (manglar leiðsla, tíðarætlan, játtan o.s.fr.). Ynskiligt við ætlan yvir verkætlanir.<br><br>2:<br>Tørvur á at gera afturvendandi kanningar/eftirmetingar/effektkanningar, tí viðurskifti broytast.<br>Tørvur á at gera fakligar metingar um, hvat tørvur er á at granska í. Biðja um input frá viðkomandi pørtum um hesi viðurskifti.<br><br>3:<br>Granskingarætlan má setast í gongd frá politskum stigi. Granskarar gera eitt uppskot til granskingarætlan, sum síðani politisk støða verður tikin til. Politiskt má økt játtan til gransking.<br>Fróðskaparsetrið hevur ein týðandi leiklut í at útbúgva/førleikamenna granskarar.<br>Skúlar mugu fáa innlit í granskingarúrslit í t.d. trivnaðarkanningar. Tað er ein fortreyt fyri at kunnu seta inn við røttum átøkum. Granskingarúrslit mugu brúkast. Hetta skyldar man eisini børnunum, sum hava luttikið í kanningini.<br>Hvussu verða kanningarnar brúktar? Og hvør skal fylgja uppá tær. Tað manglar ein virkisætlan, tá ein kanning er gjørd um hvør skal fylgja upp uppá kanningarúrslitini.<br>Granskingarúrslit mugu verða lætt atkomilig, so vitanin verður atkomilig.<br>Tað má gerast ein virkisætlan fyri, hvussu granskingarúrslit verða brúkt, tá kanningar verða gjørdar, sum snúgva seg um viðurskifti hjá næmingum. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1:<br>Endurhugsa skúlan/skúlaskipanina. Gera skúlan meira rúmligan og kreativan, so hann rúmar/kann menna og menta børnini og tey ungu.<br>Gera verkstovur í skúlunum líknandi hesi verkstovuni. Systemið kring børnini má broytast, men ikki seta t.d. fleiri sálarfrøðingar í skúlarnar/flokkarnar.<br><br>2: |

| | |
|---|---|
| | Størri orku til gransking/menna gransking/menna granskingarførleikar.<br><br>3:<br>Meira frítíð til børn og vaksin. Styttri arbeiðsvika. Sunnar og mennandi felagsskapir til børn og ung í frítíðini. Útbúgvin starvsfólk til fríðtíðartilboð. |

# C - Arbeiðsborð 12 - Gransking, dátur og talgilding

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Granskingar- og dátugrundað tilgongd fyri at tryggja, at tey átøk og ætlanir, ið verða ment og sett í verk, eru evidensgrundað og upplýst av løtubærari og viðkomandi vitan frá tí margfeldi av pørtum, sum gera seg galdandi í einum góðum barna- og ungdómslívi, og har talgilding spælir ein týðandi leiklut.

**Avbjóðing**:
Í Føroyum hava vit ikki drúgva siðvenju at savna dátur. Sama kann verða sagt um gransking, sum nú er í stórari menning, men enn er ung. Tískil eru nógv øki at kalla ógranskað, og ofta noyðast vit at grunda okkara avgerðir á útlendska gransking, sum møguliga ikki sigur alt um føroysk viðurskifti og føroyska samfelagið. Sama við føroyskum dátum. Yvirlit yvir gransking vantar. Verandi gransking er ikki væl savnað, og tí torfør at fáa fatur á og kemur tískil ikki til fult gagn hvørki hjá teimum, ið skulu taka avgerð, øðrum granskarum ella starvsfólki á viðkomandi økjum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Vit mangla dátur og okkara mannagongdir verða ikki eftirmettar
- Skal vera dátadrivið – men tað krevur eina hugburðsbroyting
- "Vit skulu vita heldur enn gita"
- Størri tilknýti skal vera millum Setrið og praksis, bæði í mun til gransking og útbúgving

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Gransking eigur at verða styrkt og samskipað, so at hægri útbúgvingar og stovnar kunnu skapa eitt granskingarumhvørvi tvørtur um virkisøki, deildir, útbúgvingar o.a. og soleiðis møta verandi og framtíðar tørvi á vitan og viðkomandi altjóða rákum og eftirspurningi.
- Betri yvirlit yvir framda altjóða og føroyska gransking fáast til vega.
- Savna gransking í deplar ella granskingarhús, har fakfólk og foreldur hava skjóta og lætta atgongd.

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Ann Højgaard Slot, Anna Eikholm, Laufay Blaasvær, Petur Lamhauge og Sonja Olsen, Fróðskaparsetur Føroya, Durita Samuelsen, MEA, og Sólrun Foldbo, Gigni. | Navn: Harriet Hansen<br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Erla Olsen |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Gransking, dátur og talgilding | |
|---|---|
| 1 )<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Erla greinar uppgávuna, sum vit sita við. Mangla vit dátur, ella eru tær goymdar. . Tosa um familjutrivnað /parlag, um foreldrini trívast, so er tað betur fyri børnini.<br><br>Øll ynskja dátur, men vit mangla tíð og resursir at grava niður í hetta. Gignidátur, sum eru skrivaðar við hond.<br>Sernám hevur eisini nógv grundtilfar, men hvat skal til fyri at fáa hesar dátur í viðgerð, greina og hvussu fáa vit so hetta í brúk.<br>MEA er byrjað eina verkætlan, aftur til parlagið.<br><br>Lesandi á Setrinum skulu arbeiða meira við tøkum dátum, allir landstovnar skulu nokk eisini bjóða út verkætlanir, sum lesandi kunnu átaka sær. Hjá Setrinum er ofta gransking grundað á at geva út eina grein á enskum, hetta kann ofta vera tungt og torskilt sjálvt hjá lesandi. Vit eiga at leggja okkum eftir, eisini at útgeva granskingarúrslitini á vanligum máli og ikki minst á føroyskum fyri at fáa gagnnýtt vitanina úti í samfelagnum.<br><br>Vita av hvørjum øðrum, so vit ikki gera dupultarbeiðið.<br>Bjóða inn bæði fyri at skapa fakligan áhuga og fyri fígging.<br><br>Savnað dátur fyri øll, bæði visindaliga og til almenningin.<br><br>Fáa fakmálið á føroyskum. Miðla alt tað arbeiðið, sum longu er tøkt, men kemur ikki út. |
| 2)<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Gransking, dátur og talgilding* og økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir*, ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Felagsskapurin er familjan. Felagsskapurin er bæði í familjuni og uttanfyri. Hvør gransking finst innanfyri familjumynstur. Er hetta møguliga eitt meir viðbrekið økið at granska í? Fyri at kunna granska ´tað goða barnalívið’ so mugu vit granska alt rundan um.<br><br>Hvussu er atgongdin til hesar dátur? Tora vit ov illa at fara inn á familjumynstir o.s.fr. Gigni liggur inni við nøkrum av hesum, men hvat og hvussu kann tað brúkast?<br><br>Vit mangla nokk kategoriseringar av dáta? Hvat er uppgávan hjá t.d. lesandi á setrinum? Tað er ikki krav at savna gransking til bacheloruppgávur.<br><br>Granskingartilfarið verður anymoserað frá byrjan. Setri/undirvísarar eru ikki nóg væl íklødd til at geva teimum lesandi undirvísing.<br>Í løtuni fer ein gransking í gongd við skiftisnámsfrøði, har farið verður innyvir trivnað og resilens.<br><br>Gransking við fígging innan tað almenna, skulu útgevast innanfyri ávíst áramál. Her kundi Hagstovan verið hjálpsamt til |

| | |
|---|---|
| | granskingartilfar, soleiðis tað kann vera frammi anonymt. Tey hava fakligu vitanina um innsavnan til hagtøl.<br><br>Krøvini til trivnað fyri børn í ávísum aldri, hvar læring kemur inn so skjótt. Núverandi trivnaðarkanningar kundu møguliga vent annan veg. Kvantitativar kanningar við online spurningum. Hvat við at fáa kvalitativar kanningar inn.<br><br>Málbólkur fyri trivnaðarkanningar, hevur verið almenni skúlin og ikki sertilboð /serskúli.<br><br>Skúlarnir vera nógv brúktir, serliga teir stóru í Havn, og tí kunnu teir troyttast av spurningum og eisini sæst hetta á áhuga fyri at fáa starvslesandi, her er serliga tungt fyri námsfrøðilesandi. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | At vit vita av hvør øðrum, so vit fáa samanhang í átøk.<br>Atgongd til vitan.<br>Magni M. nevndi í morgun at fáa samla økini.<br>Datasettini verða sett saman og stýrd t.d. frá Setrinum.<br><br>Tey veiku koma ikki til orðanna í kanningunum. Mangla málbólkin frá tí veikasta partinum. Fáa barnasjónarmiðið fram í kanningunum.<br><br>Fáa fokus á, hvørja vitan vilja vit hava.<br><br>Alt er nokk blivið so talgilt og ger tað lættari eftirfylgjandi. Men skal tað vera talgilt? Eygleiðingar og møtast við teimum, sum eru partar av gransking. |

| | |
|---|---|
| | Traditionir við gransking. Hvussu kunnu vit fáa krossskipað allar tær kanningar, sum fyriliggja?<br>Vit eru so fá, at vit kunnu lættari koma út til øll og fáa tí betur generaliserað, men ikki bara støði i einum økið/stikkprøva.<br><br>Trivnaðarkanningarnar kunnu geva nógv, tí økið er stórt, sum er kannað. Hetta kundi verið gott at verið partur av eini størri krosskanning. Her skulu vit ansa eftir, at einki verður kent aftur, ella kann vendast til ein ávísan persón.<br><br>Eitt beinleiðis úrslit av trivnaðarkanningunum, var at seta ein trivnaðarráðgeva á Námi.<br>Umráðandi er, at vit hugsa átøk beinanvegin eftir at ein kanning er gjørd.<br><br>Eru vit tilreiðar at seta átøk í gongd? Nær ella hvussu gerast vit klár til hetta. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum *(brúkið uml. 10 min.)* | **Frá seinna umfarinum: (úti umfar)**<br>Annika Anthoniusen, Setrið, Unn ergoterap, Vilhelm ? BVT - Jóhan Stenberg, Guli skuli og Tine Lyager, BVT<br><br>Vita ov lítið um økini hjá hvør øðrum.<br>Hvat hevur brúkarin brúk fyri? Tungt at gjøgnumskoðað økini.<br>Kunningarplatformur digitalur, soleiðis at tilber at fara inn á ein platform og fáa vitan um, hvar skal eg?<br>*Dømi:* Kostkanningar gjørdar og manglar fyri at skapa trivnað, torført at fáa fatur í teimum, sum hava størsta tørvin.<br>*Fráboðanarskyldan*, hvør ger hvat, hvussu og nær? Systemiskar trupulleikar, onkur fær hjálp og onnur ikki.<br>Forðingar fyri at tosa um 'barni', hvør hjálpir hvørjum, so tað ikki er uttanfyri ella innanfyri skúlagátt.<br>*Tagnarskylduforðingar*.<br>Talgildingin, sum er í gongd, er ávegis til at røkka øllum skipanum. |

| | |
|---|---|
| | *Effektevalueringar* av átøkum, skipanum og av starvsfólkum.<br>Gransking á skúlaøkinum/skúlaskipanum. Føroyska fólkaskúlalóg.<br>Samstarv við foreldur, bæði í dagstovna- /skúlaøkinum og so atkomiligt til samstarv við foreldur hjá BVT.<br><br><u>Samanumtikið:</u><br>Vita ov lítið um hvønn annan. Samskipan millum skipanir, hvussu gera vit tað?<br>Móttøkupersónar, sum hava vitan um og heimild til at vísa viðari í skipanini.<br>Ein bókling / og talgilt, so vit síggja tann reyða tráin í møguleikunum, sum eru til børn og ung.<br>Inn til hjálp uttanum ávísingar.<br><br><br>**<u>Heimabólkurin kemur aftur:</u>**<br>Tagnarskylda og upplýsingarskylda fyllir nógv. Fakligi parturin, hvussu tryggja vit dygdina?<br>Barnasýn og foreldrasýn eru týdningarmikil at hava við í tilgongdini.<br><br>Er tað í tí einstaklingasjónarhornið og/ella felagsskapurin?<br>Gransking kann lýsa prosessina, hvønn veg fara vit?<br><br>Foreldrini eru heima og ein lítil felagsskapur.<br>Stovnur/skúli er ein annars felagsskapur.<br><br>Atgongd til talgildu vitanina, meir sárbært fyri barni?<br><br>Anonymisering av øllum dátum, sum skulu inn til talgildu skipanina. Hvat er sárbært við hesi innlesing av dátum. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Gransking, dátur og talgilding* og *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Innsavna tær dátur, sum longu nú fyriliggja. Tað fyriliggur nógv granskingartilfar, men er óskipað og ókent.<br><br>2. Byggja ein platform fyri vitan, sum vit savna á einum stað. Bæði at leggja inn og skipan um, hvussu vit kunnu brúka hesa gransking.<br><br>3. Landsbókasavnið til innsavnan av frágreiðingum. Vit mugu fáa Hagstovuna við í hetta arbeiðið. Fróðskaparsetrið er granskingarmiðdepilin. |
| | |

**Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.**

| | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Játtan t.d. til grunn at skipa og samskipa tvørgeiraligar verkætlanir og eftirmetingar av átøkum.<br><br>2. Granskingin skal eftirfylgjandi brúkast til ítøkiligi átøk.<br><br>3. Kanna, hvussu vit fáa tann málbólkin við, sum ofta dettur niðurímillum. |

# C - Arbeiðsborð 13 - Gransking, dátur og talgilding

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Granskingar- og dátugrundað tilgongd fyri at tryggja, at tey átøk og ætlanir, ið verða ment og sett í verk, eru evidensgrundað og upplýst av løtubærari og viðkomandi vitan frá tí margfeldi av pørtum, sum gera seg galdandi í einum góðum barna- og ungdómslívi, og har talgilding spælir ein týðandi leiklut.

**Avbjóðing**:
Í Føroyum hava vit ikki drúgva siðvenju at savna dátur. Sama kann verða sagt um gransking, sum nú er í stórari menning, men enn er ung. Tískil eru nógv øki at kalla ógranskað, og ofta noyðast vit at grunda okkara avgerðir á útlendska gransking, sum møguliga ikki sigur alt um føroysk viðurskifti og føroyska samfelagið. Sama við føroyskum dátum. Yvirlit yvir gransking vantar. Verandi gransking er ikki væl savnað, og tí torfør at fáa fatur á og kemur tískil ikki til fult gagn hvørki hjá teimum, ið skulu taka avgerð, øðrum granskarum ella starvsfólki á viðkomandi økjum.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Vit mangla dátur og okkara mannagongdir verða ikki eftirmettar
- Skal vera dátadrivið – men tað krevur eina hugburðsbroyting
- "Vit skulu vita heldur enn gita"
- Størri tilknýti skal vera millum Setrið og praksis, bæði í mun til gransking og útbúgving

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Gransking eigur at verða styrkt og samskipað, so at hægri útbúgvingar og stovnar kunnu skapa eitt granskingarumhvørvi tvørtur um virkisøki, deildir, útbúgvingar o.a. og soleiðis møta verandi og framtíðar tørvi á vitan og viðkomandi altjóða rákum og eftirspurningi.
- Betri yvirlit yvir framda altjóða og føroyska gransking fáast til vega.
- Savna gransking í deplar ella granskingarhús, har fakfólk og foreldur hava skjóta og lætta atgongd.

| BÓLKALUTTAKARAR: | SKRIVARI: |
|---|---|
| Hanna Ziskason Hansen, Próvstovan<br>Birita Arge, PhD, Aalborg Universitet<br>Kalpana, Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya<br>Durita Restorff, Gigni<br>Jórun Niclassen, námsfrøðiliga ráðgevingin, Klaksvíkar kommuna<br>Hans Harryson, Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya<br>Tóra Højgaard Joensen, Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya | Navn: Terji Beder<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Hanna Ziskason Hansen |

| | |
|---|---|
| Terji Beder, Barna- og útbúgvingarmálaráðið | |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Gransking, dátur og talgilding** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Granskingargrundaði perspektiv til at granska økið.<br>Bíløgd kann geva vitan um hvat vit hava tørv á teimum ymisku økjunum (ein brúgv má eisini byggjast millum fólkið og granskingina, soleiðis at bíløgd gransking eisini kann koma harfrá).<br>Gransking generelt gevur okkum eitt útgangsstøði at arbeiða útfrá.<br>Gransking í øllum liðum, øllum støðum, øllum niveaum.<br><br>Eitt baseline study hevði verið hent at havt, eitt útgangsstøði, sum vit kunnu máta, áðrenn og eftir at vit byrja at gera innsatsir.<br>“State of the art”-gransking, hvat riggar aðrastaðni, og hvussu kunnu vit taka tað sum riggar heim, og hvussu kunnu vit skynsamt implementera, so tað hóskar til føroysk viðurskiftir.<br><br>Fylgigransking av implementering / sparringspartnari<br><br>Finna eitt stað, har gransking verður goymd. Ein granskingar- og vitanarbanki. evt. útbyggja PURE.FO, so tað kann hugsast tematiskt, evt. Við einum barnatema.<br><br>Interna gransking, gransking nær barninum, familjuni o.a.<br><br>Vit mugu hava eina vitanarrammu, har vit definera “child wellbeing”. Hetta er í stóran mun definera, m.a. í grannalondum.<br><br>Vit hava skrásetingar av ymiskum slag, sum liggur úti á ymiskum økjum. Hesar skrásetingar liggja í hvílistøðu, og kunnu aktiverast. Her er týdningarmikið at skrásetingarnar verða savnaðar, og at tær framyvir eisini verða samvirkandi.<br><br>EIn fortreyt fyri at kunna savna upplýsingar, er:<br>1) At øll skráseta talgilt<br>2) At vit skráseta líka<br>3) At vit hava samvirknar skrásetingar<br>4) At skrásetingarnar koyra við einum felagslogikki |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Gransking, dátur og talgilding* og økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk,* ið vit eiga at arbeiða víðari við? | Vit hava avbjóðingar við okkara skrásetingum. Dømir eru um somu tilboð tvørtur um landið, men ymiskar mátar at fyrihalda okkum til tað uppá. Hetta fevnir m.a. um hvussu tað verður skrásett, tí skipanirnar eru ymiskar og krøvini um skráseting í heila tyki er ymiskt. Dømir eru t.d. um kommunur, sum ikki krevja skráseting fyri ávísar tænastur, har flest aðrar kommunur hava krav uppá skráseting (Um hetta verður tikið upp í KAF, so verður skjótt greitt hvørji økir talan er um.). |

| | |
|---|---|
| *(brúka uml. 15 min.)* | Endamálið við okkara gransking er ikki bara at fáa greinir útgivnar í enskum tíðarritum - tað er eisini at fáa granskingina útaftur í samfelagið, so at vit kunnu brúka okkara vitan til at betra okkara skipan.<br><br>Skipaðar tilgongdir, sum byggja á ta vitan, sum vit hava.<br><br>Vit hava ávísa vandatekin, sum vit vita skapa útfordringar fyri barnið. Við at brúka hesa vitan, kunnu vit skapa mannagongdir, sum virka fyribyrgjandi fyri barnið. Hetta kann passast til ávísar støður.<br><br>Vitanardeiling tvørturum siloir.<br><br>Vit mugu hava øll børnini við, og tað mugu vit minnast. Vit skulu hava eitt breidri perspektiv í Barnaverkætlanina, sum eisini fevnir um tey børnini sum trívast, og tey børnini, sum klárða seg væl. Hesi børnini eru sjáldan partur av teimum perspektivum, sum vit arbeiða við, har vit seta inn har sum tørvurin er størstur.<br><br>Útbúgving og eftirútbúgving innan økið.<br><br>Kortlegging av føroyskari gransking.<br><br>Spurningur: Kunnu vit ímynda okkum nýtslugransking, sum fokuserar uppá implementering, so vit gransking, sum stendur á meira enn einum beini? Gransking, sum fokuserar uppá tær broytingar, sum fylgja okkara innsatsum? Hetta kundi gjørt, at vit bæði fingu arbeitt við at brúka okkara vitan í praksis, máta hvørja ávirkan nýtslan av okkara vitan, og harvið fáa gransking og implementering alt um eina leið. (nýutslugransking og interventiónsgransking)<br><br>Ein tvørgangandi avbjóðing í okkara samfelag er aldursdefinitiónin, sum vit brúka. Tað hevur verið sagt, at Barnaverkætlanin er frá 0 – 18 ár, men aldur er meira enn eitt tal, tí um hugt verður at einum menningarperspektivi, so er tørvur á at hækka aldurin. Barnaverndartænastan kann t.d. verða galdandi til tey eru 23, tá mett verður, at tey ikki megna eina vaksnamannatilveru. Hetta eigur ein barnaverkætlan at taka hædd fyri, so okkara samfelag betri kann differientiera millum teir tørvir, sum reelt eru úti á økinum. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Felagsleistir fyri landsdekkandi tænastur, sum tryggja, at tey somu tilboðini verða veitt tvørturum økini í landinum.<br><br>Hugsa "equity of access" ikki "equality of access". Við hesum hugsanarháttinum kunnu vit kanska hugsa annarleiðis um tey tilboðini vit hava? Eisini tá tað kemur til starvsfólkaviðurskiftir, t.d. kundi man hugsa sær eina útijaðaraviðbót til størv í útijaðaranum.<br><br>Samstarvsøkir, eins og við skúlasamstørvum, kunnu hugsast fyri onnur økir eisini, sum t.d. sernámstilboð, dagstovnaøkið, v.m. |

| | |
|---|---|
| | Vit skulu hava fólk, við rótfesti í dagstovnaøkinum, inni á Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Her skulu vit møguliga umhugsa at leggja barnagarðarnar aftur undir landið.<br><br>Dagstovnaøkið er ikki nóg væl umboðað í Barnaverkætlanini, og tað sæst aftur í tí veruleikanum, sum barnaverkætlanin kemur at skapa.<br><br>Fyri at halda momentum, hevði verið gott við smærri granskingarverkætlanum. Hetta fyri at fáa fleiri úrslit, við týttari intervallum, soleiðis at sjónligheitin á fokusøkinum gerst størri.<br><br>Cyklus: gransking, implementering, evaluering.<br><br>Vangin eigur at verða útbygdur, soleiðis at hann kann arbeiða saman við heilsuregistarum, Kervi+, almannaverkinum, skrásetingum hjá Gigni, o.s.fr., og verða knýtt at p-tali. Soleiðis fáa vit allar persónsupplýsingar knýttar at persónum, og har hesir upplýsingar liggja í somu skuffu. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Stovnar hava hvørki orku ella fígging at granska, men høvdu vilja bjóðað granskarum inn, sum kundu granska í teirra øki.<br><br>Samlaða granskingarpuljan er alt ov lág til nakra munagóða gransking yvirhøvur, og tørvur er á at økja um granskingarpuljuna – ikki einaferð, ikki tvær ferðir, ikki tríggjar ferðir, ikki fýra ferðir, men kanska fimm ella seks ferðir, áðrenn vit byrja síggja ein mun. Fyri Barnaverkætlanina eigur ein granskingarpulja at verða sett av, sum er oyramerkt til økið. Møguleikar fyri aðrari fígging, evt. tvørturum stovnar, eigur eisini at verða ein møguleiki.<br><br>Spekulatiónir vóru um skráseting av viðbreknum persónsupplýsingum og GDPR. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Gransking, dátur og talgilding* og *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | <br>**Her og nú:**<br>Talgilding. víðka um telduskipan – Kervi +, so alt data er savnað á einum stað<br>**Hvør skal fremja hesar broytingar:**<br>BÚMR, AMMR, HMR og FMR<br><br>**Her og nú:**<br>Kategorisering av verandi gransking<br>**Hvør skal fremja hesar broytingar:**<br>Granskingarráðið<br><br>**Her og nú:**<br>Starvsfólk mugu setast av til Barnaverkætlanina. Um ábyrgdin av Barnaverkætlanini skal liggja í einum stjórnarráði, má orka setast av til |

| | |
|---|---|
| | endamálið. Her er alneyðugt at seta starvsfólk til endamálið, so hetta projektið ikki dúvar uppá verandi starvsfólk. Vit endurtaka, at seta fólk til uppgávuna er alneyðugt.<br><br>**Her og nú:**<br>Vit mugu tosa um tann fíggjarliga partin, tí ein Barnaverkætlan, sum kann eydnast, má uppraðfestast í resoursum. Vit mugu diskutera hvat kostnaðurin verður av hesum, og um vit evt. skulu hava eitt Barnastýri, ella um Barnaverkætlanin skal leggjast í eitt av verandi stýrum, sum t.d. Undirvísingarstýrinum. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Eitt samlað Barnamáláráð. Tað merkir at barnagarðarnir fara aftur undir landið, at ítróttur og frítíðarlív verður lagt í ráðið, osv.<br>2. Hvar blivu børnini av, sum plagdu at spæla úti? Granska í spurningum sum hesum. |

# D - Arbeiðsborð 14 - Skipað netverk og felags almenn leiðsla

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

C. Gransking, dátur og talgilding

D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla

E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**

Miðvíst at skipa ein einfaldan, gjøgnumskygdan, fakliga sterkan og burðardyggan bygnað tvørtur um land og kommunur, geirar og stovnar. Við skipaðum netverkum og felags almennari leiðslu verður dentur lagdur á at menna nýggjar samstarvspallar, leiðsluførleikar, karmar og rásarúm til tess at røkka felags málum og loysa loysa fjøltáttaðar systemiskar avbjóðingar.

**Avbjóðing**:

Nógv er skrivað í álitum um vantandi samskipan, grundleggjandi tungan bygnað millum land kommunur, ið eru ov nógvar í tali, stirvna, ótíðarhóskandi og geiraliga tronga lóggáva, avmarkaða fígging, sum eingin enn hevur megnað at broyta. Undir hesum kørmum verður góða barna- og ungdómslívið ikki sett í miðdepilin.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Væl virkandi yvirskipað eftirlit og tryggjaðir óheftir kærumøguleikar, har spurnartekin ikki kann setast við gegni
- Fíggjarætlanin (budgettið) er ov stýrandi og avmarkandi í mun til raðfestingar av tænastum
- Vit skulu ikki gera fleiri skipanir og stovnar. Heldur færri, sterkari og betri samskipaðar
- Tað er ikki javnvág millum torgreidda lóggávu og mannagongdir og leiðslutilfeingið úti á stovnum
- Vit skulu endurhugsa komunala bygnaðin, lógarverk og fremja bygnaðarligar broytingar samsvarandi tí

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur, og minst møguligt skulu flyta millum skipanir orsaka av aldri
- Skapa yvirlit yvir hvørjar tænastur vera veittar til sama málbólk, og hvør fær onga tænastu, hetta fyri at tryggja meira skynsamar tænastur og at ongin "dettur niður ímillum"

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Petur Mittún (ÍSF), Poula Patursson (ADHD felagið og arb á barnaverndarstovni í AV), Maiken Skarðenni (Vegleiðingarstovan, US), Ninna Reinert (námsvísindadeildin), Gunnvá Djurhuus (Almannaverkið, børn og ung), Elisabeth á Lakjuni (Almannaverkið, børn og ung), Annika Antoniussen (Námsvísindadeildini), Súsanna Reinert-Petersen barna- og ungdómspsykiatari í Vit (privat klinikk), Rakul Lisberg (námsfrøðilgur - varaleiðari á | Navn:<br>Poula Patursson<br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn:<br>Petur Mittún |

| | |
|---|---|
| Frítíðarskúlanum á Fløtum), Lív Brúsá - sálarfrøðingur á fyribyrgingardeildini hjá Bláa Krossi Føroya, Jona Lamain og Kristina Háberg, BVT | |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Skipað netverk og felags almenn leiðsla** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 4 høvuðsyvirskriftir<br>Felagshurð<br>Yvirgangir millum stovnar og inndraga foreldrini<br>Samstarv og vitan um ymsu instansir<br>Land (skúli) vs. kommunur (dagstovnar)<br><br>Ov nógvar hurðar, ábyrgdin av uppgávunum er ikki greið, ressursusterk fólk klára at søkja sær hjálp og knekka. Hvussu er so við teimum ikki ressursusterku? Her átti at verið ein stór felagshurð sum er eitt lág-góttatilboð sum er tvørfakligt. Tað sálarliga er enn stigmatiserað, meðan tað kropsliga er góðtikið. Ein telefonsentralur sum hava fakfólk sum skilja skipanina. Kanska eina heimasíðu við øllum instansum.<br>Men góði felagsskapurin er eisini vanliga barnalívið har stovnar samstarva, foreldraráð. Manglar glíðandi yvirgangir frá t.d. barnagarð til skúla.<br>Stóra talið av diagnosum kann indikera at skúlin ikki rúmar øllum børnum.<br>Skilnaður millum pedagogar og lærarar. T.d hoyrir pedagogøkið ikki undir BUMR men undir nógvar kommunur.<br>Dagstovnaøkið er ikki nóg raðfest, og munur er á kommunum, so góðskan er sera ymisk. Hvussu tryggja vit at góðskan er líka góð uppá tvørs av Føroyum? Skipanin er ein forðing og kommunurnar arbeiða í hvør sínum lag. Landið stýrir fólkaskúlanum, meðan kommunur stýra dagstovnaøkið.<br>Almannaverkið upplivur stóran mun á tænastu og tilboðum í ymsu kommununum, bæði í mun til dagstovnar, skúla, Barnavernd osv.<br>Nógvir kassar har glopp er ímillum, og risiko fyri at familjur detta ímillum.<br>Skúli og dagstovnaøkið samstarva t.d. í Vestmanna, har børnini nakrar dagar um vikuna fáa lærarar á stovnin ella umvent.<br>Hugskot: Familjuverk/familjusentrið sum kann hjálpa, he.ldur enn at foreldrini skulu finna sær hjálpina.<br>Sernám - hvussu kontaktar man Sernám? Sernámsfrøðilig ráðgeving frá kommunum kunnu veita til dagstovn og frítíðarskúla, men ikki skúlan.<br>Skuldi øll skipanin verið umskipað - alt byggjast upp av nýggjum og skapa teir ideellu stovnarnar og tilboðini! |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og økið *Gott barna- og ungdómslív,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Skal økið umskipast? Hava vit lógarkarmar til at arbeiða felags?<br>Skulu vit umleggja soleiðis at fakfólk samstarva.<br>Tagnarskylda er sera týdningarmikið, tí eisini vigtigt at vit kunnu starta uppá ein frisk.<br>Tagnarskyldan er eisini ein trupulleiki í tvørgeiraligum samstarvi. Hví blíva foreldur ikki spurd um samtykki? Til dømis tá børn fara frá barnagarði til skúla.<br>Fakfólk eru professionell, men foreldrasamstarv er vigtigt.<br>Hvat kunnu vit gera meðan vit bíða eftir Barnaverkætlanini? Tí hon fer at taka tíð. Nógv fakfólk eru sum gjarna vilja gera meira. Til dømis kundu verið |

| | |
|---|---|
| | fastar konferensur millum BVT og barnapsykiatara, ella til dømis Sernám og B&U seta seg saman fast regluliga og skjótt-útgreina nøkur børn.<br>Samstarv millum geirar og myndugleikar fast og regluliga, og ikki bara tá man hvørt 10.ár ger eina stóra verkætlan um allan mistrivnaðin osv. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Lág-gáttartilboð til øll børn um trivnað t.d. samstarv samstarv millum dagstovn, Gigni, BVT um lítil børn - uttan diagnosukrav!<br>Felagshurð tá tørvur er á hjálp<br>At allir instansir vita meira hvat uppgávurnar hjá øðrum eru<br>Yvirgangir millum stovnar og geirar glíðandi<br>Tann góða tilgongdin er fyrimynd umframt Bú og viðgerðarstovnurin<br>Stoffalág (samstarv millum AV og B&U psyk)<br>"Meðan vit bíða" skal eisini loysast her og nú eyka útgreining?<br>Starvsfólkatrot á dagstovna |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Sakna skrásetingarskipan sum fylgir barninum, so man sær hvat var sett inn gjøgnum uppvøksturin. Og felags datagrunn, so vitanin er savnað og ikki øll arbeiða í hvør sínum lag.<br>Hugsa meira innovativt, byggja heilt av nýggjum heldur enn at arbeiða við núverandi skipanum.<br>Skulu ítróttarfeløgini eisini hava sernámsfrøðiliga vitan? Ofta er ítrótturin raðfestir hægri enn tað sosiala í skúlanum.<br>Sakna fokus á ítrív, frítíðartilboð, hjálparfelagsskapur, sjálvbodnar felagsskapir osv. Og sosialar kontraktir um t.d. telefonir, føðingardagar osv. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og *Gott barna- og ungdómslív*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Her og nú: Lurta eftir verkstovunum og set átøk í verk – men fylg upp aftur uppá hesa vitanarráðstevnuna. Lat ikki hetta eisini blíva eitt "skuffuálit"<br>2. Komandi 3-5 árini eftirmeta og kalla inn aftur<br>3. BUMR og tryggja at tað ikki broytist við nýggjari samgongu |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Fíggjarmálaráðið skal vera við í at tryggja gott barna og ungdómslív<br>2. Yviskipað arbeiða við fyribyrging fyri øll børn og ung, betri trivnað og frítíðin<br>3. Ein felags hurð til familjurnar |

# D - Arbeiðsborð 15 - Skipað netverk og felags almenn leiðsla

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

C. Gransking, dátur og talgilding

D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla

E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**

Miðvíst at skipa ein einfaldan, gjøgnumskygdan, fakliga sterkan og burðardyggan bygnað tvørtur um land og kommunur, geirar og stovnar. Við skipaðum netverkum og felags almennari leiðslu verður dentur lagdur á at menna nýggjar samstarvspallar, leiðsluførleikar, karmar og rásarúm til tess at røkka felags málum og loysa loysa fjøltáttaðar systemiskar avbjóðingar.

**Avbjóðing**:

Nógv er skrivað í álitum um vantandi samskipan, grundleggjandi tungan bygnað millum land kommunur, ið eru ov nógvar í tali, stirvna, ótíðarhóskandi og geiraliga tronga lóggáva, avmarkaða fígging, sum eingin enn hevur megnað at broyta. Undir hesum kørmum verður góða barna- og ungdómslívið ikki sett í miðdepilin.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Væl virkandi yvirskipað eftirlit og tryggjaðir óheftir kærumøguleikar, har spurnartekin ikki kann setast við gegni
- Fíggjarætlanin (budgettið) er ov stýrandi og avmarkandi í mun til raðfestingar av tænastum
- Vit skulu ikki gera fleiri skipanir og stovnar. Heldur færri, sterkari og betri samskipaðar
- Tað er ikki javnvág millum torgreidda lóggávu og mannagongdir og leiðslutilfeingið úti á stovnum
- Vit skulu endurhugsa komunala bygnaðin, lógarverk og fremja bygnaðarligar broytingar samsvarandi tí

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur, og minst møguligt skulu flyta millum skipanir orsaka av aldri
- Skapa yvirlit yvir hvørjar tænastur vera veittar til sama málbólk, og hvør fær onga tænastu, hetta fyri at tryggja meira skynsamar tænastur og at ongin "dettur niður ímillum"

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:**<br>Navn: |
|---|---|
| | **ODDAFÓLK:**<br>Navn: |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Skipað netverk og felags almenn leiðsla** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og økið *Gransking, dátur og talgilding,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og *Gransking, dátur og talgilding*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | |

# D - Arbeiðsborð 16 - Skipað netverk og felags almenn leiðsla

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**
Miðvíst at skipa ein einfaldan, gjøgnumskygdan, fakliga sterkan og burðardyggan bygnað tvørtur um land og kommunur, geirar og stovnar. Við skipaðum netverkum og felags almennari leiðslu verður dentur lagdur á at menna nýggjar samstarvspallar, leiðsluførleikar, karmar og rásarúm til tess at røkka felags málum og loysa loysa fjøltáttaðar systemiskar avbjóðingar.

**Avbjóðing**:
Nógv er skrivað í álitum um vantandi samskipan, grundleggjandi tungan bygnað millum land kommunur, ið eru ov nógvar í tali, stirvna, ótíðarhóskandi og geiraliga tronga lóggáva, avmarkaða fígging, sum eingin enn hevur megnað at broyta. Undir hesum kørmum verður góða barna- og ungdómslívið ikki sett í miðdepilin.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Væl virkandi yvirskipað eftirlit og tryggjaðir óheftir kærumøguleikar, har spurnartekin ikki kann setast við gegni
- Fíggjarætlanin (budgettið) er ov stýrandi og avmarkandi í mun til raðfestingar av tænastum
- Vit skulu ikki gera fleiri skipanir og stovnar. Heldur færri, sterkari og betri samskipaðar
- Tað er ikki javnvág millum torgreidda lóggávu og mannagongdir og leiðslutilfeingið úti á stovnum
- Vit skulu endurhugsa komunala bygnaðin, lógarverk og fremja bygnaðarligar broytingar samsvarandi tí

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur, og minst møguligt skulu flyta millum skipanir orsaka av aldri
- Skapa yvirlit yvir hvørjar tænastur vera veittar til sama málbólk, og hvør fær onga tænastu, hetta fyri at tryggja meira skynsamar tænastur og at ongin "dettur niður ímillum"

| | |
|---|---|
| **BÓLKALUTTAKARAR:**<br>Laila í Løðu, Fríða í Giljum, Alberta Mcloud, Gerhard Mikkelsen, Jórun Mccloud, Selma Dahl Erol, Durita Ljósstein, Regin Marnerson | **SKRIVARI:**<br>Navn: Ásla Leila B. Johansen<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Hjalmar Hansen |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Skipað netverk og felags almenn leiðsla** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Ásanna, at ongin stovnur kann gera nakað einsamallur. Hetta er nakað, vit eru noydd at vera fealgs um, tí avbjóðingarnar eru ov stórar.<br><br>Manglar ein orðstýrara/samskipara á økinum í Føroyum. Ein, sum tekur næsta stigið. Ein samskiparaleiklut.<br>Kontaktperson umframt ein frymil at ganga eftir, so tað ikki gerst persónstengt, men at tað er eitt og sama tilboð, ið verður veitt.<br>Gjøgnumganga frymilin.<br>Listi yvir allar kontaktpersónar hjá hvørjum einstøkum stovni, so familjan hevur yvirlit yvir hetta - lætta um hurðarnar.<br>Ein samskipara, ið kann ráðgeva familjuni hvar tey skulu venda sær.<br><br>Stýrisbólkur, har allir geirar eru umboðaðir. Samdir um endamálið, avklára uppgávu og ábyrgdarbýtið teirra millum.<br><br>Skipað netverk,<br>Nógvar seinkingar í skipanini, tí ein einstaklingur í eini skipan kann ikki venda sær til ein einstakling í einari aðrari skipan.<br><br>Formaliserað samstarv millum stovnar.<br>Td. Lærari tørv á ráðgeving frá Sernám, so møguleika fyri at venda sær til ein beinleiðis.<br><br>Hvussu ger man áðrenn foreldur koma í truplar støður? Syrgja fyri at allir stovnar hava somu trivnaðarætlan, somu mannagongdir tá td. Er tørvur á ráðgeving osfr.<br>Hvussu lætta vit um meðan vit bíða.<br>Einføld amboð, sum stovnarnir og starvsfólkini kunnu brúka.<br>------------------------------------------<br>Gestir:<br>Hvat niveau horyur samskiparin til? Hvat økið er hann starvssettur í? Kann hann yvirrula land/kommunu? Hvat mandat hevði hann havt? Hvør skuldi givið honum mandatið? Hhvar skuldi hann verið starvssettur?<br><br>Eitt er barnalóg, men hvat við, at barnið er partur av eini familju? Um barnið gerst tann berandi, hvat so við familjuni? Td. Eitt barn hevur avbjóðingar, so kann tað fáa hjálp, men onki tilboð er til systkini, ið eisini eru ávirkaði av, at hava systkin, ið hava avbjóðingar.<br><br>Man hevur ein starvsfólkabólk (gigni), ið longu hevur fingið mandat frá familjunum til at koma inn til heimið at ráðgeva og vegleiða. Brúka hesi starvsfólk enn meira.<br><br>Foreldraundirvísing, ella undirvísing í bólkum fyri foreldur.<br><br>Nýtist ikki einans at vera ein ávísur fakbólkur, ið hevur hendan leiklutin.<br>Hvussu kunnu vit gagnnýta tað samstarvið, ið longu er. Uttan at hetta skal føra til eina fráboðan. Fáa tað meira fra, at foreldur hava møguleika fyri at tosað við AKT lærara ella SSP lærara á skúla, umframt heilsufrøðing.<br>Ungdómshús og frítíðarskúlar skulu vera betri umboðaðið.<br>Hvat kunnu vit gera, so vit ikki einans belasta ein fakbólk. |

| | |
|---|---|
| | |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Fáa eitt netverk upp at standa kann viðvirka til, at øll fáa eitt felags mál og eina felags fatan.<br>Hava ymsar lóggávur at fyrihalda okkum til. Nyttar ikki at fáa ein samskipara á økið, um økið enn er so stirvið í lógarverkinum.<br><br>Netverk, sum kann skapa flexibilitet.<br><br>Ofta at starvsfólk í einum stovni, ikki vita hvør er rættasti stovnur at venda sær til/ella at venda foreldrunum til.<br><br>Opna upp við tagnaðarskylduni millum stovnar – har tað gevur meining. Td. Millum dagstovn/lsh/bvt. Kunnað um at foreldini kunnu geva samtykki til at deila upplýsingar.<br><br>Stovnarnir stýra meira, so tað ikki eru tey resourrsusterku foreldini, ið stýra stovninum og skipanini. Tað eru ikki tey foreldrini, ið stríðast, ið koma fram til at stýra.<br><br>Fakligheit kann eisini spenna bein fyri, at onnur kunnu luttaka við.<br>Flexibilitetur ímun til fakligheit. Verðin er eisini til uttanfyri kl. 8-16 - frítíðarfealgsskapir, kirkja osfr.<br>Fakligheit, ið gevur pláss fyri teimum við einum góðum hjarta.<br><br>Fara frá samskipa til at samskapa nakað.<br><br>Vinsemismenta, ið tryggjar, at vit taka øll við inn í felagsskapin.<br><br>Ráðgeving foreldur til foreldur (børn við avbjóðingum). Foreldrini ynskja, at stovnurin fær somu ráðgeving, men stovnurin sigur nei, tí Sernám eigur at ráðgeva stovnunum. Tryggjar ikki, at øll fáa somu ráðgeving, ið eru rundan um barnið.<br>Hvør er í sentrum? Er tað barnið, tá ið vit tosað so?<br><br>Um hvør flokkur telur 24 næmingar, so ber ikki til hjá lærarum at hava 24 ymisk sentrum í sama flokki. Øll hini børnini hava eisini síni rættindi, ið skulu røkjast.<br><br>Ein stuðul er settur inn í flokkin fyri at hjálpa skipanini at halda fram við at liva uppá sama hátt.<br><br>Hvr er markið millum okkara stovn og annan stovn. Hvar er markið millum okkara stovn og frítíð.<br><br>Eru ov fastlæst í okkara egnu skipan og okkara egna lógarverk.<br><br>Skulu vit halda fast í okkara kassum ella skulu teir brótast burtur? Skulu vit hava BVT, Sernám, AV, skúlar á henda hátt. Er tað viðvirkandi til avbjóðíngarnar á økinum?<br>----------------------------------------<br>Gestir: |

| | |
|---|---|
| | Hvussu kunnu vit tryggja, at man fær eina óhefta ráðgeving, ið ikki hoyrir til BVT ella AV ol.<br>Hvønn kann eg venda mær til, sum tryggjar at foreldur fáa betri yvirlit yvir tænstur.<br>Í DK ber til at keypa sær óheftar sosialráðgevar ol., um man ikki hevur yvirskot til at luttaka í netfundum og annað.<br>Eitt sindur ala Føroysk rættarhjálp.<br><br>Fleiri stovar heftir saman, so ráðgevingin er breið.<br>Felags yvirlit.<br><br>Tíðliga uppsporing.<br><br>Stovnarnir hugsa meira um familjuna og ikki um sín stovn. Styrkja generella foreldraleiklutin. Ansa eftir, at man ikki tekur ábyrgdina frá foreldrunum.<br><br>Aftaná 8-16 skipað fyri óheftari foreldraráðgeving umvegis telefon.<br><br><br>For nógvir geirar og kassar. Ov langir listar yvir yvir stovnar.<br>Ikki einans leggja ein stovn afturat. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Lóggávan.<br>Skapa størri fleksibilitet millum skipanirnar.<br><br>Samstørv og samskapan.<br>Samskipanarráð, ið hevur til endamál at samskapa ein felagsætlan fyri familjuna ella stovnarnar. Eina felags hurð at fara inn.<br>Riggar oftast betur á smærru økjunum at fáa samstarv í lag millum fleiri einstakar stovnar.<br><br>Arbeiða við barninum í familjuni. Ber ikki til at hava eina hugsan um einans at arbeiða við barninum. Eitt barnalív byrjar ikki, tá ið børn gerast 7 ár.<br><br>Fakbólkar tosa betur saman.<br>Felagsmál okkara millum.<br><br>Nýggjar lógir, ið fylgja rákinum í dag.<br><br>Hvør skal vera við í eini tílukum ráðið - hvør velur umboð?<br>Hvør er toppurin? Tann, ið kann taka avgerðirnar.<br><br>Tryggja, at vit hava eina relatión til hvør einstakt barn. Serliga samskiparin, ið skal tryggja, at øll rundanum ganga í takt.<br><br>----------------------------------------<br>Gestir:<br>SSP økir runda í økinum, ið hava ein samskipara.<br>TÍTT er amboð, ið kann nýtast til at skapa felags mál og felags fatan. |

| | |
|---|---|
| | Heilsusjúkrasystrarnar fóru úr SSP. Kundi tað hjálpt, at fingið tær inn aftur? Skuldi SSP samstarvið verið eftirmett?<br><br>Forbetra tað, ið er. |

| Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Samskiparaleikluturin ísmb. Við Íslands modelli – gevur frírúm til at at starvsfólkini fáa tíð til uppruna arbeiði aftur.<br><br>Flokkslærarar niður í tíð (0,8) fyri síðani at nýta rest tíð til at vera samskipari (0,2) hjá næmingunum í sínum flokki. Tað sama við námsfrøðingunum í dagstovni.<br><br>SSP samstarvið kann byggjast meira uppá. Er tað granska í um hetta veruliga riggar? Hvat riggar her? Sita tey við somu avbjóðingum? Siga øll í SSP samstarvinum, at tað riggar?<br><br>Krevur hetta eina lóggávu broyting ella kann tað bara vera ein hugburðsbroyting, ið skal til? |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1) Seta ein samskipara, ið ber familjuna fram á mál. Hvussu finna vit fram til hvør skal vera samskipari? Lættari atgongd til viðgerðir, ið hvørt barn hevur rætt til, tá ið tey fáa eina diagnosu (td. Ergoterapeut). Hyggja eftir hvørji tilboð eru, og seta orð á hvørji tilboð eru í núverandi støðu innan øll økir, so kunnleikin til hvørt økið gerst betri. Fleiri stovnar veita sama tilboð í dag, men eru ikki tilvitaði um hetta. Seta eina pilot verkætlan í gongd her og nú, og lata eitt ávíst økið fremja broytingina, sum landið kann læra av og sum kann vera implemitera aðrastaðnis. Gera kanningar av tí, sum er frammanundan – hava tørv á fleiri kanningum á økinum í Føroyum. Arbeiða við foreldrunum á øllum løgum - fara til føðifyrireiking, men bjóða ikki familjufyrireiking. Familjan møtir serfrøðini áðrenn tey koma innum stovnsgátt. Hvørjar "løðistøðir" kunnu vit seta aftur í verk? Fyrr vóru ommurnar í vindeyganum og høvdu døgurðan kláran. Børn kundu koma inn til "løðing" - hetta er ikki til meira.<br>2) Ráð, ið umboðar tey ymisku økini. Mannað av millumleiðarum. Stýrisbólkur settur omanfyri, ið tekur avgerðirnar. VIt hava tørv á nøkrum medalju-søgum her og nú, sum geva íblástur og kveikja. Fáa Gigna inn aftur á dagstovnarnar. Vitanardeiling millum sotvnarnar, perspektivskiftir millum stovnarnar, kenna skipanirnar hjá hvørjum ørðum.<br>3) Um hetta er eitt politiskt ynski, so mugu pengar setast av til at fremja hetta, og til at seta fleiri starvsfólk. Gera vit tað, ið vit egentliga halda, at vit gera? Gera nakrar royndir fyrst, og annars |

| | |
|---|---|
| | lóggáva samstundis sum man fremur, so tað ikki takur ov langa tíð at gera lóggávuna. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Lata eina pilotverkætlan fara í gongd í einum økið í landinum, og unna teimum at fáa ser-treytir í eina tíð.<br>Møguliga ein kommunulækni, ið visiteraði til hinar stovnarnar.<br>Kann man byrja fyrr? Familjufyrireiking td. |

# D - Arbeiðsborð 17 - Skipað netverk og felags almenn leiðsla

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir

B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi

C. Gransking, dátur og talgilding

D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla

E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**

Miðvíst at skipa ein einfaldan, gjøgnumskygdan, fakliga sterkan og burðardyggan bygnað tvørtur um land og kommunur, geirar og stovnar. Við skipaðum netverkum og felags almennari leiðslu verður dentur lagdur á at menna nýggjar samstarvspallar, leiðsluførleikar, karmar og rásarúm til tess at røkka felags málum og loysa loysa fjøltáttaðar systemiskar avbjóðingar.

**Avbjóðing**:

Nógv er skrivað í álitum um vantandi samskipan, grundleggjandi tungan bygnað millum land kommunur, ið eru ov nógvar í tali, stirvna, ótíðarhóskandi og geiraliga tronga lóggáva, avmarkaða fígging, sum eingin enn hevur megnað at broyta. Undir hesum kørmum verður góða barna- og ungdómslívið ikki sett í miðdepilin.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Væl virkandi yvirskipað eftirlit og tryggjaðir óheftir kærumøguleikar, har spurnartekin ikki kann setast við gegni
- Fíggjarætlanin (budgettið) er ov stýrandi og avmarkandi í mun til raðfestingar av tænastum
- Vit skulu ikki gera fleiri skipanir og stovnar. Heldur færri, sterkari og betri samskipaðar
- Tað er ikki javnvág millum torgreidda lóggávu og mannagongdir og leiðslutilfeingið úti á stovnum
- Vit skulu endurhugsa komunala bygnaðin, lógarverk og fremja bygnaðarligar broytingar samsvarandi tí

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Tillaga skipanir og lóggávu, so børn og ung fáa samanhangandi tænastur, og minst møguligt skulu flyta millum skipanir orsaka av aldri
- Skapa yvirlit yvir hvørjar tænastur vera veittar til sama málbólk, og hvør fær onga tænastu, hetta fyri at tryggja meira skynsamar tænastur og at ongin "dettur niður ímillum"

| **BÓLKALUTTAKARAR:**<br>Jóhan, Vagn, Piotr, Elin, Jónleyg, Magni | **SKRIVARI:**<br>Navn: Vagn Foldbo<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Rúni Rasmussen |
|---|---|

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Skipað netverk og felags almenn leiðsla** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | - Felags mál fyri økið í ymiskum geirum<br>- Leiðslan má hava tíð til at samstarva við aðrar geirar, so vit hava eina meira holistiskan fatan av málum<br>- Gera samstarvsavtalu við ymsu partarnar, so tað verður formaliserað hvat ymsu partarnir vænta av hvørjum øðrum<br>- Betri samstarv millum ymsu geirarnar |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | - Betri uppfylging av málum<br>- Betri skipan av samstarvi millum geirar<br>- Ábyrgdarbýti millum land og kommunu<br>- Tagnarskylda kann forða vitanardeiling<br>- Diagnosur skulu ikki verað eitt krav, fyri at fáa hjálp<br>- Samskipa innsatsir<br>- Samstarva við foreldrini<br>- Vantar ein toghaldari<br>- Leiðslan skal samstarva betri (frítíðarskúla/fólkaskúla)<br>- Málsøkið flytir møguliga fyri hvørt val |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | - Betri vitan um onnur fakøki, so fleiri ikki gera tað sama. Møguliga møtast til vitanardeiling<br>- At politikarar ikki blanda seg í ítøkiligar fakligar metingar hjá fakfólki<br>- |

Gera ov lítið við gransking

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Skipað netverk og felags almenn leiðsla* og *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | - Gera ov lítið við gransking, men vit hava dataini (journal-skipan)<br>- Upplýsingarnir fylgja ikki við frá t.d. barnagarði til skúla<br>- Vitan verður mist, hvørja ferð eitt barn skiftir stovn (samtykkisváttan?)<br>- Vit hava brúk fyri einum samskipara í barnamálum<br>- Minnast til foreldrini í málinum<br>- Leiðarar í øllum stigum skulu fremja viðkomandi broytingar<br>- 1. Førleikamenning av samskiparum<br>- 1. finna pilot-økir |

.

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Óavmakað fíggjarligt tilfeingi til børn og ung<br>2. Miðsavna og samskipa allar innsatsir viðv. børnum og ungum |

## E - Arbeiðsborð 18 - Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Málið er at seta rættstundis og breitt inn við teimum burðardyggu og tvørgeiraligu átøkum, sum skulu til fyri at skapa munadygg tilboð og karmar. Soleiðis verður tryggjað, at møguligar avbjóðingar og vandamál verða eyðmerkt og handfarin rættstundis grundað á samstørv tvørtur um fakmørk, stovnar og tilboð.

**Avbjóðing**:
Vantandi rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð hava ógvusligar avleiðingar við sær. Trýstið á sertænastur so sum Barna- og ungdómspsykiatri, Sernám, Almannaverk o.a. er alsamt vaksandi. Bíðilistar til útgreining og serviðgerð leingjast alsamt, og somuleiðis eftirlýsa børn, ung og familjur, at ymisku tilboðini verða samskipað.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Tykist vera alt fleiri børn og ung við sálarligum avbjóðingum og støðurnar tykjast tyngri og álvarsamari
- Tað eru torgreiðar og umhvørvistreytaðar orsøkir, ið hava skapt eina avbjóðing. Tískil eru tað ikki skjótar ella einfaldar loysnir, ið skulu til fyri at broyta støðuna, men neyvar ætlanir, fíggjarlig raðfesting, áhaldandi uppmerksemi og áhugi frá teimum, ið hava ábyrgd av børnum og ungum
- Ein burðardygg tilgongd fevnir um eina nærlagda leiðslu av tilfeingi í breiðastu merking fevnandi arbeiðsmegi, langtíðar haldbari í mun til menniskjanslig, fíggjarlig og umhvørvislig viðurskifti

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Børn, ung og familjur teirra, ið eru í torgreiddum støðum, eru noydd at brúka orku sína upp á skipanirnar
- Skipað útgreining av børnum á ein skynsamari hátt við minst møguligari bíðitíð, so at barnið ikki dettur niðurímillum
- Betri samskipan á tvørgangandi tænastum og at tær verða íverksettar í mun til viðgerðarætlanina

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Ninna Reinert Simonsen , Sinnisbati<br>Minna Sólfinnsdóttir, Sinnisbati<br>Gunnhild Persson, Sinnisbati<br>Óluvá Gunnarsdóttir, Gigni<br>Gudrun Nolsøe, LMR<br>Herdis Ludvig, Barnadeildin<br>Susie Guttesen, Føðideildin<br>Salua Manai, Margarinfabrikkin, Lopfjølin | Navn: Rúna Tausen<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Alisa Hammer |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

| |
|---|
| Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Fokus á kvalitet. Vegleiða og stuðla, longu tá børnini eru smá.<br>Dømi: Í Tøkum Tíma, har sett verður inn tíðliga. Deilt verður upp við litum, alt eftir hvussu avbjóðingarnar síggja út. Málið flytist alt eftir hvussu tørvurin er. Fundirnir eru væl skipaðir.<br>Fylgja barninum frá graviditeti til tað er 18 ár. Dømi frá Grønlandi - samanhangur, kvalitetur og tryggleiki.<br>Gigni fer ov skjótt úr familjuni. Gigni samlar nógv tilfar inn, hvat til...<br>Skotska og Íslendska modellið líkjast, men onkrir veikleikar eru við tí skotska.<br>Tað kundi verið ein hurð, har arbeitt varð við foreldraførleikanum. Har arbeitt verður við at fyribyrgja, so tað ikki verður barnaverndarmál.<br>Tá seint verður sett inn, kemur stórur partur av tí fíggjarliga at liggja hjá kommununum.<br>Hevur eitt barn skúlaaftran, er eingin heilsusystir inn yvir, tá 9. flokkur er liðugur. Hesi fara mest sannlíkt ikki á miðnám. Tey detta úr øllum skipanum.<br>Úti á økinum eru fakfólk, sum eru skjót at síggja tørvin, hesi hava tó ongastaðni at venda sær. Ynskiligt hevði verið at tað var onkur at venda sær til áðrenn BVT kemur á banan. Tað verður ov dýrt, ov ringt osfr.<br>Millumligið manglar.<br>Tvørgeiraligt, lág gátt. Tíðliga innsats.<br>Tilstrekkilig hjálp til tilstrekkiliga tíð.<br>Skipa samstarv ímillum dagstovn og skúla. Hetta er ymiskt frá stovu til stovu, skúla til skúla osfr. Náttúrlig yivirgongd, so man er skjótari at fanga.<br>Hugsað barnið frá 0-18 ár. Hvat er tíðliga uppsporing.<br>Hava fokus, soleiðis at man sær tørvin, hvør á sínum øki - og saman. At mann allatíð kann venda tingunum, soleiðis at man kann lofta, um barnið t.d. fær angist.<br>Sárbærar og diagnostiseraðar mammur fáa eisini børn. Hvussu kunnu vit tryggja hesi børnini, við at taka hond um mammuna og pápan...<br>Allatíð hava eitt tvørfakligt eyga á familjuna og barnið.<br>Hvussu kunnu vit hyggja meir yvirskipað, so tað ikki sleppur at vera glopp ímillum skiparnir.<br>Í DK er krav at tað er ein yvirliveringsfundur millum barnagarð og skúla.<br>Formalisera yvirleveringina.<br>Tað kann vera ein trupulleiki, at foreldur ikki kunnu fáa innlit í ávís umráði hjá sínum barni, tá tað er 15 ára gamalt.<br>Skott ímillum geirar er ein trupulleiki. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og økið *Gott barna- og* | Hevur barnið brek, er brúk fyri at tað hevur eitt stað at fara.<br>Mangla faklig toymir.<br>Eftirmeting.<br>Vit hava brúk fyri at fleiri toymir vera sett á stovn, við kompitentum fólkum. Sum nú er, er alt ov sárbart. Balastningurin á økjunum er ov stórur. Av tí at man setur ov seint inn, gerst tað for dýrt. BVT vil fegin, men hevur ikki altíð so nógv at bjóða. Øll eiga at fáa somu hjálp uttan mun til, hvar í landinum |

| | |
|---|---|
| *ungdómslív,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | man er. Lógin sigur at man skal seta inn... BVT átti at verið líka um alt landið.<br>Eftirlit átti at verið á økinum.<br>Barnið skal hava meiri rættindi. Tað skal setast inn, tá t.d. jarðarmóðurin boðar frá.<br>Eitt faktoymi, sum kann taka avgerðir átti at verið sett á stovn.<br>Sosialráðgevin er samskipari, men heilsufrøðingurin, sosialpedagogurin, ljósmóðurin, sálarfrøðingurin osfr mangla.<br>Dømir um børn við autismu har avgerð er um at barnið ikki kann vera heima, men eingin kann taka ímóti. Um talan er um diagnosu, foreldraførleika og psykiatri, hjá sama barni, sigur eingin seg eiga bóltin.<br>Hvør eigur ábyrgdina, tá barnið hevur skúlaaftran. Børnini vera verandi heima, hvør eigur ábyrgdina...<br>Dømi um stóran skúla, har bara ein heilsusystir er. Her er brúk fyri fleiri og møg sálarfrøðingi.<br>Vit tosa nógv um tá trupulleikin er blivin ov stórur.<br>Dømir úr DK nordic 024, har man setur barnið í fokus. Í Finnlandi hevur man t.d. fleiri kreativ fak, har barnið fær kensluna at eydnast.<br>Skal man seta fleiri fakbólkar inn, er skúlin eitt gott stað at byrja, tí har eru øll børn.<br>Barnasýnið er eisini av stórum týdningi. Verður barnið sæð sum trupulleikin?<br>Hevur ein kollegi eitt barn við eini avbjóðing, skal tað takast í størsta alvori og lurtast skal eftir.<br>Øll børn mugu síggjast við somu brillum.<br>Fáa fakkunnleikan inn í Gigni.<br>Vera betur til at lurta eftir foreldrunum. Tey vita ofta at eitthvørt er galið.<br>At sami stovnur fylgir barninum allan vegin. At man tekur heildina. Í barnakanningum hevur man fokus á tað fysiska og ikki tað sálarliga.<br>Innsatsurin eigur at vera tvørfakligur.<br>Møgulig Gigni ikki skal sita á øllum.<br>Fakfólkini skulu saman vísa foreldrunum hvar tey kunnu fara.<br>Tað skal vera nemt hjá brúkaranum.<br>Foreldur skulu ikki ígjøgnum allar møguligar skiparnir, heldur vísa beinleiðis til tær tænastur, sum eru viðkomandi fyri familjuna.<br>Á normaløkinum skal man í t.d. førleikastovuni duga at seta inn við ymiskum amboðum sum kunnu vera við til at fyribyrjga. Sum dømi kann nevnast strukturur, sum kann vera ein stór hjálp fyri nógv børn. Tað kann vera at barnið víkir eitt sindur frá, men kanska trupulleiki ongantíð verður so stórur, um man dugir at spotta og seta inn.<br>Byrja við einum grundnarrativi, har man hevur virðing fyri fakøkinum hjá hvørjum øðrum og útbyggja tað. Deila upp í trý, tey sum hava ein serligan tørv og brúk fyri hjálp, tey sum hava brúk fyri eitt sindur av hjálp og tey sum klára seg.<br>Førleikamenning av starvsfólkum á dagstovni og skúla.<br>Umráðandi at foreldrini verða tikin við uppá ráð. Lurta eftir tí sum tey siga, tey kenna barnið.<br>Gera nakað við tann berøringsangst, sum er fyri teimum foreldrunum, sum ikki orka ella megna at møta á fundi osfr. Verða betur til at uppsøkja hesi og spyrja inn til, so man fær tey við. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** |
|---|

| | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Ein hurð. Amboð sum øll brúka.<br>Tagnarskyldan er fyri at gera nakað gott, og skal ikki vera eitt órógvandi moment. Um sami myndulleiki er inni allan vegin, var hetta ikki ein forðing. SSP hevur gjøgnumskygni í samband við hetta, kanska man kundi brúkt tann leistin.<br>Familjuhús, har øll sita sama stað ella møta inn. Lágátta, har man kann førleikamenna. Vera ikki mál, men registrera longu meðan mamman gongur við barninum. Verða styrkt í foreldraførleikanum frá byrjan. Má vera lógvarfest.<br>Í Tórshavnar kommunu er skúlasosialráðgevi, sum kemur út á allar stovnar. Mál verða tikin upp og sosialráðgevin ráðgevur í mun til tað.<br>Tað idella hevði verið, at heilsufrøðingur, sosialpedagogur, sosialráðgevi, sálarfrøðingar osfr vóru inni á skúlanum. Lærarin hevur nokk við at undirvísa.<br>Aðrastaðni er lærara og pedagogskúlin saman. Á summum skúlum var ætlanin at námsfrøðingar skuldu vera inni í øllum flokkum, men mangul uppá námsfrøðingar gjørdi hetta ikki møguligt.<br>Eitt vit kunnu gera við tað sama er, at hava virðing fyri fakøkinum hjá hvørjumøðrum. Arbeiða út frá sama útgangspunkti, sum er barni.<br>Gigni broytast til at allar barnakanningar fyriganga í Gigni og at Gigni kann ávísa uttan um kommunulækna. Fáa sálarfrøðing inn í Gigni.<br>Styrkja verandi skipanir.<br>Meira fokus á dagstovnaøkið.<br>Taka hond um langa bíðilistan í Barna- og ungdómspsykiariini. Seta alt inn fyri at fáa bukt við hann. Gera eina vekætlan, har man tekur støði í bíðilistanum á psyk. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Burðardygg loysn, empower av allari familjuni, børn mugu síggjast við somu brillum. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og *Gott barna- og ungdómslív*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Heilsusystirin kann fylgja við longu undir graviditetinum. At heilsusystirin heldur fram við at fylgja familjuni. Møguliga koma á heimavitjan einaferð um árið. Hava ergo-, fysio- og aðrar specialistar innan ymisk øki í Gigni. Tæt samstarv við BVT. Gera nakað við manglandi virðingina fyri ymisku fakbólkunum. Ein hugburðsbroyting. Meira holistiskt hugsjón soleiðis at tað ikki verður persónstengt. Kanska hetta kundi verið integrera í útbúgvingarnar í Føroyum. Møguliga lógarásett. Sett inn í skúlagarðinum, t.d. námsfrøðingar sum arbeiða í ungdómshúsum og frítíðarskúlum, arbeiða ikki fyrrapartar, og kundu verið um børnini í skúlanum.<br>2. Møguliga okkurt av tí sum verður gjørt í Íslandi kundi verið gjørt her. Tað má tó tillagast føroysk viðurskifti. Umhugsa at fáa felags útbúgving til lærarar og námsfrøðingar. Sjúkrarøktarfrøðilesandi |

| | |
|---|---|
| | kunnu vera við í undirvísingarhølinum, tá talan er um felags fak - samstarvslæra.<br>3. Politiskan vilja, fígging má til. Onkur má yvirskipað hava ábyrgdin. Hugburðsbroyting og vilja til at gera hetta arbeiði betur. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Samskiftis og evalueringsamboð sum minna um TÍTT, soleiðis at man kann meta um støðuna hjá barninum. Heilt upp í miðnám. Yvir alt landið.<br>2. Tilboð til foreldur.<br>3. Dømi úr Norra har tú sum fakfólk kann átaka tær at arbeiða frívilligt. T.d. hava samrøðu við ein ungan, evt brúka eitt sindur av tíð við viðkomandi.<br>4. Sosialráðgevar inndraga dagstovnar og evt heilsusystir...<br>5. Ein hurð frá føðing til 18 ár. Fólk innanfyri kunnu leiða tey til rætta tilboðið. Hvussu hetta skal kallast vita vit ikki...<br>6. Ein barnavernd við nógvum ymiskum fakligum førleikum, sum verður kvalitetstryggja. |

## E - Arbeiðsborð 19 - Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Málið er at seta rættstundis og breitt inn við teimum burðardyggu og tvørgeiraligu átøkum, sum skulu til fyri at skapa munadygg tilboð og karmar. Soleiðis verður tryggjað, at møguligar avbjóðingar og vandamál verða eyðmerkt og handfarin rættstundis grundað á samstørv tvørtur um fakmørk, stovnar og tilboð.

**Avbjóðing**:
Vantandi rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð hava ógvusligar avleiðingar við sær. Trýstið á sertænastur so sum Barna- og ungdómspsykiatri, Sernám, Almannaverk o.a. er alsamt vaksandi. Bíðilistar til útgreining og serviðgerð leingjast alsamt, og somuleiðis eftirlýsa børn, ung og familjur, at ymisku tilboðini verða samskipað.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Tykist vera alt fleiri børn og ung við sálarligum avbjóðingum og støðurnar tykjast tyngri og álvarsamari
- Tað eru torgreiðar og umhvørvistreytaðar orsøkir, ið hava skapt eina avbjóðing. Tískil eru tað ikki skjótar ella einfaldar loysnir, ið skulu til fyri at broyta støðuna, men neyvar ætlanir, fíggjarlig raðfesting, áhaldandi uppmerksemi og áhugi frá teimum, ið hava ábyrgd av børnum og ungum
- Ein burðardygg tilgongd fevnir um eina nærlagda leiðslu av tilfeingi í breiðastu merking fevnandi arbeiðsmegi, langtíðar haldbari í mun til menniskjanslig, fíggjarlig og umhvørvislig viðurskifti

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Børn, ung og familjur teirra, ið eru í torgreiddum støðum, eru noydd at brúka orku sína upp á skipanirnar
- Skipað útgreining av børnum á ein skynsamari hátt við minst møguligari bíðitíð, so at barnið ikki dettur niðurímillum
- Betri samskipan á tvørgangandi tænastum og at tær verða íverksettar í mun til viðgerðarætlanina

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Bjørg Dam – ADHD felagið - limur í Tórshavnar býráð<br>Rannvá Vang, Barna – og ungdómspsykiatari<br>Anna Elisabeth Iversen, sálarfrøðingur<br>Oddbjørg Johansen, Socialpsykiatri - AV<br>Ebba Øre - Barnverndartænastan í Havn og SSP<br>Beinta Johannensen Leiðari barnaverndartænastuni VEKS<br>Jónleif Johannesen, varaskúlastjórið - leiðari í skúlaleiðarafelagnum | Navn: Joan Knudsen<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Jónleif Johannesen |

| | |
|---|---|
| Joan Knudsen, BUMR<br>Vitjandi 2. umfar:<br>Jórun Mc. Leud – AV<br>Julianna Næs Olsen – Barnaverndarstovurin - eindarleiðari<br>Marjun højgaard - Barnaverndartænastan<br>Durita Ljóststein - AV<br>Hervør Jacobsen - Gigni | |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Vit ynskja at styrkja foreldrini, og á tann hjálpa børnunum.<br><br>Umráðandi við kunning, ráðgeving, fyribyrging og at seta inn so tíðliga sum møguligt. Foreldur stúra um børnini, og tilboðini megna kanska ikki at hjálpa.<br><br>Vit mangla eitt lággottartilboð í Føroyum, sum foreldur kunnu venda sær til av sínum eintingum, so tíðliga sum møguligt, uttan at tað er neyðugt at vera skrásett.<br>Foreldur, at børnum við serligum tørvi - mangla at fáa hjálp og vegleiðing, av fólki við eini fakligheit.<br><br>Foreldraleikluturin - Vit mangla eitt tilboð til foreldur, tá ið trupulleikarnir byrja at vísa seg. Tilboðið er hugsað sum fyribyrgingar átak. Tosað varð bæði um at, vit eiga at hugsa av nýggjum, samstundis sum eisini bleiv tosað um ikki at gera nýggja skipanir. Um tað ber til so umhugsað at knýta tilboðið í tær verandi kommunulu skipanirnar, ikki gera nýggjar skipnanir. Við at styrkja foreldrini, hjálpa vit børnini.<br><br>Upplýsing og fyribyring – at seta tíðliga inn – gransking í norðurjútlandi - tað ganga ca 5 ár frá at foreldrini byrja at stúra til man evt kann fáa hjálp frá fakligaheitini. Hvar skulu foreldrini fáa hesa ráðgeving? Í DK bjóða kommunurnur lággottar tilboð til undirvísing foreldru<br><br>Við at seta sálarfrøðingar í skúlarnar, so flyta vit avbjóðingarnar yvir á einstaka barnið, ístaðin fyri at hjálpa foreldrunum/familjuni við at hjálpa at takla avbjóðingarnar.<br><br>Tað er eitt paradoks - vit hava ongantíð brúkt so nógva orku uppá barnaøkið og mentan sum nú - og ongantíð fyrr hava børnini havt størri avbjóðingar enn nú. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og økið *Trivnaður, resiliensur og góðir* | Ráðgeving til foreldur– kunnu venda sær til av eintingum.<br><br>Foreldraskeið í øllum møguligum evnum td. skermnýtslu, at vera nýggj foreldur, børn við avbjóðingum o.a,<br><br>Kanska styrkt Gigni og læknakanningina (screening) |

| | |
|---|---|
| *felagsskapir,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Skipa okkum so at tað er 1 akkersfólk til barnið allan dagin frá kl 10-16 (relatiónssamband) - sum er, er tað avbjóðandi, tí tað eru fleiri geirar, sum hava ábyrgd - men eigur at kunnað verða loyst og samskipast.<br><br>TÍTT - at vitanin frá námsfrøðingunum kom víðari í skúlanum - yvið er um tagnaðarskylduna í hesum førum - men um foreldrini játtað, so er tað í lagið.<br><br>Vit mangla psykiatriska viðgerð. Bólkurin er ikki heilt samdur um hetta, nøkur meina at B&U brúka ov nógva orku uppá at útgreina og ov lítið til viðgerð og onnur meina, at umráðandi er at fáa raðfest bíðulistarnar alt fyri eitt.<br><br>Uppskot: Milliónir - ein persón úr tveimum geirum (byrja og so arbeiða síðuleypandi) - ikki ígjøgnum so nógvar geirar.<br><br>Uppskot: t.d at skipa Sernám í deildir (ymiskar meiningar í bólkinum - avbjóðing fyri fakligu dygdina um hon verður spjadd runt um landið)<br><br>itjandi 2. umfar<br><br>Skal geirin síggja út sum hann ger í dag? Vit hava ov alt nógv aðalráð, fleiri silo´ir - brúka vit pengarnar rætt?<br>Fleiri veita nøkulunda somu tænastu til somu børn, har so onnur onga tænastu fáa. Býti millum land og kommurnar eru ein avbjóðing.<br>Hugsar man børnini inn í nærumhvørvinum? Hvør lyftir upgávuna í nærumhvørvinum, um vit t.d. flyta tey í onnur økið landinum at ganga í skúla - tað er eitt dilemma, sum má koma við í roknistykki.<br><br>Barnafatanin – hava vit eina felags fatan<br><br>Puljan er eitt og lógin er eitt annað - geirarnar – tagnarskylda.<br><br>Í dag er tað blivin ein stór avbjóðing, at allar avbjóðingar verða sett í eina pulju. Tað verður ikki skilt ímillum stórar avbjóðingar og avbjóðingar í kanska eru tíðaravmarkaðir.<br><br>Kunning: í dag eru tað 29 børn umsorganaryvirtikin børn í búgva á barnaverndarstovnum í Føroyum, sum eru sett heiman - í Íslandi er tað í dag talan um 12 børn.<br><br>Boð uppá loysn: styrkja Gigni – eisini gera eina 3 ára kanning av øllum børnum. Gigni er einasti stovnur, sum kemur inn í so at siga øll heim í Føroyum. (ber til at takka nei).<br><br>Boð uppá loysn: SSP er eitt dømi um eitt forum, sum hevur lyft seg upp á eitt hægri stig – kanska kandi tann skipanin verið bygt út?<br><br>Boð uppá loysn: gera eina felags lóg - eina barnalóg - sambært Íslendska modellinum skal man ikki hava eina diagnosu fyri at fáa atgongd til hjálp.<br><br>Boð uppá loysn: allar nýføroyingar eiga at fáa tilknýti til ein kontaktpersón. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Loysn: Ráðgeving og upplýsing til foreldur: hjálp til at kunnu hjálpa børnunum. Uppskot: Samla fakligheitina á eitt stað, ein ráðgevingareind til foreldur at venda sær til, ymisk fakligheitur, tvørfakligt toymi. (tey flestu eru innan fyri eini frástøðu á 40 min, so tað eigur at bera til)<br><br>Loysn: at seta heildar familjutilboð á stovn- seta nógv fyrr inn í mun til familjurnar – so at trupulleikarnir ikki veksa og blíva til avbjóðingar.<br><br>Loysn: skipa tað so, at vit fáa eina heildarmynd av avbjóðingunum/loysnunum hjá barninum/tí unga. Uppskot er at seta eina felags upphædd av til barnøkið (AMMR; HMMR; BUMR) - breitt so at allir geirar mugu draga somu línu. Tryggja okkum so at ongin av undirliggjandi stovnunum hava vetorætt, til ikki at átaka sær at loysa uppgávuna. Somuleiðis er tð umráðandi at avgerðarrætturin, má vera til staðar á fundinum.<br><br>Uppskot at skipa serligu skúlatilboðini meira homogen, at samla “nakrar” avbjóðingar á ymsum skúlum, td. ADHD, autismu, skúlanoktan, angist<br><br>Hugskot: at skipa eitt kommunalt tilboð - opið hús, hvørja viku, har foreldra ráðgeving er til taks (uttan skráseting og avtalu). |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Barnarættindi - at seta ein samskiparara – at gera eitt ad hoc netverk – uml. 10 % av børninum hava avbjóðingar. Eisini umráðandi at hugsa um rættindini hjá barninum í skúlanum.<br><br>Lógarfesta - loyvið at samstarva millum fakbólkar/geiran<br><br>At gera sosialar kontraktir – so at børnini verða møtt, fylgd og stuðlað.<br><br>Diagnosir - møguleikin/rættin til loyvið at strika eina diagnosu<br><br>Javnseta – tað kognitiva og kropsliga inn í lógina - barnarættindi - rættin til at fáa atgongd til hjálp.<br><br>Trivnaður - børn sum trívast finna sunnar felagsskapir. Hvat við teimum, sum misstrívast. Hvør kann lofta hesi uppgávuna? Lærarnir, teir hava avmarkað tíð? Frítíðarkort? Onnur?<br><br>Vit hava torført við at hugsa heilt nýtt - vit royna at finna loysnir útfrá verandi støðu í dag. Kanska eiga vit at blanda alt av nýggjum nú vit hava høvið. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini | 1: Manglar tænastur - foreldraráðgeving (lag 2) nakrar av hesum tænastum mangla. Samla tænasturnar undir einum taki, so man fær eina dygd í tænastunum. “Klinik” - ein hurð. Tørvur er at hugsa av nýggjum. |

| | |
|---|---|
| *3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Tillaga skipanirnar so at tað er tørvurin, sum er avgerðandi ikki diagnosan, um barnið/foreldrini kunnu fáa eina tænastu ella ei.<br><br>Fremja eina hugburðarbroyting í samfelagnum. Vit eiga at hugsa um familjuna sum heild. Hava familjurnar við í loysnunum. Tey eru partur av loysnini.<br><br>Skipað kvøldskúlatilboð - styrkja forledraleiklutin og foreldraførleikan.<br><br>Tilfar á enskum til útlendingar, hvussu skipanirnar virka og hvagar tey kunnu venda sær.<br><br>Kontakpersón til nýføroyingar<br><br>3-5 ár:<br>Lógarverkið í síni heild. (Barnalóg, Sernám, Almannaverkið)<br><br>Tryggja okkum at øll børn í Føroyum hava ein vaksnan, sum tryggjar at tað hevur gott - "tidlig indsats" onkur í netverkin.<br><br>At skipa eina tvørfakliga eind við øllum viðkomandi tænastum - alt á einum stað við eini játtan. Vit eiga kanska at byrja í smáum - evt. gera verkætlanir runt landið. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Skjóta og góða hjálp til familjuna – kommunan viðkomandi aktørur<br>Raðfesta trivnaðin innan skúlagátt<br>Felags pulju til at veita hjálp til børn/familjur<br><br>Umhugsað allar skipanina sum hon er<br>Lággottartilboð<br>Umhugsað hvussu ráðgevandi fundktiónirnar kunnu hanga saman.<br><br>Familjuhúsið - spesialiserða familjuhúsið<br>Øll børn í Føroyum hava tað gott<br><br>Seta TÍTT í verk úti øllum dagstovnum og skúlum<br>Ein myndugleika, sum hevur felags visitaión til øll børn, bæði til smárar og stórar avbjóðingar<br><br>Økta normering í dagstovnunum og í skúlunum.<br>Tora at hugsa heilt nýtt, blanda kortini av nýggjum - takað støðið í barninum og hvørjar tænastur vit hava tørv á í landinum og síðani funnið útav hvør skal loysa hvat (sera nógv fakfólk verja borg) |

## E - Arbeiðsborð 20 - Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Málið er at seta rættstundis og breitt inn við teimum burðardyggu og tvørgeiraligu átøkum, sum skulu til fyri at skapa munadygg tilboð og karmar. Soleiðis verður tryggjað, at møguligar avbjóðingar og vandamál verða eyðmerkt og handfarin rættstundis grundað á samstørv tvørtur um fakmørk, stovnar og tilboð.

**Avbjóðing**:
Vantandi rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð hava ógvusligar avleiðingar við sær. Trýstið á sertænastur so sum Barna- og ungdómspsykiatri, Sernám, Almannaverk o.a. er alsamt vaksandi. Bíðilistar til útgreining og serviðgerð leingjast alsamt, og somuleiðis eftirlýsa børn, ung og familjur, at ymisku tilboðini verða samskipað.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Tykist vera alt fleiri børn og ung við sálarligum avbjóðingum og støðurnar tykjast tyngri og álvarsamari
- Tað eru torgreiðar og umhvørvistreytaðar orsøkir, ið hava skapt eina avbjóðing. Tískil eru tað ikki skjótar ella einfaldar loysnir, ið skulu til fyri at broyta støðuna, men neyvar ætlanir, fíggjarlig raðfesting, áhaldandi uppmerksemi og áhugi frá teimum, ið hava ábyrgd av børnum og ungum
- Ein burðardygg tilgongd fevnir um eina nærlagda leiðslu av tilfeingi í breiðastu merking fevnandi arbeiðsmegi, langtíðar haldbari í mun til menniskjanslig, fíggjarlig og umhvørvislig viðurskifti

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Børn, ung og familjur teirra, ið eru í torgreiddum støðum, eru noydd at brúka orku sína upp á skipanirnar
- Skipað útgreining av børnum á ein skynsamari hátt við minst møguligari bíðitíð, so at barnið ikki dettur niðurímillum
- Betri samskipan á tvørgangandi tænastum og at tær verða íverksettar í mun til viðgerðarætlanina

| BÓLKALUTTAKARAR: | SKRIVARI: |
|---|---|
| Petrina Nolsøe, Beinta Nørspang Davidsen, Klara í Túni, Oddvør Simonsen, Maria á Boðanesi, Tine Lyager | Navn: Sunrid á Borg<br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Erling Pætur á Argjagarði |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk** | |
|---|---|
| 1 )<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Fyrstu 1000 dagarnir eru týdningarmiklast í barnalívið, barnsburður og frameftir- seta inn við tiltøkum har familjuførleiki er í fokus og menna foreldraførleika<br>Mammur við barnsburðartunglyndi, tíðliga. Mamman tunglyndi, neiliga ávirkan á menning hjá barninum Bólk við sálarfr og heilsufrøðing.<br>1 ár barn er á stovnið- mugu vita hvat er hent áðrenn barnið kemur á stovn. Hava toymi á stovnunum sum tryggjar at barni hevur tað gott- bólk á stovnunum sum hevur ábyrgd at lofta tá avbjóðingar eru<br>Graviditeturin er týdningarmikil- Barnaverndarmál byrja ofta longu tá, børn við brekum og man veit frá føðing at tørvur verður. At LSH longu við føðing boðar relevantum instansum frá. Sos.ráðgevi á LSH er ov snævurt, foreldrini fáa ov stóra ábyrgd at samskipað. Fáa eitt slag av toymi, sum kann fanga avbjóðingarnar hjá familjuni beinaveg og vegleiða.<br>Lokalar námsfrøðiligar ráðgevingar eru eisini ein forðan fyri at td skúli og sernám eru fyrireika um málið, td tá barnið kemur í skúla. Manglar at vitan fylgir við td frá dagstovn til skúla. Óneyðugur trupuleiki at vitan um barnið ikki fylgir við.<br>Avbjóðing at tað í hvørjum førið skal uppfinnast djúpur tallerkur, at vit skulu hava hjálp sum liggur eitt stað, fáa lagt stovnar saman. TD sernám, barnavernd, almannaverk, soleiðis at lættari er hjá familjuni at finna hjálp ella finna hvør skal veita hjálp. Eina hurð!<br>SSP og BVT, vit burdu kunna havt nakrar samstarvsfundir td við sernám og Gigni. Múrurin sum er millum geirar/stovnar er bara ein múrur fyri hjálp til einstaka barnið. Kanska okkurt samstarvsforum 3 hvønn mðr.<br>Vitan um barnið dettur eisini niður ímillum systemini. Týdningarmikið at systemini eisini hava álit á hvør øðrum, hugsa hvat bindur okkum saman, heldur enn hvat skilur okkum sundur. |
| 2)<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Tagnarskyldan er ein forðing, td tá man ringir millum Gigni og BVT.<br>Avbjóðing td at ráðgeva familjum, sum hava børn við td ADHD tá eg ikki kann ráðgeva lærarum vegna sernám. Lærarar fá ráðgeving frá sernám og foreldur/barn fáa ráðgevingfrá AV. Tvs at tað ikki er samsvar millum ráðgevingina sum verður veitt um sama barn<br>Sama er galdandi í mun til td Barnaverndarmál, har AV veitur tilboð til barnið og BVT til foreldrini.<br>Standa børnini á rætta bíðilista, okkurt er galið við barninum, so vit vísa til psykiatriina. Vit gloyma familjuna, og at eftirhyggja hvussu støðan er í heiminum, relatiónin, strukturur,<br>Ofta er orsøkin til at barnið hevur avbjóðingar tvørgeiralig, tvs bæði diagnosa, men eisini væntandi stuðul til barni í heiminum.<br>Lággáttar tilboð eiga at seta inn, langt áðrenn amn kemur til eitt so álvarsligt inntriv sum BVT, psykiatri, sernám osv<br>Vegleiðing til familjur, áðrenn tað td verður eitt BVT mál.<br>Eitt tvørfakligt og tvørgeiraligt lággáttar tilboð.<br>Av tí at bíðitíð er til td útgreining, so er neyðugt at man hevur fokus á at bjóða onnur inntriv til familjurnar.<br>Ein stór avbjóðing er geirarnir, kommunalt/ land, Heilsumálaráð/ Almannaráð/ BUMR- hvør skal gjalda?, ella hvør kann sleppa undan at gjalda?...... og í síðsta enda er tað barnið sum kemur at gjalda hægsta kostnaðin... |

| | |
|---|---|
| | Òrímiligt at foreldrini skulu noyðast at taka støðu til um ey ynskja at fáa hjálp frá BVT, AV, psykiatriini ella....<br>Skiftini eru avbjóðing hjá serlgia familjum sum hava avbjóðingar td frá vøggustovu,<br>Trupuleikarnir í mun til sosialar kontraktir...<br>Ov nógvir geirar, ov vánaligt samskiftið, ov brotin tilboð til familjurnar |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Ymsiku geirarnir og fakini mugu tosa saman og fáa brotið teir múrarnir sum eru.<br>Netfundir, sum ikki bara snúgva seg bara um diagnosur kunnu broyta hetta og loysa upp fyri forstáílsi. Fokus á barnið, fakliga og á samstarv millum ymsu stuðulstænasturnar í málinum.<br>Tagnarskyldan skal ikki vera ein forðing fyri at barnið fær rættstundis hjálp, vit mugu vera tilvita um hvat tagnarskyldan snýr seg um og at foreldur skulu geva samtykkið til at at vit kunnu lata relevantar upplýsingar til aðrar relevantar samstarvspartar. At fakfólk eru betur ílatin í mun til hvat tagnarskyldan snýr seg um.<br>Hetta skal sjálvandi ikki misnýtast, og gerast við varsemi.<br>Samskiftið má loysast og ikki gerast trupulari enn neyðugt.<br>Málaráðini mugu verða meira stabil, sum nú er hoyra hesar familjurnar í flestu førum til 3 málaráð. Hetta elvir til óneyðga ørkymlan at skula finna runt í.<br>At vit fakfólk taka í egnan barm, og at vit eru opin fyri at royna samstørv av. Hvussu kunnu vit vera forvitin uppá hvat uppgávan hjá hvør øðrum er og bjóða okkum fram í mun til tað vit eru góð til. Hetta má ikki vera persónsbundið, men heldur bundi uppá fakpersónin.<br>Meira samstarvsfundir, niðurbróta fordómar, simplificera skipanirnar. Fá øll at draga somu línu og hava familjuna í fokus. Virða hvønn annan og ymsiku fakligheitirnar.<br>Bróta múrarnir millum td kommunu og land |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Nakað tað sama fylti í útumfarinum. Og at tað er ymiskt hvørji tilboð eru í ymsu kommununum. Kann eisini vera drepandi um tað er tað sama allastaðni, um man skal bíða eftir hvør øðrum.<br>Týdningarmikið at øll fáa sama grundtilboð.<br>Fáa allar upplýsingar inn á sama system, fáa effektevaluera alt samstarv. So verður lættari at byggja uppá tað sum longu riggar í Føroyum.<br>Týdningarmikið at støði verður tikið í tí sum longu er, at útgangspunkti er í praksis sum longu er.<br>Um man ikki kennir umstøðurnar, so gevur ikki meining at fara at granska.<br>Taka støði í tí eg sjálv geri, og fáa rætta inn í mun til tey eg samstarvi við.<br>Leiðsla má vera tilvita um hvussu man raðfestur og stuðlar undir menning<br>Týdningarmikið at allir interessentar fáa eigaraskap, og tað ikki bara verður ein leiðsluuppgava. |

| | |
|---|---|
| | Samskiftistrupullekar millum geirar fylla nógv, og hetta eigur at betrast beinaveg.<br>Samtykki og týdningurin av tí, fáa trivna heilt niður til viðgongutíð, barsil, lætta atgongd til upplýsingar um hvussu foreldur eiga at vera um barnið<br>Møguliga foreldrabólkar áðrenn føðing, at rusta tey til at verða foreldur. Í dag skal man sjálvur finna útav tí, í mun til fyrr tá td omman var innyvir og vegleiddi.<br>Kvinnur hava tað ikki nemt í Føroyum, hetta skapar stress. Umstøðurnar eru ikki nóg góðar. Um man td skipaði nemmari, at man kann byrja barsil, og ikki negativa ávirkan á lønarviðurskiftini hjá kvinnum<br>Ófleksibult samfelagsskipan, td at man skal avlevera barnið áðrenn ávíst tíðspunkt á dagstovn.<br>Lítið barn sum ikki trívist, foreldur velja at fara til ergoterapi. Ergo tilmælur at skriva barn á bíðilista til útgreining. Hetta verður støðufest í barnið at tú feilar okkurt og vit bíða eftir at fáa at vita hvør feilurin er. Tað verðu hugt ov lítið eftir hvussu familjan hevur skipað seg og um et aðrar avbjóðingar eru sum kunnu loysast skjótt. Vit hava ikki tíð at bíða og eygleiða hvat barnið evt reagerar uppá td í heiminum ella barnaansingini.<br>Hví halda foreldur at tey ikki megna uppgávuna sjálvi, tað er bekymrandi at ein mamma td ikki megnar at vera ensamøll innløgd á føðideildini. Nógvar sárbærar mammur, sum fáa heilivág fyri td tunglyndi, angist osv.<br>Vit eru nógv ávirkaði av td sosialu miðlunum og øll eru ekspertar í egnum lívið.<br>Eitt lággáttartilboð. Eina informatiónsheimasíðu, sum inniheldur vegleiðing í mun til allar avbjóðingar. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1) At man eftirhyggur dupultfunktionir. Og fær avvikla hesar. Vit vita kanska hvat hini gera, men hetta sleppur at halda á. Td fleiri funktiónir bjóða mentorskipanir....<br><br>2) Ein leiðsla yvir alt sum hevur við børn at gera. Land og kommunur mugu fáa greitt ábyrgdarbýtið. Og ikki hava dupultfunktión. Tað má lýsast. Langtíðarloysnir, sum ikki eru tengdar at *einum* landstýri ella *einum* kommunustýrið. Allir innsatsir skulu evaluerast. Foreldur mugu vera partur av loysnini. Ein paraply-organisatión. Hugburðurin til onnurf akfólk og trúgva uppá at øll møta inn við bestu intentión í mun til málið. Sleppa fordómunum í mun til systemið<br><br>3) Politiska systemið, og annars øll fakfólk á økinum. Allir instansir mugu spæla saman, og fáa víst á tær avbjóðingar sum eru í systeminum, og hvussu hesar kunnu betrast til gagns fyri einstaka barnið. |

**Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.**

| | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. At foreldur at einum barnið ið hevur tað trupult, hava eina hurð at fara inn ígjøgnum og har verða vegleidd víðari inntil tey hava fingið røttu hjálpina. Eina informatiónsheimasíðu, sum inniheldur vegleiðing í mun til allar avbjóðingar. Hetta krevur eina lægri gátt millum geirarnar<br><br>2. Teir ymisku stovnarnir/tilboðini forplkita seg til at samskifta til gagns fyri familjuna. Hugburðsbroyting<br><br>3. Skeið fyri øll sum eru ávegis at gerast foreldur, eins og tá ein skal ættleiða ella gerast fosturforeldur. Generelt betri umstøður til smábarnafamiljur, s.s. bústað, barsilsskipanin o.s.v. |

## E - Arbeiðsborð 21 - Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Málið er at seta rættstundis og breitt inn við teimum burðardyggu og tvørgeiraligu átøkum, sum skulu til fyri at skapa munadygg tilboð og karmar. Soleiðis verður tryggjað, at møguligar avbjóðingar og vandamál verða eyðmerkt og handfarin rættstundis grundað á samstørv tvørtur um fakmørk, stovnar og tilboð.

**Avbjóðing**:
Vantandi rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð hava ógvusligar avleiðingar við sær. Trýstið á sertænastur so sum Barna- og ungdómspsykiatri, Sernám, Almannaverk o.a. er alsamt vaksandi. Bíðilistar til útgreining og serviðgerð leingjast alsamt, og somuleiðis eftirlýsa børn, ung og familjur, at ymisku tilboðini verða samskipað.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Tykist vera alt fleiri børn og ung við sálarligum avbjóðingum og støðurnar tykjast tyngri og álvarsamari
- Tað eru torgreiðar og umhvørvistreytaðar orsøkir, ið hava skapt eina avbjóðing. Tískil eru tað ikki skjótar ella einfaldar loysnir, ið skulu til fyri at broyta støðuna, men neyvar ætlanir, fíggjarlig raðfesting, áhaldandi uppmerksemi og áhugi frá teimum, ið hava ábyrgd av børnum og ungum
- Ein burðardygg tilgongd fevnir um eina nærlagda leiðslu av tilfeingi í breiðastu merking fevnandi arbeiðsmegi, langtíðar haldbari í mun til menniskjanslig, fíggjarlig og umhvørvislig viðurskifti

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Børn, ung og familjur teirra, ið eru í torgreiddum støðum, eru noydd at brúka orku sína upp á skipanirnar
- Skipað útgreining av børnum á ein skynsamari hátt við minst møguligari bíðitíð, so at barnið ikki dettur niðurímillum
- Betri samskipan á tvørgangandi tænastum og at tær verða íverksettar í mun til viðgerðarætlanina

| BÓLKALUTTAKARAR: | SKRIVARI: |
|---|---|
| Ása V. Svabo<br>Anja Fríða Johansen<br>Klara Jákupsdóttir<br>Heidi Aagaard<br>Niels Juel Arge<br>Urd T. Traðará<br>---<br>Laufey Blaasvær<br>Anna Eikhólm | Navn: Jákup av Skarði<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Ása Olsen |

| | |
|---|---|
| Edny Poulsen<br>Alberta Mc.Leod Jacobsen<br>Tóra við Keldu | |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Altavgerandi við samstarvi eisini millum land og kommunu. Fíggjarkarmar ávirka nógv, hvussu og hvussu skjótt farið verður í gongd. Okkum tørvar eina greiða frágreiðing um hvussu arbeiðast skal. Børnini og tey ungu ganga aftur í fleiri geirum og tað manglar ein, ið heldur saman um tey tiltøkini, skipað verða - tað er slítandi fyri foreldrini upp í saman at skula halda fast í tiltøkum.<br>---<br>Umráðandi at vit alla tíðina hava í huga, at vit skulu rúma menniskjanum og ikki lata hurðar aftur. Seta fokus á “normala menning” og styrkja fakligheitina innan hetta økið. System-troyttheit er eisini, har fakfólk eisini møðast av at systemið er tungt. Vit mugu lata dyrnar upp og geva til kennar hvat vit hava við okkum til uppgávuna. Vit mugu eisini hyggja í onnur lond og læra av teimum tiltøkum, ið eydnast. Broyta hugburð og heldur hyggja at borgaranum og hvørjum tørvi borgarin hevur. Vit mugu lóggeva samstarv um “tað heila menniskjað”. Samskiparin (tovholdari) skal samskifta við ymsar stovnar og spyrja hvørja hjálp hini hava við sær til at loysa uppgávuna. Vit skulu eisini hava í huga starvsfólkarøkt og lofta troyttum starvsfólkum. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og økið *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Av tí at talan er um ymsar geirar, er ov ofta talan um at venda sær til nógv ymisk fakfólk, heldur enn at eitt fakfólk loftar uppgávuni og veit hvar arbeiðast skal við málinum. Ein avbjóðing er eisini, at drúgv tíð kann ganga har bíðað verður eftir málsviðger. Fígging er ikki sett av til eyka uppgávu at samskipa - tó at tað er lógarásett. Ein forðing okkara er, at diagnosa skal setast áðrenn arbeitt verður - og har er long bíðitíð.<br>---<br>Gera greiðar avtalur, soleiðis at vit hava orðingar at halda okkum til og samstarv, ið vit ikki kunnu leypa frá. Politiska lyftið um samstarv má síggjast aftur í lógum. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Skapa eina sosiala kontrakt, har vit avstemma hvørjar uppgávur eru hjá hvørjum. Seta samskipara, ið kann halda fast í ymsu fyriskipanirnar. Seta meira orku inn á barnagarðsøkinum, soleiðis at avbjóðingar verða loftaðar tíðliga. Førleikamenna starvsfólk til at síggja avbjóðingar og at duga at lofta uppgávuni, soleiðis at arbeitt verður áðrenn talan verður um barnaverndarmál.<br>---<br>Samantvinna rættindi og lógarsmíð. Okkum tørvar eina eind, ið heldur eygað við rættindini hjá okkum øllum. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** |
|---|

| | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Tann góða tilgondin var gott átak, men t.d. er Sernám broytt um somu tíð og átti at verið “forvæntnings-avstemmað”. Í onkrum førum kann tað vera meira meiningsfult at søkja eftir ergoterapeuti heldur enn námsfrøðingum. Vit skulu lyfta í felag. Gott at styrkja samskiftið millum barnagarð og skúla. Bíðilistar eru stór avbjóðing. Hvussu kann setast inn, áðrenn diagnosa er sett? Fíggjarkarmarnir er stór avbjóðing. Nýta eina felags skipan, ið savnar vitan og til ber at granska í. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og *Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Í øðrum londum er ein “mannarættinda-eind”, ið ein kann venda sær til, at t.d. barnarættindasáttmálin verða hildin. Møguliga kann slík eind hjálpa, tá ið mál dettur millum barnavernd og almannaverk. “Tann góða tilgongdin” hevur “tovhaldarar”, men ikki myndugleika at seta tiltøk í verk.<br>Lóggávur mugu endurskoðast og samskipast. Vónin er, at okkurt munagott spyrst burturúr hesum tiltaki. Hugaligt, um persónur verður settur í starv, at lofta avbjóðingini og dugir at venda avbjóðingini á rætt stað.<br>Skilagott íslendskt tiltak, at lofta avbjóðingum tíðliga, áðrenn málini verða ov stór - og gerast barnaverndarmál. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1) Broytt skipanina og sett fígging inn á barnagarðs- og skúlaøkið, eins og í Íslandi, soleiðis at fakfólk kunnu lofta avbjóðingum tíðliga.<br>2) Styrkja psykiatri’ina.<br>3) Styrkja samstarvið millum kommunu og land.<br>4) Lata dyrnar upp, at fakfólk kunnu fara inn á øll øki at arbeiða.<br>5) Seta fígging soleiðis at borgarin fær alla neyðuga hjálp.<br>6) “Børn og ung - Føroyar”: Ein deild við allari fakligheit.<br><br>Er samfelag okkara ov strongt? |

## E - Arbeiðsborð 22 - Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Málið er at seta rættstundis og breitt inn við teimum burðardyggu og tvørgeiraligu átøkum, sum skulu til fyri at skapa munadygg tilboð og karmar. Soleiðis verður tryggjað, at møguligar avbjóðingar og vandamál verða eyðmerkt og handfarin rættstundis grundað á samstørv tvørtur um fakmørk, stovnar og tilboð.

**Avbjóðing**:
Vantandi rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð hava ógvusligar avleiðingar við sær. Trýstið á sertænastur so sum Barna- og ungdómspsykiatri, Sernám, Almannaverk o.a. er alsamt vaksandi. Bíðilistar til útgreining og serviðgerð leingjast alsamt, og somuleiðis eftirlýsa børn, ung og familjur, at ymisku tilboðini verða samskipað.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Tykist vera alt fleiri børn og ung við sálarligum avbjóðingum og støðurnar tykjast tyngri og álvarsamari
- Tað eru torgreiðar og umhvørvistreytaðar orsøkir, ið hava skapt eina avbjóðing. Tískil eru tað ikki skjótar ella einfaldar loysnir, ið skulu til fyri at broyta støðuna, men neyvar ætlanir, fíggjarlig raðfesting, áhaldandi uppmerksemi og áhugi frá teimum, ið hava ábyrgd av børnum og ungum
- Ein burðardygg tilgongd fevnir um eina nærlagda leiðslu av tilfeingi í breiðastu merking fevnandi arbeiðsmegi, langtíðar haldbari í mun til menniskjanslig, fíggjarlig og umhvørvislig viðurskifti

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Børn, ung og familjur teirra, ið eru í torgreiddum støðum, eru noydd at brúka orku sína upp á skipanirnar
- Skipað útgreining av børnum á ein skynsamari hátt við minst møguligari bíðitíð, so at barnið ikki dettur niðurímillum
- Betri samskipan á tvørgangandi tænastum og at tær verða íverksettar í mun til viðgerðarætlanina

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:**<br>Navn: |
|---|---|
| | **ODDAFÓLK:**<br>Navn: |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Jú skjórati vit møtast tvørgeiraliga, betri verður hjálpin<br><br>Tann góða tilgongdin riggar væl, men sum nú er, er neyðugt við diagnosum.<br><br>Neyðugt at seta inn heilt tíðliga inn.<br>Lata foreldur og fakbólkar betur í til at finna ta røttu hjálpina<br>Skipanir mugu verða leysar av tí fíggjarliga og hvønn geira 'trupulleikin'. hoyrir til<br>Fyri nógvar familjur er tað ov trupult at finna røttu hjálpina ella tey hava ikki førleikar ella orku<br>Vit mugu hava einn akkerspersón í skipanini, sum kann hjálpa familjunum<br>Málini sleppa at vaksa seg ov stór, manglar førleikamenning av lærarum,<br>Nógv sertilboð eru full<br>Vit mugu hava orku at arbeiða fyribyrgjandi<br>Resoursir mangla í skúlunum,<br>Sernám kann veita supervisión til skúlarnar, so teir orka eitt sindur betur |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Avbjóðingar, sum kundu verði loftaðir í øðrum økjum flyta seg hægri upp í skipanini.<br><br>Tvørfakligt samstarv og fleiri resoursir høvdu kunna lofta<br><br>Tað er nógv gott samstarv, men tað regluliga samskifti millum geirar kundi verið betur.<br><br>Trupuleikar sleppa at vaksa - børnini ganga í barnagarð, skúla, uttan at nakar loftar trupulleikanum.<br><br>Ov nógv tilvildarligt í okkara skipan – tey sum rópa harðast fáa hjálp.<br><br>Systkin líða ofta undir, at børn hava avbjóðingar/diagnosu.<br><br>Foreldur eru ein týdningarmikil resoursa, sum má latast betur í til at hjálpa børnunum.<br><br>Tað manglar eitt familjucentur, eitt 'smágáttartilboð' har avbjóðingarnar kunnu verða loftaðar.<br><br>Manglandi vitan um arbeiði hjá øðrum instansum |

| Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum |
|---|

| | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Tvørgeiraligt samstarv – smidligari yvirgongd millum stovnar.<br>Felags mannagongdir fyri øll økir.<br>At lofta børnum/familjum gjøgnum fyibyrgjandi arbeiði, áðrenn avbjóðingar sleppa at vaksa til trupulleikar |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Manglar ein inngongd, har røtt hjálp verður veitt rættstundis.<br>Markamótsavbjóðingar<br>Greitt arbeiðsbýti og lættari atgongd til aðrar instansir. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1. Kunning og yvirlit yvir tilboð/átøk.<br>2. Koordinator skipan<br>3. Djóni |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Eitt lágáttar tilboð til familjur. Familjuhús/familjuráðgeving, sum hevur møguleika at ferðast út um landið.<br>2. Reglulig tvørgeiraligt samskifti/samstarv<br>3. Politisk raðfesting |

## E - Arbeiðsborð 23 - Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Málið er at seta rættstundis og breitt inn við teimum burðardyggu og tvørgeiraligu átøkum, sum skulu til fyri at skapa munadygg tilboð og karmar. Soleiðis verður tryggjað, at møguligar avbjóðingar og vandamál verða eyðmerkt og handfarin rættstundis grundað á samstørv tvørtur um fakmørk, stovnar og tilboð.

**Avbjóðing**:
Vantandi rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð hava ógvusligar avleiðingar við sær. Trýstið á sertænastur so sum Barna- og ungdómspsykiatri, Sernám, Almannaverk o.a. er alsamt vaksandi. Bíðilistar til útgreining og serviðgerð leingjast alsamt, og somuleiðis eftirlýsa børn, ung og familjur, at ymisku tilboðini verða samskipað.

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Tykist vera alt fleiri børn og ung við sálarligum avbjóðingum og støðurnar tykjast tyngri og álvarsamari
- Tað eru torgreiðar og umhvørvistreytaðar orsøkir, ið hava skapt eina avbjóðing. Tískil eru tað ikki skjótar ella einfaldar loysnir, ið skulu til fyri at broyta støðuna, men neyvar ætlanir, fíggjarlig raðfesting, áhaldandi uppmerksemi og áhugi frá teimum, ið hava ábyrgd av børnum og ungum
- Ein burðardygg tilgongd fevnir um eina nærlagda leiðslu av tilfeingi í breiðastu merking fevnandi arbeiðsmegi, langtíðar haldbari í mun til menniskjanslig, fíggjarlig og umhvørvislig viðurskifti

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Børn, ung og familjur teirra, ið eru í torgreiddum støðum, eru noydd at brúka orku sína upp á skipanirnar
- Skipað útgreining av børnum á ein skynsamari hátt við minst møguligari bíðitíð, so at barnið ikki dettur niðurímillum
- Betri samskipan á tvørgangandi tænastum og at tær verða íverksettar í mun til viðgerðarætlanina

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
|---|---|
| Unn: ergoterapeut, Súsanna, Durita og Anna: Privatstarvandi ergoterapeutar, Durita: AV Heimaráðgeving (ADHD ráðgevi), Kari: Gigni, Sofía: Sálarfrøðingur BVT Fuglafjarðar og Eystur kommuna, Sissal: Sálarfrøðingur B&U Psykiatri, Jóhanna: Sálarfrøðingur Sernám. | Navn: Anna Lamhauge<br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Jóhanna Davidsen |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Høvuðsyvirskriftir í kjakinum vóru niðanfyristandandi:<br>– Týdningurin at seta tíðliga og fyribyrgjandi inn<br>– Lágáttartilboð til foreldur - evt. Barnahús/Barnastovnur/Familjuhús<br>– Samstarv og –skipan millum ymsu geirarnar<br>– Evt. inspiratión úr STIME<br><br>Tosað var m.a. um, at 'rættstundis-hugtakið kann vera eitt sindur fløkt, tí 'rættstundis' kann síggja ógvuliga ymiskt út, alt eftir hvørjar individuellu avbjóðingarnar eru. Tí má útgangsstøðið altíð takast úr tørvinum hjá tí einstaka.<br><br>Í Føroyum eru relativt nógvir stovnar og felagsskapir, ið stuðla børnum og ungum. Hetta kann vera gleðiligt. Samstundis er inntrykkið, at bæði foreldur og avvarðandi stovnar, felagsskapir og privatir aktørar kunnu hava trupult við at navigera í øllum hesum tilboðum - hvør ger hvat, nær og hví. Íbúgvatalið í Føroyum er ikki stórt meira enn ein miðalstór kommuna í Danmark – eitt land vit javnan sammeta okkum við. Tað átti tí ikki at verið so trupult, sum tað í praksis vísir seg at vera. Fakfólk hava eitt ávíst innlit í tænasturnar hvør hjá øðrum, men ikki altíð fult yvirlit. Hetta gerst eisini greitt í felags prátinum við borðið. Tí verður umrøtt, hvørt markamótini millum geirarnar møguliga áttu at verið sjónligari og evt. endurskoðað, so almennir aktørar ikki veita somu tænastur. Ofta endar tað ókonstruktivt við, at man (vegna tíðarpress og annað) peikar pílin móti hinum, sum veita líknandi tænastu sum ein sjálvur. Tí fer barnið út úr miðdeplinum og fíggjarligur- og starvsfólkakapacitetur traðka í staðin inn í sentrum. Foreldur vita ofta heldur ikki, nær og hvar tey kunnu banka á hvørjar dyr. Tí var bólkurin samdur um, at verða stórvegis broytingar gjørdar, so er skilabetri at styrkja og breiðka arbeiðsuppgávurnar hjá eksisterandi stovnum hvør í sær, heldur enn at sjóseta nýggjar funktiónir, tilboð og stovnar.<br><br>Eisini varð prátað um, at summar familjur detta ímillum ymsu skipanirnar. Kanska skulu børnini ikki útgreinast. Kanska síggja skúli ella stovnur ikki somu avbjóðingar sum heimið. Ella kanska eru avbjóðingarnar í familjuni ikki upplagdar í mun til tænastur frá BVT ella AV. Foreldrini síggja kanska avbjóðingar heima og tørva ráðgeving, sum tey í dag ikki kunnu fáa hjálp og stuðul til við verandi skipanum. Tí varð eitt lágáttartilboð umrøtt til hesi foreldur, har møguleiki er fyri foreldraráðgeving (antin sum forløb ella einkultsamrøður). Í hvørjum eksisterandi landsstovni eitt tílíkt tilboð eigur at verða forankrað, var bólkurin tó ikki heilt greiður yvir.<br><br>Almemt hevur nógv hevur verið prátað um eina hurð, ið kann visitera til ymsu instansirnar fyri at gera tað einfaldari hjá familjunum at fáa rætta hjálp og stuðul. Bólkurin umrøddi, at verður ein slík visitatión sjósett, er alneyðugt, at hon ikki verður kontraproduktiv og leingir bíðitíðina hjá teimum, ið hava ein tørv. Hetta síggja vit sum ein vansa. Harumframt hevur týdning í størri mun at kunna samstarva tvørtur um geiramørk í teimum málum, har hetta verður mett viðkomandi. Tá fakfólk tvørtur um mørk seta seg saman at finna loysnir og leggja eina ætlan, kunnu fløkt mál gerast einfaldari at handfara. Inspiratión kann møguliga heintast úr STIME- |

| | |
|---|---|
| | samstarvinum og tillagast føroyskum viðurskiftum. Høvuðsendamálið má vera samstarv tvørtur um almennar geirar og kommunumørk í uppgávuni at kvalitetstryggja uppgávuloysnirnar í arbeiðinum at betra um trivnaðin og menningina hjá børnum og ungum við avbjóðingum. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk* og økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Yvirskriftir vóru hesar:<br>– Geirar vita ikki av hvør øðrum<br>– Instansir ikki til reiðar at stuðla samstundis<br>– Børn detta ímillum skipanir<br>– Ov stórur munur á tænastustøði, alt eftir geografi og lokalari/kommunalari fíggjarorku<br>– Tvørfakligt samstarv<br>– Styttri visitatiónskø<br><br>Breiða inntrykkið í bólkinum er, at tað alt ov ofta hendir seg, at geirarnir ikki vita av hvør øðrum. Foreldur kenna seg sum toghaldarar uppá egið barn og missa yvirlitið á, hvørja kunning tey hava fingið og givið hvar. Stovnarnir práta ikki saman - partvís orsakað av at soylarnir og soyla-tankagongdin forða fyri bæði sparring og vitanardeiling. Tað eru kanska serliga tey ressursusterku foreldrini, ið hava tendens til at enda í einum toghaldaraleikluti í mun til egið barn. Eisini tey møðast yvir tíð. Samstundis er ein stórur vansi, at tær ressursuveikaru familjurnar detta niðurímillum skipanir. Onkuntíð stúra tey fyri hjálpini og hvat hon inniber - óansæð um hon verður veitt av BVT, Sernámi, AV ella B&U psykitatri. Tað hevur tí týdning at forða fyri og fáa fatur á hesum foreldrum til gagns fyri trivnaðin og menningina hjá einstaka barninum.<br><br>Eisini er inntrykkið, at børn ov ofta detta niður ímillum í vitanardeilingini í yvirgongdini til skúlalívið. Børn, ið kanska hava havt tørv á stuðli í barnagarði (og kanska hava havt nógvar vikuligar stuðulstímar), sum móttakandi skúli ikki fær kunning um. Børnini fáa óneyðuga nógv niðurløg, ið kundu verið fyribyrgd, um vitanardeilingin varð tryggjað frá byrjan. Bólkurin umrøðir í hesum sambandi, um eitt fylgiskjal, ið fylgir barninum í stóru yvirgongdunum kundi bøtt uppá hesa avbjóðing - úr vøggustovu í barnagarð, úr barnagarði í forskúla, úr forskúla í skúla osfr. Eisini varð skotið um, hvørt krav um yvirleveringsfundir um serliga sárbær børn møguliga kundi bøtt uppá hesar avbjóðingar.<br><br>Ein stór avbjóðing í mun til at hjálpa børnum og ungum í dag er, at instansir sjáldan eru til reiðar at stuðla samstundis. Skúli og/ella dagstovnur søkja hjálp og vegleiðing frá antin NR ella Sernámi í samband við avbjóðingar. Bíðitíðin til útgreinan í B&U psykiatriini er í dag 2 ár, og fyri at fáa hjálp úr AV er neyðugt við einari diagnosu. Onkuntíð er BVT ein viðkomandi aktørur, men ikki altíð. Ofta er neyðugt at seta inn á fleiri løgum samstundis, og vit skulu gerast dugnaligari at samstarva um einstøku børnini. Prátað var í hesum sambandi um, at tað kundi hjálpt og stuðla bæði børnum og familjum, vórðu diagnosukrøvini til at fáa hjálp tikin burt í teimum landsstovnum, har hesi í dag eksistera. Hetta hevði opnað upp fyri møguleikum í mun til meira fleksiblum samstarvi 'på tværs', so tað í størri mun bar til at seta inn á dagstovni/í skúla, samstundis sum heimið fekk hjálp og stuðul. Hetta er sannlíkt mest viðkomandi í mest fløktu málunum, men kundi evt. viðvirkað til eina gongd, har bíðitíðin til útgreinan yvir tíð minkaði, tí fleiri fingu ta hjálp, teimum tørvaði, rættstundis. Og kanska |

| | |
|---|---|
| | gjørdust málini av tí sama minni fløkt enn tað, vit síggja í dag. Tað kann man vóna.<br><br>Breiddin í bólkinum upplivir javnan, at tað er stórur munur á hvørja tænastu, einstaka barnið og familjan fáa bjóðað, alt eftir hvar í Føroyum man býr.  Talan er bæði um avbjóðingar í mun til fíggjarorku og av tí sama játtan til stuðul, tænastur frá BVT, umframt frá ymiskum sjálvsognarfelagsskapum. Tað er serliga útjaðarin, ið er harðast raktur. Semja var um, at hetta eigur ikki at vera so í 2023. Tað eigur onkursvegna at verða sett inn í mun til hesar avbjóðingar, tí tað má ikki vera geografi, ið ger av, hvør fær hvørja hjálp.<br><br>Bíðitíðin til útgreinan er eisini ein stór avbjóðing og má handfarast. Børn gerast alt og ofta verri fyri, meðan tey bíða. Eitt vælferðarsamfelag eigur at hava eina virðiliga bíðitíð innan heilsuverkið - og vælferðarøkið sum heild. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Yvirskriftir<br>– Smidligari vitanardeiling millum ymsu sektorarnar<br>– Evt. skjal, ið fylgir barninum í samband við stóru skiftini (skiftijournal)<br>– Normering<br>– Førleika- og kvalitetsmenning innan dagstovna- og skúlaøkið<br>– Kunningartilfar<br><br>Bólkurin er samdur um týdningin á handfaringini av geiraavmarkingunum, tí hesar avbjóða í gerandisdegnum og gera uppgávuloysnirnar í mun til einstøku børnini bæði truplari og veikari. Hesar mugu tí raðfestast. Hvørt talan skal vera um eitt Ísland-inspirerað 'samtykkisskjal', ið loyvir fríari vitanardeiling og sparring, ella um onnur loysn er skilabetri, hevur bólkurin sum so ikki eina meining um. Tað hevur týdning at hittast regluliga í viðkomandi (men ikki øllum) málum til tess at sampakka innsatsirnar og uppgávuloysnirnar, so tær geva meining í mun til einstaka barnið og familjuna. Ein heildarorienteraður innsatsur manglar í Føroyum og átti ikki at verið ein ómøguligur málsetningur í einum landi við 55.000 íbúgvum.<br><br>Normering er enn eitt nógv umrøtt tema. Bólkurin er samdur um, at trivnaðurin hjá børnum og ungum í Føroyum sannlíkt hevði batnað, um møguleiki var fyri tættari relationellari vaksinkontakt, enn talan er um í dag. Samstundis er tørvur breitt sæð á at førleika- og kvalitetsmenna tilboðini í Føroyum. Ein stórur bólkur av starvsfólkunum rundan um okkara børn er ófaklærdur, og tørvur er á breiðari førleikamenning - bæði í mun til námsfrøði, sernámsfrøði, barnasýn, menning hjá børnum og ungum... osfr.<br><br>Í mun til avbjóðingarnar at fáa yvirlit yvir ymsu tænasturnar og tilboðini í landinum, varð prátað um, hvørt man kundi gjørt kunningartilfar til foreldur. Man kundi m.a. umhugsað ein felags faldara ella eina heimasíðu, ið lættliga kann geva foreldrum yvirlit yvir tey tilboð, ið verða bjóðað av ymsu stovnunum og felagsskapunum í Føroyum. Talan er ikki um eina hurð, men tað er eitt lættatkomiligt yvirlit yvir hvør ger hvat, hví og nær. Hvør |

| | |
|---|---|
| | útgreinar, hvør stuðlar familjunum, skúlum/dagstovnum og nær henda hjálp er viðkomandi ella atkomulig. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Yvirskriftir<br>– Styrkja fakligheitina<br>– Seta tíðliga og fyribyrgjandi inn<br>– Tryggja javnt tænastustøðið fyri allar føroyingar - óansæð adressu<br>– Kná børn - børn skulu ikki detta millum skipanir<br><br>Umframt omanfyristandandi yvirskriftir (ið longu eru nærri útgreinaðar) umrøddi bólkurin ein strongdan starvsfólkahóp. Høg krøv verða sett teimum vaksnu í mun til alt tað, tey skulu náa av málsetningum. Tey skulu vera blekksprutta, hava yvirlit, náa og møta tørvinum hjá einstaka barninum, vera relationell, konfliktfyribyrgjandi osfr. Nógv hava runnið ov skjótt ov leingi. Tey eru strongd og hava ringa samvitsku um alt tað, tey kundu gjørt betri, um umstøðurnar vóru til staðar. Tørvur er tí eisini at taka hond um starvsfólkini, so tey ikki brenna saman. Tað gagnar í hvussu so er ikki børnunum - ikki minst tá talan er um børn við serligum tørvi.<br><br>Inntrykkið er harumframt ofta, at starvsfólk rundan um børnini ikki altíð eru til reiðar ella tora at taka ráð og vegleiðing til sín og seta fyribyrgjandi átøk í verk út frá konkreta og sjónliga atburðinum - og ofta ikki fyrr enn barnið er útgreinað. Tað tykist sárbært og trupult at arbeiða út frá einari hypotesu um, at ávís átøk kundu verið fyribyrgjandi og bøtt uppá avbjóðingarnar í gerandisdegnum. Tørvur er tí framhaldandi á hesum fyrireikandi arbeiði, so barnið og tey vaksnu rundan um kunnu móttaka hjálp, stuðul og vegleiðing um, hvat kundi verið roynt av - eisini meðan man evt. bíðar eftir einari diagnosu.<br><br>Vit síggja í dag harumframt nógv børn við sansaligum avbjóðingum. Í dag er stórt sæð ikki møguligt at fáa hjálp og vegleiðing til hesi børn innan skúlaverkið. Møguleiki er fyri at fáa ávísing og ískoyti til viðgerð hjá privatstarvandi, men ikki allar familjur hava ráð ella yvirskot til slíka tænastu. Tí vera børn í Føroyum eisini innan hetta økið fyri vanbýti. Gleðiligt hevði tí verið, um karmarnir at fáa atgongd til vegleiðing innan motorikk, sansaskipanir og fysio- og ergoterapi innan skúlaverkið batnaðu. |

•

<table>
<tr><th colspan="2">Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum Rættstundis tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk og Fakligheit, barnafatan og barnarættindi</th></tr>
<tr><td>5) - Loysnir<br>1. Her og nú<br>2. Komandi 3-5 árini<br>3. Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>(brúkið uml. 20 min.)</td><td>1.<br>a. Lágáttartilboð til foreldur, ið ikki passa inn í ymsu skipanirnar, sum í dag ikki uppliva at fáa hjálp og ráðgeving til avbjóðingar heima.<br>b. Kunningartilfar – eitt yvirlit (antin ein faldari ella heimasíða) yvir tænastur og tilboð. Førleikastovur, Námsfrøðilig ráðgeving, Gigni, Sernám, BVT, B&U psykiatri, AV, Berin, Blái Krossur, Barnabati.... osfr.<br>2.<br>a. Samstarv tvørtur um geiramørk<br>b. Fyribyrgjandi ráðgeving<br>c. Taka burtur diagnosukrøv fyri at fáa hjálp<br>d. Fleiri ressursir og betri normeringar á stovnum og skúlum<br>e. Førleikamenning av starvsfólkum rundan um børnini<br>f. Smidligari og skjótari visitatiónsprosessir til tænastur<br>g. Ein lágáttar familjuhúsfunktión<br>h. Betri atgongd til tænastur frá fysio- og ergoterapeutum innan skúlaverkið<br><br>3.<br>a. Breiðar politiskar semjur<br>b. Eksisterandi stovnar verða styrktir og mentir til eisini at fevna um omanfyristandandi funktiónir - serliga í mun til familjur (antin BVT, AV, Sernám ella Gigni)</td></tr>
</table>

<table>
<tr><th colspan="2">Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.</th></tr>
<tr><td>6) – Hvat hevði eg broytt?<br>1.<br>2.<br>3.<br>(brúkið uml. 10 min.)</td><td>– Samstarv tvørtur um geirar – soyluhugsanir skulu niðurlagast<br>– Tænastustøðið skal vera javnt fyri allar føroyingar - óansæð hvar teir búgva og ikki vera avmarkað av geografi ella fíggjarligari orku lokalt/kommunalt<br>– Lágáttartilboð - einfalt og atkomiligt</td></tr>
</table>

•

# F - Arbeiðsborð 24 - Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív




**6 vitanarøki**

A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, løggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

**Mál:**
Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd, og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Fakligheit og barnarættindi skulu vera grundarlag fyri teimum tilboðum og átøkum, vit veita. Fáa fakligheit og barnarættindi í fokus í øllum liðum.

**Avbjóðing**:
Ymiskir mátar at síggja børn og ung kunnu hava við sær ymiskar fatanir av hvussu tilboð og átøk verða skipað. Vit síggja ov ofta, at professionell fakfólk aftra seg at traðka til og handla – "berøringsangst".

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Vit skulu hava góðar stovnar við góðum kørmum, dugnaligum proffessionellum og fakliga sterkum starvsfólkum, sum menta, stimbra og menna børnini í felagsskapinum
- Mugu savnast um barnið – idealið er, at vit hava færri og sterkari eindir við serkunnleika
- Verður ov ofta farið í miðlarnar heldur enn at partarnir seta seg saman og tosa. Tað skapar ótryggleika og kaos. Serliga fyri børnini.
- Leiðsluførleikarnir mugu styrkjast munandi. Leiðarar mugu hava evni at leiða, men eisini amboð, myndugleika og handlikraftina samsvarandi

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Stuðla undir at fakfólk fáa betri førleikar og eitt felags mál til at viðgera og arbeiða við børnum og ungum. Soleiðis fyribyrgja vit ógreidleika og misskiljingum.
- Skipa regluligar verkstovur ella ráðstevnur um viðkomandi evni fyri ymiskum fakbólkum til tess at menna tvørgeiraliga vitan og felags orðfeingi

| | |
|---|---|
| **BÓLKALUTTAKARAR:**<br>Tóra Við Keldu (MEGD) Djóni Eidesgaard (Barnabati), Bjørg av Kák (heimaráðgevi í AV, Ida Lón (Frítíðarskúli), Marjun Højgaard (BVT), Vilhelm Bergson (BVT) og Sára Gullfoss (Gigni) | **SKRIVARI:**<br>Navn: Høgni Warberg<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Eyðun Gaard |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| Skrivispurtur #1: ØKI: Fakligheit, barnafatan og barnarættindi | |
|---|---|
| 1 )<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Hesi trý hugtøkini mugu framhevjast meira og fylla meira í kjakinum, tí hesi eru sera týdningarmikil í mun til trivna og mennning hjá børnum. Kunnast má meira um Barnarættindasáttmálan og eitt nú eisini í oktobur á hvørjum ári, og politikarar, myndugleikar og fakfólk mugu taka størri atlit at barnarættindum og Barnarættindasáttmálanum. Barnaumboðsmaðurin er týdningarmikil og hann má avgjørt ikki avtakast. Størri dentur og størri arbeiði skal leggjast í at raðfesta Barnarættindasáttmálan. Lærarar og onnur fakfólk mugu sleppa á skeið at førleika menna seg. Onki umboð er her í dag frá Skúlanum á Trøðni, sum er einasti serskúli í landinum og okkurt má henda við Skúlanum á Trøðni. SáT má renoverast á revolutionerandi hátt, og fysisku rammurnar á skúlanum eru als ikki góðar nokk, og hugburðurin til SáT má broytast kollveltandi. Vit mugu eisini minnast til sáttmálan og rættindi hjá teimum, ið bera brek. Tað verður ov nógv sløkt eldar. Hugsanin um Barnarættindi má mennast, hvat liggur í hugtakinum rættindi. Eisini Barnafatanin hongur saman við barnarættindum.<br>Børn skulu hava rættindi til fakligheit! Tað eru ov fá fakfólk um børnini á vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum. Hesi økið eru ov nógv merkt av parkering og ansing.<br>Fakligheit kostar og børn hava allarstørsta samfelags virði, sum er sera vigtigt at investera í.<br>Ov stórt fokus á barnið og tess trupulleikar, at barnið hevur avbjóðingar, tørv og/ella diagnosu, og skal tí grøðast. Tað er ikki galið við barninum, men hinvegin við karmunum, og vit seta ov seint inn við at skapa betri karmar. Børn skulu stuðlast til at úttala seg um síni rættindi. Her mugu børnini spyrjast, gera nýggjar filmar har børn verða spurd og spyrja næmingaráð í skúlunum. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum | Tað verður sett inn ov seint, so børn hava tað so ótrúliga ringt, áðrenn tey fáa hjálp, og gáttin er ov høg. Til dømis mistu tey eitt lággáttar |

| | |
|---|---|
| økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* og økið *Tað góða barna- og ungdómslívið,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | tilboð á SAF. Ov lítil fakligheit t.d. á dagstovnum. Ov einstátta fakligheit í skúlunum við bert lærarum, tí má meira fjøltatta fakligheit inn í skúlarnar, herímillum ergoterapeutar.<br>Tað eru ikki børnini, sum ikki megna og tí skulu flytast, tey eiga at klára seg og tí skal skúlin heldur flyta seg og skapa røttu karmar. Serhjálpin er ov langt burturi, avbjóðingarnar mugu loftast inni í skúlanum! Og rætta fakligheitin má verða í dagstovnum og skúlum, sum lofta avbjóðingum, áðrenn tey útvikla seg til trupulleikar við serligum tørvi og stemplum. Hjálpin skal verða skjótari og tættari at børnunum. Børn eru ikki hálv menniskju uttan rætt til felagsskap, virkni, fakligheit og menning. Hugburðurin má broytast viðv. barnarættindi.<br>Lykilin er samstarv, har fakfólk og geirar lurta eftir hvør øðrum. Land og Kommunur eru ov uppbýtt, har togað verður um, hvør hevur ábyrgd, hvør eigur og hvør skal gjalda. Mál og børn enda ofta í einum kassa og tað kemur ikki víðari í tilgongdini, tí er ov uppbýtt í kassar. Tað verður t.d. við umsorganarsvik ov sjálvdan fráboðað og ov sjálvdan víst víðari. Vit mugu vita hvat aðrir geirar og stovnar gera. Tagnarskyldan er ov ofta til hindurs, og fólk ivast nær tey kunnu/skulu fráboða. Foreldur skulu geva samtykki, um boð skulu gevast víðari til Gigni ella frá frítíðarskúla til skúla, tá talan er um stúran. BVT er eisini ein fyribyrgjandi tænasta, men verður ov lítið brúkt fyribyrgjandi, her manglar ein toghaldaraleiklutur, sum ikki er ov langt burturi.<br>Tað eru nógvar ymiskar barnafatanir, vit hava ikki í nóg stóran mun eitt felags mál um barnafatan, tosa vit um tað sama, tá vit tosa um barnið og tess rættindi.<br>Okkara lógir og lógarsmíð avspegla hetta, barnsins rættindi skulu ikki bara verða sum verkætlan, tí barnsins rættindi skulu staðfestast við lóg. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri | Fakfólk mugu tora og duga betri at spyrja foreldrini, tá tey t.d. skulu fáa samtykki. Foreldur er aloftast samstarvshugað. Betri samskipan, |

| | |
|---|---|
| at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | samskifti og samstarv millum kommunu og land, og bróta forðingar og barrierur millum land og kommunu.<br>Sertilboð skal verða innan fólkaskúlans gátt, so tað verður lofta fyrr, og ikki bara senda víðari til aðrar instansir so sum BVT, Sernám.<br>Størri og meira fjølbroytt fakligheit á gólvinum og í skúlanum.<br>Heilsufremjan, trivnaður og fakligheit á gólvinum, eisini í forskúla.<br>Lógarbroyting so ikki bara námsfrøðingar og lærarar, men fáa aðrar fakbólkar inn í t.d. skúlan. Ikki fixa ella flyta børnini, men hava dagstovnar og skúlar, sum tillagað seg og hóska til børnini. Samstarv millum ymsar fakbólkar skal lóggevast við støði í barnarættindum.<br>Hjálp og stuðul skal verða tøk í skúlanum, so betri tíð og umstøður verða til undirvísing og læring. Skúlin skal í størri mun verða eitt heildartilboð, sum rúmar og loftar barninum inni í skúlanum. Fakbólk og myndugleikar mugu inndraga og lurta eftir foreldrunum.<br>Fakfólk skulu brúka hvønn annan og fakligheit hjá hvør øðrum, tí tað skapar synergi og ríkar okkum.<br>Ov nógv ábyrgd er tikin frá foreldrunum og løgd yvir á skúlan, og ov nógv ábyrgd er løgd á foreldur hjá børnum, ið bera brek, hesi foreldur skulu hava nøktandi hjálp og stuðul.<br>Kjakast varð um í hvønn mun fakfólk og myndugleikar skulu ráðgeva og vegleiða foreldrum, tí vit t.d. síggja avleiðingarnar hjá børnum við skyldum foreldrum. Lutfalsliga nógv børn boða Barnabata frá, at tey sakna meira nærveru, tíð og kontakt við síni foreldur í heiminum.<br>Barni skal hava rætt til ein hjásita, sum umboðar barnsini sjónarmið.<br>Børn skulu hava rætt til vaksin-kontakt. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Álit og tilmæli enda ov ofta í skuffu, har tað politiskt hendir ov lítið víðari.<br>Stórur tørvur á at deila vitan tvørtur um fakmørk.<br>Eitt samskiftistskjal manglar.<br>Ov lítil og ov smøl fakligheit í dagstovnunum og skúlunum.<br>Politiskt má skiljast, at týdningarmikla investeringin í barnið, tað kostar pengar. |

| | |
|---|---|
| | Barnarættindi eru implementerað í Barnaverndarlógini, har barnið skal hoyrast, og fakfólk skulu hava tvørfakligt samstarv.<br>Lærarar hoyra og frætta ov lítið aftur frá BVT.<br>Eins og við fatan av happing, má fokus ikki bert verða á einstaka barnið, men meira á bólkin, rammum, for/treytum og umstøðum.<br>Seta eykastuðul inn beinanvegin hjá barnakonum, har tað er stúran.<br>Bjóða stutt skeið við familju ráðgeving.<br>Uppraðfesta Gigni, sum má innyvir beinanvegin og arbeiða fyribyrgjandi og heilsufremjandi. Harvið minka um fráboðanir til BVT og til listan hjá B&U. Gigni høvi at skreena tíðliga.<br>Tippa holið hjá Gigni, sum er tá barnið er 18 mðr. til skúlabyrjan.<br>Stúranir hjá jarðarmóður og øðrum skal fráboðast Gigni heldur enn BVT, tí tað verður ov lítið, ov sjálvdan og ov seint fráboðað til BVT.<br>Diagnosa skal ikki verða fortreyt fyri at fáa hjálp.<br>Kann spurnartekin setast við diskursin um, at tað er so strævið í dag at vera ungur??<br>Stremba vit eftir tí rætta? Stremba vit ov nógv eftir tí perfekta? Eftir elituítrótti og 12 talinum?<br>Er ov nógv new public managemnent ávirkan á úrslit, avrik, lívlanga læring og førleikamál?<br>Skulu vit heldur 'fylla» børn við øðrum og góðum virðum?<br>Stýra marknaðir og miðlar virðunum??<br>Skal meira tíð raðfestast saman við familjuni?<br>Hví so nógvur hjúnarskilnaður??<br>Hvussu tíðliga skulu børn byrja á stovni? Um tey byrjaðu seinni, vóru so fleiri fakfólk um tey?<br>Brúka foreldrini ov nógva tíð til at realisera og dyrka seg sjálvan? Ov nógv tið til skermnýtslu?<br>Børnini hava rætt til at verða hoyrd, tó merkir hetta ikki, at børnini hava rætt at bestemma. |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* og *Tað góða barna- og ungdómslívið*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir** | Minnast til § 12 í Barnarættindasáttmálanum. |

| | |
|---|---|
| 1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Í dagsins samfelagið nógv krøv og væntanir, og tí trýst. Eisini á foreldur. Foreldrini skulu 1000 ting, og tey seta krøv og væntanir til síni børn, og harvið til skúlan og stovnar.<br>Foreldrini hava heima primer ábyrgdina, av at børn fáa kærleika, mørk og umsorgan.<br>Smarttelefonin og skermnýtsla.<br>Ynskja burðardyggar fyriskipanir, stuttflutt við lágari gátt og skjótari hjálp.<br>Útbyggja, ráðfesta og styrkja Gigni, eisini við øðrum fakbólkum.<br>Ábyrgdin er ov nógv flutt frá foreldrum/familjunum til myndugleikar, stovnar og systemið.<br>Lærarin hevur ov nógvar uppgávur, sum samstundis taka tíð frá undirvísing. Eisini tí má fleirfakligheit inn í skúlan, og lærarin skal sleppa at vera lærari.<br>Børn hava rætt til vaksin-kontakt. Foreldrini – mamma og pápi – skulu í alt arbeiða max 1½ ársverk<br>Á dagstovni eru børn longri til 'arbeiðis' enn foreldrini, og hetta er við ikki-útbúnum starvsfólkum.  Hugburðsbroyting má til, ikki bert makrelur og laksur hava virði, barnið er týdningarmesta virði.<br><br>2: Bróta niður veggir, geirar og forðingar niður.<br>Fleiri útbúgvin fakfólk á gólvinum við kjarnuuppgávuni og meira vaksin-kontakt og tíð til børnini.<br>Gigni uppnormerast og uppraðfestast.<br>Endurskoða lógarverk og barnarættindi<br><br>3: Djóni og BUMR stuðlað av øðrum geirum. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Fleiri fakfólk á gólvinum saman og um barnið.<br>Skjótari, léttari og tættari hjálp til børn.<br>Børn veruliga verða sædd, hoyrd og vird. |

# F - Arbeiðsborð 26 - Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**
Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd, og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Fakligheit og barnarættindi skulu vera grundarlag fyri teimum tilboðum og átøkum, vit veita. Fáa fakligheit og barnarættindi í fokus í øllum liðum.

**Avbjóðing**:
Ymiskir mátar at síggja børn og ung kunnu hava við sær ymiskar fatanir av hvussu tilboð og átøk verða skipað. Vit síggja ov ofta, at professionell fakfólk aftra seg at traðka til og handla – "berøringsangst".

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**
- Vit skulu hava góðar stovnar við góðum kørmum, dugnaligum proffessionellum og fakliga sterkum starvsfólkum, sum menta, stimbra og menna børnini í felagsskapinum
- Mugu savnast um barnið – idealið er, at vit hava færri og sterkari eindir við serkunnleika
- Verður ov ofta farið í miðlarnar heldur enn at partarnir seta seg saman og tosa. Tað skapar ótryggleika og kaos. Serliga fyri børnini.
- Leiðsluførleikarnir mugu styrkjast munandi. Leiðarar mugu hava evni at leiða, men eisini amboð, myndugleika og handlikraftina samsvarandi

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:
- Stuðla undir at fakfólk fáa betri førleikar og eitt felags mál til at viðgera og arbeiða við børnum og ungum. Soleiðis fyribyrgja vit ógreidleika og misskiljingum.
- Skipa regluligar verkstovur ella ráðstevnur um viðkomandi evni fyri ymiskum fakbólkum til tess at menna tvørgeiraliga vitan og felags orðfeingi

| **BÓLKALUTTAKARAR:** | **SKRIVARI:** |
| --- | --- |
| Poulina, Maibritt, Mirjam, Maria, Hervør, Heidi, Vígdis, Anja, Sanna og Karin | Navn: Karin Gaardlykke |
| | **ODDAFÓLK:**<br>Navn: Mirjam Kjølbro |

Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.

Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6

| **Skrivispurtur #1: ØKI: Fakligheit, barnafatan og barnarættindi** | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Felags útgangsstøði, ST- sáttmálan,<br>Somu tankagongd í forhold til barnafatan, soleiðis at samarbeiði blívur betur.<br>Fakligheit kann vera við til at tryggja at tað verður fráboða og at tað ikki er berøringsangist.<br>Fakligheit fyri at tryggja at barnasáttmálin verður hildin.<br>Uppdatera vitan hjá leiðarum<br>Mentanarmunur<br><br>Foreldra ábyrd... |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* og økið *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | Tagnarskylda... ein avbjóðing??<br>Ymisk fakligheit<br>Ymiskir geirðar, skifti ímillum... skúli, barnagarðar<br>Diagnosu basera hjálp<br>Fakligheit verja sína fakligheit... virða teir ymisku fakbólkarnar<br>Detta ímillum eftur 3. fl. aftaná skúlatíð.<br><br>Ymisk system. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Betri samstarv ímillum geirðar<br>For tilfeldugt hvar man býr<br>Definera foreldra ábyrd |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Rollan hjá heilsufrøðingum<br>Tagnarskyldu-<br>Trivna í felagskapi- trupult at møta øllum, spælibólkar, síggja styrkir í ymiskleikanum<br>Kappingasinnaði bæði í skúla og felagsskapi |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:**<br>**Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* og *Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | Her og nú:<br>- Betri samstarv og samskiftið ímillum geirar og ímillum fakligheit.<br>- Faklig vitan iforhold til samskiftið og relationir<br>- Foreldur sum viðspælarir (foreldrafatan)<br>- Gera konkret uppskot til foreldur<br>Komandi 3-5 ár:<br>- Ein hurð (Barni møtir skjótt ekspertisuna)<br>- Ulighed i sundhed... øll skulu kunnnu fáa hjálp |

| | |
|---|---|
| | Hvør skal fremja hesar broytingar:<br>- Hugburs broyting<br>- Lovarbroytingar<br>- Samfelagsbroyting frá sundhedsforebygge til sundhedsfremma |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Ein hurð (samskipari)<br>2. Fyribyrgjing. Skjótt tilgongd<br>3. Barni og familjan í fokus |

# F - Arbeiðsborð 27 - Fakligheit, barnafatan og barnarættindi

Í okkara skipanarfrymli fyri hesa ráðstevnu flætta vit saman fleiri vitanarøki, sum øll savna seg um kjarnuna Gott barna- og ungdómslív

**6 vitanarøki**
A. Trivnaður, resiliensur og góðir felagsskapir
B. Sosialar kontraktir, lóggáva og rættindi
C. Gransking, dátur og talgilding
D. Skipað netverk og felags almenn leiðsla
E. Rættstundis, tvørgeiralig og burðardygg tilboð og átøk
F. Fakligheit, barnafatan og barnarættindi




**Mál:**
Børn og ung hava rættindi eins og allir aðrir samfelagsborgarar. Tey eru okkara felags ábyrgd, og er tað okkara felags skylda at tryggja teimum gott barna og ungdómslív. Fakligheit og barnarættindi skulu vera grundarlag fyri teimum tilboðum og átøkum, vit veita. Fáa fakligheit og barnarættindi í fokus í øllum liðum.

**Avbjóðing**:
Ymiskir mátar at síggja børn og ung kunnu hava við sær ymiskar fatanir av hvussu tilboð og átøk verða skipað. Vit síggja ov ofta, at professionell fakfólk aftra seg at traðka til og handla – "berøringsangst".

**Nakrar niðurstøður frá teimum trimum arbeiðsbólkunum:**

- Vit skulu hava góðar stovnar við góðum kørmum, dugnaligum proffessionellum og fakliga sterkum starvsfólkum, sum menta, stimbra og menna børnini í felagsskapinum
- Mugu savnast um barnið – idealið er, at vit hava færri og sterkari eindir við serkunnleika
- Verður ov ofta farið í miðlarnar heldur enn at partarnir seta seg saman og tosa. Tað skapar ótryggleika og kaos. Serliga fyri børnini.
- Leiðsluførleikarnir mugu styrkjast munandi. Leiðarar mugu hava evni at leiða, men eisini amboð, myndugleika og handlikraftina samsvarandi

**Nakrar niðurstøður frá tilmælum**:

- Stuðla undir at fakfólk fáa betri førleikar og eitt felags mál til at viðgera og arbeiða við børnum og ungum. Soleiðis fyribyrgja vit ógreidleika og misskiljingum.
- Skipa regluligar verkstovur ella ráðstevnur um viðkomandi evni fyri ymiskum fakbólkum til tess at menna tvørgeiraliga vitan og felags orðfeingi

| | |
|---|---|
| **BÓLKALUTTAKARAR:**<br>Synnøve av Rana, Oddvá Thomsen, Sóley Sámuelsen, Una Knudsen, Annika Winther Klit, Mariann Poulsen, Inga Símunardóttir, Marjun Nielsen, Unn Mikkelsen. | **SKRIVARI:**<br>Navn: Synnøve av Rana<br><br>**ODDAFÓLK:**<br>Navn: Birita Lamhauge Jóansdóttir. |
| Í skrivispurti #1 skal arbeiðsbólkurin hugsavna seg um at lýsa punkt 1-2-3.<br><br>Í skrivispurti #2 skal arbeiðsbólkurin liðugtgera punkt 1-2-3 og til endan tosa um og lýsa punkt 4-5 og 6 | |

| Skrivispurtur #1: ØKI: Fakligheit, barnafatan og barnarættindi | |
|---|---|
| **1 )**<br>**Íkast til felags verkætlanina:**<br>Hvussu kann hetta økið vera við til at tryggja tað góða barna og ungdómslívið?<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | Vitan og royndir, sum vit sita við um barnið og tess umstøður, kunnu forða okkum í at veruliga trúgva upp á, at broyting ber til. Vit kunnu vera ov ávirkað av negativum mynstrum og hugsa fordómsfult "Vit vita hvussu hatta plagar at enda", "Vit kenna slagið", "Tað nyttar ikki við slíkum børnum/familjum" o.s.fr.<br><br>Her er fakligheit, barnafatan og barnarættindi grundleggjandi fyri at kunnu bróta keðilig mynstur. Barnarættindi eru stýrandi, so at øll børn fáa somu hjálp, góð barnafatan letur okkum taka atlit til og útgangsstøðið í einkulta barninum, og fakligheit ger, at vit leita okkum rættu vitan og brúka røtt amboð.<br><br>**Meira um barnarættindi**<br>Tað er alneyðugt, at vit sum føroyskt samfelag fáa niðurskrivað barnarættindi, tí tað er stýrandi fyri hvussu børn og ung verða møtt allastaðni, har sum tey eru. Í familjan, í frítíðarlívi, í stovni og á skúla. Samfelagið verður meir og meir fjølbroytt og vit hava ymiskar mentanir, sum koma við ymiskum góðum og viktigum perspektivum. Men tað er viktigt, at vit fáa eina barnalóg, sum tryggjar okkara børnum rættindi, óavhengig av hvørjum miljø, tey vaksa upp í í Føroyum.<br>Tað kunnu vera grundleggjandi barnarættindir, sum tey í barnasáttmálanum hjá ST, men eisini rættindi sum aðrir samfelagsbólkar hava strítt seg til gjøgnum fakfelagsarbeiði, sum til dømis rættin til feriu. Børn sjálvi, foreldur og onnur vaksin, mugu vita hvar tey skulu venda sær, um barnsins rættindi ikki verða møtt og vita, at arbeitt verður við tí.<br><br>Ítróttur sum dømi: Eitt aspekt er, um børn skulu hava rætt til at menna seg innanfyri ítrótt óavhengig av fíggjarliga støðuni hjá foreldrini. Í so fall, hvussu verður tað tryggjað? Eitt annað aspekt er, hvat fyri rættindir hava børn, sum íðka ítrott? Hvussu tryggjar man sær, at tað ikki verður hugd millum fingranar, tá venjarar (kanska serliga sum koma uttanlanda frá) agera út frá eini barnafatan, sum brýtir við grundleggjandi barnarættindi í Føroyum? Vit kenna nógv tilfeldi, har børn og foreldur hava vent sær til ítrottafeløgini, men tað verður ikki tikið í álvara.<br><br>Hetta er eisini galdandi aðrastaðni. Hvar kann man venda sær, um rættindi eru brotin, og hvussu fær man hjálp?<br><br>**Meira um barnafatan**<br>Barnafatanin ávirkar, hvussu vit fara við barninum og familjuni, hvat fyri hjálp og stuðul barn og famlja fær, og hvussu man sær barn og familju í mun til samfelagið. Tí er tað viktigt, at øll sum eru um børn, eru tilvitað um sína barnafatan, bæði persónliga og innanfyri organisasjón ella stovn. Hvat fyri barnafatan hava vit, og hvussu sæst tað aftur i okkara organisasjón/stovni og okkara arbeiði?<br>Tí má tað varpast ljós á barnafatan, og tað er av alstórum týdningi, at vit koma fram til eina felags barnafatan fyri føroyska samfelagið sum heild.<br><br>Tann góða barnafatanin er knýtt at barnarættindunum og má vera grundað í fakligheit.<br><br>Tann góða barnafatanin kann eisini gera, at vit seta okkum meira í |

| | |
|---|---|
| | barnahædd, og fáa perspektiv barnsins inn yvir, sum kann vera við at forma hvussu vit sum heild arbeiða við børnum og ungum í Føroyum, og innanfyri ein organisasjón ella í ein institusjón. Men eisini í møti við tað einkulta barnið, hevur tað barnið vitan um sítt lív, sínar avbjóðingar og hvat skal til ella ikki, fyri at møta teirra avbjóðingum. |
| **2)**<br>**Íkast til felags verkætlanina:** Hvørjar tvørgangandi avbjóðingar møta vit millum økið *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* og økið *Gransking, dátur og talgilding,* ið vit eiga at arbeiða víðari við?<br>*(brúka uml. 15 min.)* | **Samstarv: manglanda yvirlit og samanhangur í tilboðnum til børn**<br>Samstarv er viktigt fyri at tryggja gott barnalív. Tí mugu ymiskir partar vita av hvørjum ørum, og ein reyður tráður má vera í arbeiðinum, upp á tvørs av stovnum og fakbólkum, sum er um børnini.<br><br>Sum heild manglar týðiligheit, bæði fyri børn, foreldur og fakfólk, um hvat fyri tilboð er til, og hvar man kann venda sær.<br>Hvørt økið og hvør fakbólk veit nógv um sítt, men manglar innlit í hvat hini gera. Tað ger at tilboðið, sum børn og teirra familjur fáa, er tengt at hvørja hurð, tey hava bankað uppá. At banka uppá “skeiva hurð” kann gera, at man ikki fær somu hjálp og stuðul, sum man kundi fingið við at banka uppá eina aðra hurð. Her manglar ‘eitt’ stað at fara til - ‘ein’ hurð.<br><br>**Heildarperspektiv og nýggj tilboð**<br>Tað manglar eisini eitt heildarperspektiv. Tvs. eitt yvirlit sum vísir, hvat fyri umráði eru dekkað, hvar tað yvirlappar millum stovnar, og um har eru grásonur ella beinleiðis hol í tilboðini.<br>Hetta má so leiða til eina menning av tilboðunum.<br><br>Har sum samstarv longu er, má man royna at finna út av, hvat fungerar og hví, hvat ikki fungerar og hví ikki. Til dømis, hví samstarvar ein dagstovnur/skúli væl við barnaverndian, meðan samstarvið ikki fungerar væl á ein øðrum dagstovna/skúli.<br><br>Men menning merkir ikki alltíð at starta nýggj tilboð ella fáa nýggjar fakbólkar innyvir. Ofta er tað nógv betri at lata tey í til uppgávuna, sum eru har frammanundan. Tvs. at man førleikamennir og setur nokk tíð og ressursir inn á tilboð, sum longu fungera.<br><br>**Tagnarskyldu**<br>Ofta kann tagnarskyldan, sum skal verja barnið, gerast ein forðing fyri samstarv. Tað ger eisini prosessir longri og drúgvari enn neyðugt, tí instansir, sum skulu arbeiða fyri barnið, ikki fáa heildarvitan um støðuna hjá barninum. Tagnarskyldan má gagnað barninum. Men samstundis mugu barn og foreldur ikki hava fatan av, at teirra privatlív ikki eru vard.<br><br>**Fakligar ósemjur (ella manglandi samstarv og tvørfaklig vitan)**<br>Vit kunnu møta fakligum ósemjum sum ávirka barnafatanina og víðari ávirka, hvat slag av hjálp, barnið fær. (Kanska er tað alíkavæl ikki alltíð beinleiðis ósemjur, men manglandi samstarv millum fakbólkar, ella manglandi balansa millum ymiskar fakligar vinklar og tilnærmingar).<br>Eitt dømi er ein fatan, sum sigur, at “trupulleikin liggur í barninum”. Hetta ger, at vit seta ressursir inn á at viðgera barnið, og gloyma aðrar faktorar sum spæla inn rundanum barnið.<br><br>Vit uppliva, at hetta í nógvum førum er barnafatanin, sum er dominerandi í dag: trupuleikin liggur í barninum, og skal loysast í barninum. Barnið verður |

| | |
|---|---|
| | sent til útgreiningar, til psykolog ella líknandi. Og fyri at eitt barn kann fáa hjálp, má tað verðið funnin ein avbjóðing í barninum sjálvum. Tvs. at í nógvum førum er hjálpin til barnið tengt av, um barnið fær eina diagnosu, ella váttan um, at har eru svárar sálarligar avjóðingar, ella at barnið ikki mennist nóg væl motoriskt ella fakliga. Áðrenn hetta er váttað, fær barnið (og familjan) minimala ella onga hjálp, og tá tað er váttað, er tilboðið rætta móti tí einstaka barninum.<br>Men tá eitt barn stríðist, eru aðrir faktorar enn teir, sum barnið sjálvt stýrir, og hetta tekur systemið ikki nóg væl atlit til.<br><br>Happing er eitt gott dømi. Áður hevur man hugt eftir tí einstaka barninum (tað happaði barnið, ella happarin), og roynt at loysa trupuleikin har. Barnarættindir (børn hava rætt til trygg umstøður), barnafatan (børn happa ikki, tí tey eru ónd/børn verða ikki happað, tí teimum feilar okkurt) og fakligheit (tað er granskað á økinum, og man hevur funnið nýggj vitan) hevur gjørt, at man er farin at arbeiða við bólkum, har happing fyrikemur, tí man sær happing sum eitt symptom uppá eitt ótrygt sosialt umhvøvi, meira enn at man skal "fiksa børnini".<br><br>**Intensjón og ítøkilig úrslit**<br>Intensjón um samstarv kann vera góð, men í veruleikanum fær man bara skavað í yvirflatuna og har koma ikki nóg ítøkilig úrslit. |

| **Skrivispurtur #1: Okkara greining av tvørgangandi avbjóðingum** | |
|---|---|
| **3) - Orðingar**<br>Hvat skal broytast, fyri at ein ella fleiri av omanfyristandandi avbjóðingum verða loystar í dag?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | **Ein hurð**<br>Tað er av størsta týdningi, at vit fáa eina hurð, so at børn, foreldur og fakfólk vita, hvar tey skulu venda sær, og at man er tryggjað, at kvaliteturin í tilboðnum er javnur.<br><br>**Barnarættindir og barnafatan**<br>Alneyðugt, at tað verður útformað og varpað ljós á barnarættindi og barnafatan. Ein konklusjón um, hvat børn hava rætt til í Føroyum, og hvussu vit eiga at síggja børnini og fyrihalda okkum til tey.<br>Ein arbeiðis- og umhvørvislóg til børn. Tað má prioriterast at har børn eru, er fysiskar karmar eisini høgt prioriterað.<br><br>Barnarættindir og barnafatan má blíva týðiligt á øll planum í samfelagnum, og vit meta, at tað má ein holdningskampanja til. Nøkur ting eru broytt alvorliga í okkara samfelag gjøgnum tílíkar kampanjur. Til dømis er holdningur til royking heilt broyttur. Frá at tað í 80-inum var vanligt at royka inni, og eisini meðan man var um børn ella trillaði eina barnavogn, men hetta er als ikki akspeterað í dag.<br><br>Vit síggja fyri okkum eina holdningskampanju við denti á barnarættindir og barnafatan, grundað í gransking og fakliga vitan. Ein kampanja sum eisini varpar ljós á ta góðu nærveruna og góðar, tryggar relasjónir.<br><br>Vit síggja eisini fyri okkum, at ein dag um árið, verður brúktur í stovnum, skúlum og í samfelagum sum heild, at varpa ljós á barnarættindir og barnafatan.<br><br>Vit síggja eisini fyri okkum eitt barnaumboð, sum hevur ein meira aktivan og týðiligan leiklut. Har barnaumboðið er ein, sum er við og frontar tílíkar |

| | |
|---|---|
| | kampanjur, kanska er við í barnasendingum í sjónvarpi og útvarpi, er knýtt at eini adressu ella einum húsum, har børn/vaksin kunnu venda sær. Og sum aktivt arbeiðir fyri barnsins rættindum í føroyska samfelagnum.<br><br>**Lágterskul tilboð**<br>Afturatat tað, at tilboðið til børn, sum stríðast, má blíva meira yvirskuðiligt, er eisini stórur tørvur á tilboðum á einum lagri plani. Eitt tilboð til foreldur sum stríðast í sínu rollu, ella hava børn sum stríðast.<br>Ofta virkar tað for alvorligt at skulu seta seg í samband við lækna, sernám ella barnavernd.<br><br>Vit síggja fyri okkum eitt tilboð (kanska eitt familjuhús?), har man kann venda sær fyri at fáa vegleiðing og hjálp. Tilboðið skal vera alment, eitt lággáttartilboð, og uttan skráseting. Tað vil siga, at foreldur skulu kunna venda sær hagar uttan at tey vera "klientar" ella skulu vera bangin fyri at tað "forfylgir teimum" víðari í systeminum.<br>Eitt tílíkt tilboð kann kanska eisini arbeiða pro-aktivt við at veita skeiðir ella annað slag av førleikamenning.<br>Til dømis at bjóðað samlívs-skeið (gjarna bólkar) til øll foreldur við børnum, sum hava serligan tørv, ella foreldur at tannáringum?<br>Eitt annað dømi kann vera eitt tilboð til foreldur, sum uppliva at missa tamarhaldið á sær sjávum í konfliktum við barni, sum antin skeldar út og hóttir, ella eru fysiskt harðlig. At tey kunnu fáa hjálp, áðrenn tað útviklar seg og blívir ógvusligt, og endar sum eitt harðskapsmál.<br>(Har má sjálvandi vera ein avklároing um, hvat man ger um málini faktisk eru harðskapsmál el.l., í mun til tagnaðarskyldu, fráboðanarskyldu o.l.)<br><br>**Førleikamenning og ressursir**<br>Vit mugu trúgva uppá tey, sum longu er um børnini, og satsa uppá førleikamenning, har man metir, at nakað manglar.<br>Eisini mugu ressursir fylgja við um uppgávur breiðkast.<br><br>**Samanspæl millum fakligheit, barnafatan og barnarættindir**<br>Tað er viktigt, at tilboðini eru av fakliga góðum kvaliteti. Samstundis má fakligheitin ikki gera, at vit tosa uppiyvir børnum og familjum, men at vit hava barnarættindir og ta góða barnafatanina við, so vit eru í barnahædd. |

| **Skrivispurtur #2: Taka samanum útiumfarið** | |
|---|---|
| **4) – Taka samanum**<br>Taka samanum tað, sum kom fram í útiumfarinum<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | **Barnarættindir**<br>Barnarættindi umfata eisini umhvørvið hjá børnunum. Ofta verða fysiskar karmar, har børn eru, niðurprioriteraðir í mun til har vaksin eru. Um vit vilja seta børn fyrst, má tað eisini síggjast aftur í priorietring av hølum, útiøkjum o.s.fr.<br><br>**Ráðgeving til familjur**<br>Heilsufrøðingur fer inn í heimið til barnið er 18 mnð, men so er einki fast fyrr enn barnið byrjar i skúla. Foreldur hava møguleika at seta seg í samband við heilsufrøðing, men tað er ikki vanligt. Hvussu kann tilboðið blíva meira sjónligt? Og hvussu kann man tryggja sær nokk ressursir?<br><br>**Tilboð til sperdar familjur** |

| | |
|---|---|
| | Hvussu fær man fatur á børnum, har foreldrini ikki eru sosialt sterk? Hvussu fær man fatur á børnm, sum ikki eru við í onkrum felagsskapi?Skúla: hvussu fær man øll børnini við - avbjóðandi, tá foreldrini ikki eru sosialt sterk e.l. Hvussu fær man fatur á teimum børnunum, sum ikki er í nøkrum felagsskapi? |

| **Skrivispurtur #2: Grundað á heima og útiumfarið:<br>Uppskot um hvussu tvørgangandi avbjóðingarnar verða loystar viðv. økjunum *Fakligheit, barnafatan og barnarættindi* og *Gransking, dátur og talgilding*** | |
|---|---|
| **5) - Loysnir**<br>1. Her og nú<br>*2.* Komandi 3-5 árini<br>*3.* Hvør skal fremja hesar broytingar?<br>*(brúkið uml. 20 min.)* | 1) Her og nú: Útarbeiða ein barnalóg, sum vísir á barnarættindi í Føroyum og ta føroysku barnafatanina, grundað í fakligari vitan og gransking.<br><br>2) Komandi 3-5 árini<br>**Fokus á barnarættindir**<br>Kampanja frá Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum um barnarættindir og barnafatan (sí punkt 3). Tryggja, at vit hava skipanir, sum lyfta tað og tryggja, at vit kunnu liva upp til tað. Tað fíggjarliga má fylgja við.<br><br>Gera tilfar um barnafatan og -rættindir, sum er tøkt at brúka. Fáa barnaperspektivið inn í prosessina, og eisini úrslitið (faldarar, videobrot, sjónleik, listaframsýningar o.s.fr.).<br><br>**Førleikamenning**<br>Styrkja fakligheitina, so at har er yvirskot til at seta fokus á barnarættindir og barnafatan. Førleikamenna tey, sum eru á barna- og ungdómsøkinum.<br><br>**Ein hurð**<br>Arbeiða við loysnum til "eina hurð" (eitt familjuhús, sí punkt 3, kann vera hurðin). Seta koordinatorar e.l. sum fáa tíð og umstøður til at hjálpa børnum, foreldrum og fakfólkum at finna vegin gjøgnum skipanina.<br><br>Ger eitt lággáttartilboð til familjur, uttan skráseting, og møguleika fyri at vera dulnevnd. Tilboðið er eisini proaktivt. (sí punkt 3)<br><br>**Barnaumboð**<br>Ein funksjón, sum er barnaumboð burturav. Sum hevur eina aktiva rødd í samfelagnum, sum børn og vaksin kenna. Sum arbeiðir fyri barnsins rættindir í føroyska samfelagnum.<br><br>Styrkja barnsins rødd í skúla og barnagarði. |

| **Skrivispurtur #2: Alt ber til. Tú sleppur at gera tríggjar slóðbrótandi broytingar at tryggja gott barna og ungdómslív í Føroyum.** | |
|---|---|
| **6) – Hvat hevði eg broytt?**<br>1.<br>2.<br>3.<br>*(brúkið uml. 10 min.)* | 1. Sett eit familjuhús á stovn. Familjuhúsið er eitt alment tilboð og virkar samskipandi – sum tann einasta hurðin. Har eru fakfólk í húsinum, men eisini fakfólk og kooordinatorar knýttir at húsinum, sum hava sína dagligu gongd aðrastaðni. Barnaumboðið er eisini knýtt at húsinum. Har er tilboð á fleiri stigum, men fyrst og fremst á tí lægsta stigið, sum snýr seg um førleikamenning og fyribyrging. Familjuhúsið kann hjálpa familjum víðari upp í systeminum, um tey tørva meira hjálp.<br>Húsið hevur ókeypis foreldra- og familjuráðgeving, uttan |

| | |
|---|---|
| | skráseting. Ymisk skeið og workshops, har foreldur kunnu fáa hjálp við avbjóðingum. Familjuhúsið veitir eisini tilfar til skúlar og stovnar, og er ein ressurs, tey kunnu heita á.<br>2. Nærvera og tíð er tað, sum børn hava allarmest brúk fyri. Tí høvdu vit vilja givið meira tíð til foreldur at verða heima við børnum undir skúlaldur, uttan at tað ávirkar teirra fíggjarstøðu. |